# GERÐABÓK

**Dato:** 22. juni 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 134/22 – 169/22**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Jóan Petur Vang
Barbara Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>22. juni 2022 | Blað nr.: 557<br><br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 134/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 559 |
| 135/22 | 21/03588-5 | Umsókn um keyp av lendi uml. 95 m2 av matr.nr. 1022a, at leggja saman við matr. nr. 970k, Tórshavn. | 561 |
| 136/22 | 22/03066-1 | Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum | 563 |
| 137/22 | 22/02292-1 | Eykajáttan til konto 5370 stuðul til íløgur | 566 |
| 138/22 | 16/03741-6 | Stuðulsnevndin fyri svimjihyl í Nólsoy : Umsókn um at TK yvirtekur matr. nr. 126a, Nólsoy móti at tey fáa matr. nr. 147c, 19 ella 92a, Nólsoy til eitt savn til minnis um Ova Joensen | 569 |
| 139/22 | 22/01951-1 | Skúlin á Fløtum - undirvísingarhøli | 576 |
| 140/22 | 18/04396-3 | Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum | 578 |
| 141/22 | 21/04845-2 | Umsókn um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla skúlaárið 2022-23 | 593 |
| 142/22 | 21/03920-1 | Stórhøll | 597 |
| 143/22 | 20/03654-1 | Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn | 603 |
| 144/22 | 21/00407-1 | Miðbýarætlan - Havnará | 610 |
| 145/22 | 21/00684-1 | Brúgv í Havnardali | 615 |
| 146/22 | 17/00415-67 | Skúlin við Løgmannabreyt : Karlamagnusarbreyt 47 – 188 Hoyvík – matr. nr. 135fe – Kanna klæðing – útveggir | 618 |
| 147/22 | 20/03632-29 | Kloakk við sjógv (økið við gamla skúla) | 621 |
| 148/22 | 22/02522-1 | Dagføring av reinsiverkinum í Havnardali | 623 |
| 149/22 | 22/02539-11 | Umsókn frá Føroyskt Íslandsrossafelag um at byggja Skeiðbreyt | 626 |
| 150/22 | 21/04566-2 | Umsókn um at seta 24 m høga mastur upp á Hjalla | 628 |
| 151/22 | 21/04572-2 | Dagføra mastur Inni á Gøtu, matr. nr. 1ob, Hoyvík | 630 |
| 152/22 | 22/01974-5 | Keyp av kommunalari ogn at leggja afturat 1230c, Tórshavn | 632 |
| 153/22 | 22/02075-3 | Umsókn til ummælis um sundurbýti av matr.nr. 255b, Undir Kongavarða, Argir | 635 |
| 154/22 | 22/02915-4 | Broyting av Serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna | 638 |
| 155/22 | 22/02516-3 | Umsókn um broytan av byggisamtyktini á matr. nr. 8a og 8d, Kirkjubø í sambandi við verkætlan | 641 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 156/22 | 22/01898-1 | Keyp av traðum til framtíðar útstykkingar | 643 |
| 157/22 | 22/01377-1 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | 645 |
| 158/22 | 22/02687-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki við Stórutjørn, partur av matr. nr. 139a og 135ed, Hoyvík | 649 |
| 159/22 | 22/00463-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð | 651 |
| 160/22 | 22/02494-1 | Broyting av ásetingum um nýtslustig fyri 1. og 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu | 654 |
| 161/22 | 22/02850-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Dr. Jakobsensgøtu og Sverrisgøtu | 656 |
| 162/22 | 20/01023-1 | Umsókn um broyting av hæddarásetingini fyri B1 øki í almennu byggisamtyktini | 658 |
| 163/22 | 21/00642-6 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri økið har nýggja bakaríið skal byggjast matr. nr. 322 og 323, Tórsgøta/Sverrisgøta, Tórshavn | 660 |
| 164/22 | 21/02554-2 | Umsókn um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri matr. nr. 410a, 411d, 413a, 413b, Tórshavn | 663 |
| 165/22 | 22/01979-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2021 | 667 |
| 166/22 | 22/02186-1 | Broyting í reglugerð um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu | 670 |
| 167/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 673 |
| 168/22 | 22/02582-2 | LGBT-Føroyar : Umsókn um stuðul til Føroya Pride 27. juli 2022 | 676 |
| 169/22 | 22/03205-1 | Avtala við LGBT um skrúðgongu | 679 |

| | Býráðsfundur<br>22. juni 2022 | Blað nr.: 559<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Til viðgerðar**

## 134/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 55/22 | 22/00011-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 82/22 | 22/00011-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 108/22 | 22/00011-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 134/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Tikið til eftirtektar.

## 135/22 Umsókn um keyp av lendi uml. 95 m2 av matr.nr. 1022a, at leggja saman við matr. nr. 970k, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 55/22 | 21/03588-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 65/22 | 21/03588-5 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 103/22 | 21/03588-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 170/22 | 21/03588-5 |
| 5 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 135/22 | 21/03588-5 |

**Upprunin til málið.**
Umsókn frá eigara av matr.nr. 970k.

**Lýsing av málinum.**
Eigarin av matr.nr. 970k, søkir um at keypa uml. 95 $m^2$, av grannaognini matr. nr. 1022a, Tórshavn, sum verða lagdir afturat matr.nr. 970k.

Økið liggur sum ein natúrligur partur av ognini matr. nr. 970k, og stendur hjallurin, sum hoyrir til húsini, á matr.nr. 1022a. Eigarin ger vart við, at endamálið við keypinum er at eiga økið, so tey framhaldandi kunnu røkja økið sum teirra.

Víst verður til skjal »*Umsókn til T.K um keyp av uml. 84 $m^2$.pdf*«

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Kommunustýrislógin.*
§ 44. Føst ogn hjá kommununi má ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongdina við almennum útboði umframt reglur um, at ávísar ognir kunnu undantakast almennum útboði.
*Kunngerð um alment útboð.*
§ 2. Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um
- 3. sølu av økjum, ið eru minni enn 300 $m^2$ til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á

**Upplýsingar frá umsitingini**
Býarskipanardeildin viðmerkir, at ein møgulig søla av lendinum, sum søkt verður um, ikki gagnar møguligum framtíðarætlanum á Havnaøkinum. Í staðin verður mett, at umsøkjari kann fáa eitt brúksloyvi til økið, sum umfatar, at umsøkjari kann halda økið við ávísum treytum. Sí uppskot til brúksavtalu skjal nr. 21/03588-10.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**
J.nr. 21/03588-1 Umsókn til T.K um keyp av uml. 84 $m^2$.pdf
J.nr. 21/03588-5 Meting - partur av matr.nr. 1022a TK.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á byggimálsdeildini, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla frá at ganga umsóknini um keyp av lendi á møti, men í staðin at geva umsøkjara brúksloyvi til økið. Sí skjal 21/03588-10.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at ganga umsóknini á møti og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við at selja lendið sambært umsókn til mettan kostnað og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 136/22 Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 181/22 | 22/03066-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 136/22 | 22/03066-1 |

**Upprunin til málið**
Felags áhugamál millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið.

**Lýsing av málinum**
Síðani Skúlin á Fløtum flutti úr bygningunum á Frælsinum hevur samskifti við millumbilum verið millum Tórshavnar kommunu og Føroya landsstýri um, hvat bygningarnarnir á Frælsinum, ið eru samogn millum landið og kommununa, skulu brúkast til.

Partur av hesum samskiftið hevur snúð seg um skúlabygningin í Hoydølum, ið somuleiðis stendur tómur.

Í eini roynd at finna eina loysn á fleiri avbjóðingum undir einum, eru Tórshavnar kommuna og Mentamálaráðið komin ásamt um at leggja fram eina makaskiftisloysn, ið loysir hølistrupulleikarnar hjá bæði landsmyndugleikunum og kommununi og letur upp fyri, at sjøtul kann setast á stóru campus-verkætlanina hjá Fróðskaparsetrinum á Frælsinum.

Fróðskapasetur Føroya heldur í dag til í fleiri bygningum, eitt nú í Sjóvinnuhúsinum hjá Tórshavnar kommunu. Ein ætlan um at savna Fróðskaparsetrið í einum campus-øki á Frælsinum hevur leingi verið í umbúna.

Samstundis hevur kommunalt politiskt ynski verið frammi um at savna alla fyrisitingina hjá Tórshavnar kommunu á einum stað.

Við at flyta Fróðskaparsetrið úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum og út í bygningarnar á Frælsinum og við at flyta fyrisitingina hjá kommununi úr mongu bygningunum í miðbýnum og út í Sjóvinnuhúsið, verða atlit tikin til ynskini hjá bæði Tórshavnar kommunu og Fróðskaparsetrinum.

Tórshavnar kommuna eigur 40% av bygninginum og økinum á Frælsinum, og landið eigur hini 60 %. Harumframt eigur Tórshavnar kommuna 100% av lon 4, ið er sambygd restina av bygningunum á Frælsinum.

Í eini avtalu, ið samstundis er ein makaskiftisavtala, er ætlanin at lata landinum ognarrættin á teimum 40% av samognini á Frælsinum umframt alla lon 4, móti at kommunan fær gamla studentaskúlabygningin í Hoydølum, og at kommunan samstundis gerst leys av einum gávulyfti, ið Tórshavnar býráð í 1990 gav Fróðskaparsetrinum um at lata lendi til víddar umleið 50.000 m² til nýtt Fróðskaparsetur í Marknagili.

Avtalan inniber somuleiðis, at Fróðskaparsetrið fer úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum skjótast gjørligt og í seinasta lagi við ársenda 2024.

Avtalan er somuleiðis treytað av, at Løgtingið góðkennir avtaluna millum partarnar, og at Løgtingið setir neyðuga peningin av til at umvæla bygningarnar á Frælsinum eftir eini nærri ásettari ætlan.

Tórshavnar kommuna treytar sær við makaskiftavtaluni, at bygningarnir á Frælsinum verða til almenn útbúgvingar- og granskingarendamál hjá Fróðskaparsetur Føroya, og/ella sum lestraríbúðir.

Føroya Landsstýri treytar sær við makaskiftisavtaluni, at ræðisavmarkandi byrður kunnu verða lýstar á ognina í Hoydølum, undir hesum, at ognin einans skal kunna nýtast til almannagagnligt virksemi hjá Tórshavnar kommunu og forboð móti sølu ella avhendan av ognini.

Við at taka undir við omanfyristandandi prinsippavtalu, taka býráðið ávikavist Føroya Landsstýrið undir við, at farið verður undir eina tilgongd at fremja ætlaðu felagsloysnina. Hetta inniber millum annað, at bygningarnir á Frælsinum og í Hoydølum og lendið, ið kommunan lat sum gávu í 1990 verður virðismett av óheftum ognarmeklara, so eitt makaskifti kann gerast, ið tekur hædd fyri virðunum, ið báðir partar lata og fáa við ætlaða makaskiftinum.

Farið verður eftir ætlan undir hetta arbeiðið beinanvegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Principavtala dagførd 20. juni 2022 – Við dagføringum, j.nr. 22/03066-2
Skjal 3 - Leigusáttmálin SVH, j.nr. 22/03066-3
Skjal 2 - Býráðssamtykt 1990 o.a., j.nr. 22/03066-3
Skjal 4 - Kostnaður – Sjóvinnuhúsið, j.nr. 22/03066-3
Skjal 6 - Íløguætlanin, j.nr. 22/03066-3
Skjal 1 - Yvirlit yvir lendistørvi, j.nr. 22/03066-3
Skjal 5 - Servituttur á matr. nr. 18 Hoyvík, j.nr. 22/03066-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til prinsippavtalu millum Tórshavnar kommunu og Føroya landsstýrið og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 137/22 Eykajáttan til konto 5370 stuðul til íløgur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.05.2022 | 134/22 | 22/02292-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 126/22 | 22/02292-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.05.2022 | 144/22 | 22/02292-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 115/22 | 22/02292-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 137/22 | 22/02292-1 |

**Upprunin til málið**
Annfinn Brekkstein, formaður, setir fram uppskot um eykajáttan.

**Lýsing av málinum**
Fleiri felagsskapir hava síðsta árið søkt kommunua um íløgustuðul til bygging, útbygging og dagføring av bygningum v.m., sum ítróttafeløg og frítíðarfelagsskapir standa fyri.

Á stuðulsjáttanini 5370 Stuðul til íløgur er játtan ikki tøk til at avgreiða umsóknirnar.

Skotið verður tí upp at játta kr. 2,7 mió sum eykajáttan til kontu 5370 stuðul til íløgur fíggjað soleiðis:

- kr. 1,5 mió av løgukarmi LK57033 skjótibreyt
- kr. 1,2 mió av løgukontu L55001 Tórshavnar Býarsavn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir nevndini til at taka støðu til uppskotið.

**Mentamálanevndin 11. mai 2022**: Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykkir at játta kr. 1,5 mió av løgukarmi LK57033 Skjótibreyt og kr. 1,2 mió av løgukontu L55001 Tórshavnar býarsavn at flyta á kontu 5370 stuðul til íløgur.

Ein minniluti, Annika Olsen og Ruth Vang, tekur ikki undir við uppskotinum.

Málið verður um fíggjarnevndina beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 24. mai 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at játtaðar verða:

1,5 mió. kr. av L55001 Tórshavnar býarsavn
0,320 mió. kr. av LK57033 Skjótibreyt
1,180 av L27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum

Íalt 2,7 mió. kr. á konto 5370 stuðul til iløgur.

Málið beint í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Samtykt við fyrru viðgerð við 11 atkvøðum, tveimum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyi atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir, Bjørg Dam, Jákup Dam, Jón Kragesteen, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Ruth Vang.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri, 3 ímóti og einari blankari við aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Gunnvør Balle og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Annika Olsen.

## 138/22 Stuðulsnevndin fyri svimjihyl í Nólsoy : Umsókn um at TK yvirtekur matr. nr. 126a, Nólsoy móti at tey fáa matr. nr. 147c, 19 ella 92a, Nólsoy til eitt savn til minnis um Ova Joensen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 99/17 | 16/03741-6 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2017 | 121/17 | 16/03741-6 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 176/17 | 16/03741-6 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 207/17 | 16/03741-6 |
| 5 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 239/17 | 16/03741-6 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 305/19 | 16/03741-6 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 47/20 | 16/03741-6 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 73/20 | 16/03741-6 |
| 9 Nólsoyarnevndin | 28.04.2020 | 3/20 | 16/03741-6 |
| 10 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 175/20 | 16/03741-6 |
| 11 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 164/20 | 16/03741-6 |
| 12 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 232/20 | 16/03741-6 |
| 13 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 270/20 | 16/03741-6 |
| 14 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 254/20 | 16/03741-6 |
| 15 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 104/21 | 16/03741-6 |
| 16 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 288/21 | 16/03741-6 |
| 17 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 291/21 | 16/03741-6 |
| 18 Mentamálanevndin | 08.06.2022 | 144/22 | 16/03741-6 |
| 19 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 151/22 | 16/03741-6 |
| 20 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 138/22 | 16/03741-6 |

**Málslýsing:**
Á heystið 2016 fekk Tórshavnar kommuna umsókn frá Stuðulsnevndini fyri svimjihyli í Nólsoy um yvirtøku av øllum skyldum viðvíkjandi matr. nr. 126a, ið er eystanfyri Nólsoyar skúla (sí hjálagt skriv).

Nevndin metir tað vera ósannlíkt at hon klárar at fullføra verkætlanina við svimjihyli. Nevndin hevur nú ístaðin í hyggju at broyta endamálið í viðtøkunum og heldur fara undir at gera eitt savn til minnis um Ova Joensen og hansara roysni.

25. november 2016 vóru umboð fyri løgdeildina og mentamáladeildina á fundi og ástaðarfundi við umboð fyri Stuðulsnevndina úti í Nólsoy (sí hjálagda fundarfrásøgn).

7. mars 2017 kemur uppfylgjandi skriv frá Stuðulsnevndini um málið (sí hjálagt skjal).

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá verandi anleggi á matr. nr. 126a og møguleikunum har og

teimum møguleikunum, sum eru fyri staðseting av einum komandi savnsvirksemi og hvør samrakstur er hugsandi við aðrar partar.

Út frá tí ber til at meta nærri um, hvørt farast skal víðari í samskiftinum við Stuðulsnevndina og aðrar partar um møguliga verkætlan. Henda tilgongdin vil so avklára nærri fyritreytirnar fyri hesi verkætlanini sum mentamálanevndin so fær aftur til viðgerðar í heyst.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til yvirskipað at umrøða uppskotið hjá Stuðulsnevndini og at taka støðu til, um farast skal víðari við samskiftinum um eina møguliga savnsverkætlan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 11. mai 2017:** Samtykt at umsitingin tekur upp víðari samráðingar við umsøkjaran, um hvørjar aðrar loysnir kunnu vera hugsandi, herundir í onkrum verandi bygningi/húsi.

**Ískoyti**
Við støði í samtyktini hjá nevndini á seinasta fundi málið var fyri, hevur umsitingin verið í samskifti við stuðulsnevndina. Við støði í tí hevur nevndin latið inn nýtt uppskot við fleiri hugsandi møguleikum. Sí hjálagt skriv.

Talan er um:
a). Royndarhúsið
b). Avhaldshúsið
c). Lonin

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hvønn ella hvørjar av hesum valmøguleikunum, ið umsitingin skal samskifta víðari við stuðulsnevndina um.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Nevndin ynskir at fáa nærri lýsing av teimum trimum møguleikunum at leggja aftur fyri nevnd.
**Ískoyti**
Stuðulsnevndin er sbrt. umbøn komin við dagførdum uppleggi til framtíðar loysn og sum betri lýsir tær áður umrøddu loysnirnar. Sí hjálagt skjal.

Viðv. loysnunum
- Lonin er bygningur hjá Tórshavnar kommunu, ið verður umsitin av Tórshavnar Havn.
- Kunningarstovan leigar í bygningi hjá privatum eigara. Ein loysn har krevur nærri samráðingar við eigaran.
- Royndarhúsið er sum áður nevnt bygningur hjá Royndarhúsfelagnum og krevur at felagsskapirnir finna saman um eina loysn.

Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá uppskotunum og møguleikunum sum eru í teimum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu um
a). loysnin við Lonini skal innganga í víðari samskifti við Stuðulsnevndina?
b). loysnin við Kunningarstovuna skal innganga í víðari samskifti við Stuðulsnevndina?
c). loysnin við Royndarhúsinum skal innganga í víðari samskifti við Stuðulsnevndina?
**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at arbeiða víðari við loysn a) og beina málið til ummælis í vinnunevndini.

Marin Katrina Frýdal og Heðin Mortensen vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Málið kom ikki sum hugsað fyri í vinnunevndini.

Hinvegin avgjørdi vinnunevndin á fundi 3. apríl 2019 í máli 19/01422 - umsókn frá Biofar um at leiga stampagoymsluna at gera leigusáttmála við Biofar um somu hølir, ið annars vóru í umbúna til Ovasavn. Øll Lonin er uml. 100 m2, meðan Biofar leigar 33 m2, umframt bíðihøli hjá SSL eru har og arbeiðsrúm hjá tekniska økinum. Virksemi hjá Biofar kemur ætlandi at geva føst arbeiðspláss í oynni.

Meiri grundleggjandi kundi málið lutvíst ikki gjøgnumførast av tí, at byggisamtyktin har er havnaøkið og at tilgongd eisini skuldi fara í gongd viðv. at broyta byggisamtyktina – hetta er nú ávegis til politiska viðgerð.

Tulkingin hjá umsitingini var at talan var um eitt savn viðv. bátavirksemi og sjólívi og tí møguliga kundi góðtakast á einum havnaøkið.

Á borgarafundi í Nólsoy 23. oktober fekk TK handað eina umsókn um 'Verkætlan Savnsdepil í Nólsoy' - sí hjálagt skjal.

Í skrivi frá nevndini 23. oktober verður greitt frá at tey kenna til verkætlanina um savnsdepil, men at nevndin ynskir sum útgangsstøði at fasthalda sína verandi umsókn um stuðul og samstarv og nú at halda fram við loysn b). at keypa hølini har Kunningarstovan hevur verið og at TK inngongur í ta verkætlanina. Stuðulsnevndin metir at útlitini fyri einum savnsdepli eru meiri óviss og vil tí fyrst og fremst fremja hesa verkætlanina og kann savnsdepilsverkætlanin so vera áhugaverd seinni um hon skuldi komið so langt einaferð í framtíðini.

Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til broytta byggisamtykt á Havnaøkinum á Klivum, umframt gjørt uppskot til skipan og innihald á økinum, herundir at eitt margvirksemishús - við nakað sama innihaldi sum verkætlanin við savnsdepli lýsir kann vera. Sí hjálagt uppskot til skipan av økinum. Enn óvist viðv. víðari tilgongd við broyting av byggisamtykt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja antin:

a). at boðað umsøkjaranum frá at farið verður víðari í dialoginum um møguliga hølisloysn í Kunningarstovubygninginum ella øðrum bygningi í bygdini og avklára leiklutin hjá TK.
ella
b). at arbeiða víðari við at menna eina verkætlan á havnaøkinum, tá byggisamtyktin ætlandi er broytt.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Nevndin samtykti at taka undir við punkt a).

**Ískoyti:**

Við støði í samtyktini seinast hevur stuðulsnevndin fyrireika uppskot til loysnir í bygdini. Sí hjálagt skjal.

Á fundinum greinar umsitingini fyrimunir og vansar við ymsu loysnunum.

Fígging
Um farast skal víðari við ætlanini verður mælt til at útvega fígging á fíggjarætlanini fyri 2021.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja um:

a). haldast skal fram við samráðingunum við stuðulsnevndina um eina loysn og
b). at velja hvørja ella hvørjar av loysunum í sofall arbeiðast skal víðari við.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at halda fram við samráðingunum við stuðulsnevndina um loysn og beina uppskot um at matr. nr. 19 og 92a verður framtíðarloysn fyri Ovasavn í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Matr. 19 og 92a, Nólsoy, sum uppskot er um skal nýtast sum framtíðarloysn fyri Ovasavn, liggur sum D øki, ætlað almennum stovnum og mentan, í byggisamtyktini fyri Nólsoy. Sostatt eru ætlanirnar í tráð við ásetingarnar fyri økið.

Umsitingin hevur arbeitt við eini ætlan um at umskipa økið úti á Klivum, soleiðis at tað umframt havnavirksemi, eisini fevnir um m.a. mentan, smátt vinnuvirksemi, tænastuvirksemi og íbúðir. Í tí sambandi hevur man umrøtt møguleikan fyri at staðseta Ovasavnið í økinum úti á Klivum. Ætlanin varð løgd fram á borgarafundi í Nólsoy hin 23. oktober 2019 og bíðað verður eftir, at staðbundna nevndin viðger ætlanina og vendir aftur við viðmerkingum.

Hetta er tó ein long tilgongd, og eingin niðurstøða ella samtykt fyriliggur uppá ætlanina enn.

Nevnast skal, at onnur, t.d. Nólsoyar Bjargingarfelag og Nólsoyar róðrarfelag, hava víst áhuga fyri sama øki.
Sí skjal *Dokument* journal nr. 2005-1087/5 og
*TórshavnNew Microsoft Office Word Document* journal nr. 15/01767-1.
Møguliga kundi okkurt av hesum virkseminum húsast í sama bygningi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at taka undir við, at Ovasavnið verður staðsett á matr. nr. 19 og 92a, Nólsoy, og beina málið í staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 28. apríl 2020:** Staðbundna nevndin tekur undir við at haldast skal fram við samráðingingunum um Ovasavnið og og taka fund við Bjargingarfelagið um útbygging á áðurnevnda matr. nr. 19 og 92a.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samskifti við Stuðulsnevndina og tekur hon undir við at fara víðari við fyrireikingunum og herundir fáa til vega eitt skitsuuppskot til bygning á økinum at søkja um byggiloyvi við. Talan er um byggisamtykt, ið sum útgangsstøði hevur byggistig á 0,3 og tí er hóskandi at vita, um frávik kann fáast áðrenn farið verður undir at gera endaliga avtalu og at projektera verkætlanina.
Bjargingarfelagið
Samskifti hevur eisini verið við Bjargingarfelagið og ynskja tey eina loysn á sama stað, ið er torfør at

sameina við hesa verkætlanina. Mett verður meiri hóskandi at tað verður arbeitt fram móti eini betri loysn aðrastaðni.
Fígging
Stuðulsnevndin hevur eina ogn á umleið 500 tkr. og ynskir eitt gjald frá kommununi fyri at kommunan tekur yvir toftirnar á matr. 126a. Umframt at felagið kann søkja um annan stuðul til at fremja verkætlanina. Í samanleggingarsáttmálanum millum Tórshavnar kommunu og Nólsoyar kommunu frá 2004 er spurningurin um Ovasavn nevndur í punkt 29F (Sí hjálagt skjal).

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at fara undir at gera treytaðan leigusáttmála við stuðulsnevndina um langtíðarleigu av matr. 19 og 92a, har felagið skal hava fingið útvegað byggiloyvið til ein bygning innan 1 ár.
b). at fara undir samráðingar við Stuðulsnevndina um yvirtøku av matr. 126a.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur havt fyrireikandi fund við stuðulsnevndina. Nevndin hevur júst latið inn umsókn um byggiloyvi. Sí hjálagt nakrar tekningar. Væntandi kemur ein niðurstøða tí viðv. í heyst.

Nevndin hevur í hyggju at fáa stuðul frá kommununi, Uttanríkis- og mentamálaráðnum, fyritøkum og grunnum. Nevndin hevur meldað út at hon hugsar at stuðul frá TK íroknað endugjald fyri lendið har svimjihøllin skuldi brúkast skal vera umleið 1.000 tkr. Í sofall má hædd takast fyri tí í fíggjarætlanini fyri 2021 ella 22.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða, hvørt fíggjarligar raðfestingar skulu gerast av málinum í 2021 ella 22.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Umrøtt.

Heðin Mortensen varð ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti**:
Nevndin í felagnum hevur søkt um byggiloyvi til verkætlanina og væntast svar í hesum árinum. Somuleiðis er nevndin farin undir fyrireikingar til at søkja um stuðul til verkætlanina.

Sum liður í at skipa viðurskiftini til framtíðar tørv og ætlanir er felagið farið undir tilgongd at umskipa felagið til ein grunn. Sí hjálagt verandi viðtøkur. Ætlanin er at fara burtur frá ætlanin um svimjihyl og til burturav at hava savnsvirksemi sum endamál.

Eisini er ásett í § 11: "**§ 11.** Verður felagið uppleyst, skulu ognir felagsins latast í grunn, íð Mentunardeildin í Tórshavnar kommunu umsitur til frama fyri Dianu Victoriu."

Hugsanin er at kalla til eykaaðalfundar og niðurleggja felagið og gera ein grunn.

Tey hugsa eisini, at grunnurin hevði eina nevnd við 5 limum, harav 1 valdur av kommununi og ein av kunningarstovuni.

Sum útgangsstøði metir umsitingin, at ætlanirnar um at gera felagið um til ein grunn kunnu góðtakast. Umsitingin metir tó ikki neyðugt at binda kommununa til at hava ein nevndarlim í grunninum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini at umrøða spurningin um at loyva felagnum at umskipa seg til grunn. Mælt verður harumframt til ikki at hava kommunala umboðan í nevndini fyri grunnin.

Mælt verður til at beina málið til ummælis í fíggjarnevndini.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við, at felagið umskipar seg til grunn. Harumframt samtykt ikki at hava kommunalan nevndarlim í grunninum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Annika Olsen biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til leigusáttmála. Kommunan leigur Grunninum fyri Ovasavn, matrikklini 92a og 19, Nólsoy til bygging av neysti. Sí leigumál j.nr. 16/03741-102

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin í mentamáladeildini, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at taka undir við 30 ára leigusáttmála sí j.nr. 16/03741

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið við umboð fyri Ovasavnið bæði um stuðul til verkætlanina, og at kommunan endaliga yvirtekur grundina til ætlaða svimjihylin frá Ovasavninum. Grundin er á kommunalum matrikkli matr. 126a saman við skúlanum.

Byggingin av Ovasavninum væntast at kost kr. 2,4 mió. Eginpeningur higartil er uml. kr. 1 mió. Við støði í 30% stuðli er stuðulsupphæddin kr. 720.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta 30% í stuðli av kr. 2,4 mió til byggingn av Ovasavninum, sum er kr. 720.000, av kontu 5370 Stuðul til íløgur. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina. Harumframt verður mælt til, at kommunan yvirtekur alla ábyrgd av svmjihylsgrundini á matr. nr. 126a.

**Mentamálanevndin 08. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 139/22 Skúlin á Fløtum - undirvísingarhøli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 40/22 | 22/01951-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 125/22 | 22/01951-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.05.2022 | 143/22 | 22/01951-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 116/22 | 22/01951-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 139/22 | 22/01951-1 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á fleiri undirvísingarhølum vegna størri tal av flokkum.

**Lýsing av málinum**
Í samráð við skúlaleiðsluna hevur møguleikin verið umrøddur at byggja um verandi auditorii í útsynningshorninum móti parkeringsplássinum í Oyggj 7.

Verandi auditorii er dupulthøgt rúm. Umbyggingin hevur til endamáls at taka niður verandi uppbygging, leggja nýtt dekk í, umleggja tekniskar leiðingar og síðani byggja um til tvær nýggjar skúlastovur.

Nýggju stovurnar verða bygdar í sama sniði og dygd sum verandi stovur í skúlanum. Útveggirnir verða óbroyttir.

Skúlans leiðsla tekur undir við uppskotinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Biðið er um óbindandi tilboð frá arbeiðstakara, sum bygdi skúlan (Articon/Búsetur). Við ókendum, mvg v.m. er talan um kostnað uml. kr. 1,82 mió.

Játtan er ikki til endamálið í íløguætlanini 2022 grein 4.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Broytingin krevur dagført byggiloyvi. Við avhending av umbyggingararbeiðinum skal broytingin sýnast áðrenn nýtslutøku. Byggimálsdeildin er kunnað um broytingina og skal hava dagførdar tekningar við vm.

**Skjøl**
Kostnaðarmeting og arbeiðstakarans tilboð
Myndir av økjum, ið skulu umbyggjast.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til, um ætlanin skal fremjast, og um so er, at játtan kr. 1.820.000 verður fingin til vega. Samstundis verður mælt til at heimila umsitingini at fara í endaligar samráðingar og gera arbeiðstøkusáttmála við Articon/Búsetur á kr. 1.362.735,00 u/mvg. Málið at beina í fíggjarnevnd og býráð.

**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 24. mai 2022:** Samtykt at taka undir við at fremja ætlanina og játta kr. 1.820.000,00 av konto L27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir, til nýtt projekt til verkætlanina.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 140/22 Eftirmeting av sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 152/19 | 18/04396-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 187/19 | 18/04396-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 10/20 | 18/04396-3 |
| 4 Mentamálanevndin | 21.01.2020 | 31/20 | 18/04396-3 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 112/20 | 18/04396-3 |
| 6 Mentamálanevndin | 13.05.2020 | 130/20 | 18/04396-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 169/20 | 18/04396-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 175/20 | 18/04396-3 |
| 9 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 229/20 | 18/04396-3 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 11.03.2021 | 19/21 | 18/04396-3 |
| 11 Trivnaðarnevndin | 06.05.2021 | 36/21 | 18/04396-3 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 10.06.2021 | 42/21 | 18/04396-3 |
| 13 Trivnaðarnevndin | 07.10.2021 | 65/21 | 18/04396-3 |
| 14 Trivnaðarnevndin | 29.11.2021 | 92/21 | 18/04396-3 |
| 15 Trivnaðarnevndin | 10.02.2022 | 10/22 | 18/04396-3 |
| 16 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 28/22 | 18/04396-3 |
| 17 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 42/22 | 18/04396-3 |
| 18 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 127/22 | 18/04396-3 |
| 19 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 117/22 | 18/04396-3 |
| 20 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 140/22 | 18/04396-3 |

**Upprunin til málið:**
Mentamáldeildin og fundir um evnið

**Lýsing av málinum**
Mentamáladeildin hevur havt fund við partar sum varða av sernámsfrøðiliga økinum, og hvørji atlit Tórshavnar kommuna eigur at taka viðvíkjandi hølisviðurskiftum. Endamálið við fundinum var at fáa lýst økið og fáa greiði á ymsum viðurskiftum, sum ávirka rakstur og hølistørv til økið. Evnini, sum vórðu viðgjørd, eru málsetningar fyri sertilboðini, sum eru í Tórshavnar kommunu, hvørji atlit skulu takast viðvíkjandi bygningum, eftirmeting av økinum, og leikluturin hjá Sernámi og hjá Skúlanum á Trøðni.

4-10 er í Skúlanum á Fløtum - eindini við Landavegin í bygningi fyri seg. Tilboðið  er ætlað næmingum í 4.-10. fl., sum ikki rúmast í einum vanligum flokki, tí at ólagið ella trupulleikin hjá næminginum, krevur

eina undirvísing og ein pedagogik, sum torført er at fremja í verki í einum vanligum flokki. Tilboðið er lýst, men tann lýsingin eigur at verða dagførd

Í Hoyvíkar skúla er tilboð til næmingar við autismu. Tilboðið er til næmingar í 1.-9.fl. og næmingarnir í grunddeildini ganga eisini í Frítíðarskúlan í Hoyvík. Eingin lýsing er av tilboðnum.

Lopfjølin heldur til í Margarinfabrikkini og er ætlað næmingum, sum av sosialum ella psykiskum orsøkum ikki megna vanliga skúlagongd og aftra seg við ella ikki koma í skúla. Endamálið er, at næmingarnir taka fráfaringarroynd fólkaskúlans. Tilboðið er til næmingar í 7.-10. fl. lýsing er av Lopfjølini, og hon verður eftirmett nú.

Í Sankta Frans skúla er tilboð til næmingar við orðblindni. Tilboðið er til næmingar 3.- 7. fl.

Ætlanin er at halda fram at samskifta við ymsu partarnar við tí endamálið at fáa lýsing av øllum tilboðunum, at visitatónsreglurnar eru sjónligar, so foreldur, starvsfólk í skúlum og stovnum og myndugleikar kenna mannagongdirnar viðvíkjandi upptøku í ymsu tilboðini. Haraftrat er neyðugt, at greitt er, hvør tørvur er á sertilboðum í Tórshavnar kommunu. t.d. eftirlýsa skúlaleiðarar einum tilboði til børn í 0.-3. flokki og Undirvísingarstýrið hevur munnligan fyrispurning um pláss er til eitt tilboð til uml. 30 næmingar í einum á av fólkaskúlunum í kommununi.

Tá sertilboð er til børn í 0.- 3. flokki er talan bæði um skúla og frítíðarskúla, og tí er neyðugt at tilboðið er bæði í skúla og frítíðarskúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fólkaskúlalógin § 45 stk. 6

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Frágreiðing frá fundi um sernámsfrøðiliga økið.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**

**Upprunin til málið:**
Mentamáldeildin og fundir um evnið

**Lýsing av málinum**
Mentamáladeildin hevur havt fund við partar sum varða av sernámsfrøðiliga økinum, og hvørji atlit Tórshavnar kommuna eigur at taka viðvíkjandi hølisviðurskiftum. Endamálið við fundinum var at fáa lýst økið og fáa greiði á ymsum viðurskiftum, sum ávirka rakstur og hølistørv til økið. Evnini, sum vórðu viðgjørd, eru málsetningar fyri sertilboðini, sum eru í Tórshavnar kommunu, hvørji atlit skulu takast viðvíkjandi bygningum, eftirmeting av økinum, og leikluturin hjá Sernámi og hjá Skúlanum á Trøðni.

4-10 er í Skúlanum á Fløtum - eindini við Landavegin í bygningi fyri seg. Tilboðið er ætlað næmingum í 4.-10. fl., sum ikki rúmast í einum vanligum flokki, tí at ólagið ella trupulleikin hjá næminginum, krevur eina undirvísing og ein pedagogik, sum torført er at fremja í verki í einum vanligum flokki. Tilboðið er lýst, men tann lýsingin eigur at verða dagførd

Í Hoyvíkar skúla er tilboð til næmingar við autismu. Tilboðið er til næmingar í 1.-9.fl. og næmingarnir í grunddeildini ganga eisini í Frítíðarskúlan í Hoyvík. Eingin lýsing er av tilboðnum.

Lopfjølin heldur til í Margarinfabrikkini og er ætlað næmingum, sum av sosialum ella psykiskum orsøkum ikki megna vanliga skúlagongd og aftra seg við ella ikki koma í skúla. Endamálið er, at næmingarnir taka fráfaringarroynd fólkaskúlans. Tilboðið er til næmingar í 7.-10. fl. lýsing er av Lopfjølini, og hon verður eftirmett nú.

Í Sankta Frans skúla er tilboð til næmingar við orðblindni. Tilboðið er til næmingar 3.- 7. fl.

Ætlanin er at halda fram at samskifta við ymsu partarnar við tí endamálið at fáa lýsing av øllum tilboðunum, at visitatónsreglurnar eru sjónligar, so foreldur, starvsfólk í skúlum og stovnum og myndugleikar kenna mannagongdirnar viðvíkjandi upptøku í ymsu tilboðini. Haraftrat er neyðugt, at greitt er, hvør tørvur er á sertilboðum í Tórshavnar kommunu. t.d. eftirlýsa skúlaleiðarar einum tilboði til børn í 0.-3. flokki og Undirvísingarstýrið hevur munnligan fyrispurning um pláss er til eitt tilboð til uml. 30 næmingar í einum á av fólkaskúlunum í kommununi.

Tá sertilboð er til børn í 0.- 3. flokki er talan bæði um skúla og frítíðarskúla, og tí er neyðugt at tilboðið er bæði í skúla og frítíðarskúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fólkaskúlalógin § 45 stk. 6

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki at viðmerkja

**Umhvørvisárin**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Frágreiðing frá fundi um sernámsfrøðiliga økið.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Ískoyti**
Ein virknaðareftirmeting er gjørd av Lopfjølini. Tað er Mentamálaráðið, sum hevur biðið um hesa eftirmeting. Endamálið við eftirmetingini var at fáa staðfest, í hvønn mun málini fyri skúlatilboðið eru rokkin, og um tað er grundarlag fyri menning av tílíkum tilboðum.

Niðurstøðan í kanningini er, at tað er tørvur á tílíkum tilboðið, og at virksemið á Lopfjølini hevur positiva ávirkan á næmingarnar. Teir flestu hava fingið eitt fólkaskúlaprógv, og útlitini eru góð fyri, at teir eftir lokna gongd á Lopfjølini halda fram móri víðari útbúgving og/ella arbeiði.

Samstarv og samskifti millum fólkaskúlan og Lopfjølina er vantandi.

Innanhýsis í Lopfjølini er gott samskifti og samstarv.

Tilmælini eru, at Lopfjølin heldur fram, at lýsingin av tilboðnum skal endurskoðast, at tímatalið verður hækkað, at tilboðið verður til næmingar úr 5. – 9. flokk., at tað ikki er treyt, at næmingurin er í barnaverndarvirkisøki, samstarvið millum upprunaskúla og Lopfjølina verður styrkt og at kunnað verður um Lopfjølina.
Eftirmetingin er hjáløgd

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Í heyst var verkstova um sernámsfrøðiliga økið. Frágreiðing frá verkstovuni er hjáløgd.

Í desember var fundur um støðuna og akutta tørvin. Á fundinum vóru umboð fyri Undirvísingarstýrið, Sernám og Tórshavnar kommunu. Umsitingin (barna- og ungdómsdeildin og mentamáladeildin) hava fund í januar, um m.a. tørvin á plássum og lýsing av heildartilboði, tvs. sertilboði, sum fatar um bæði skúla og frítíðarskúla.

Freistin fyri innskriving er 16. januar og stutt eftir, at freistin er farin ber til at siga, hvussu nógv børn, sum eru innskrivað, hava tørv á sertilboði. Væntandi eru tey eini fimm børn, sum hava akuttan tørv, og so eru nøkur aftrat.

**Komandi skúlaár**
Viðvíkjandi hølum til komandi skúlaár hevur umsitingin umrøtt hesar møguleikar:

a. fyribilshøli við Eysturskúlan, talan kann vera um fýra flokshøli, sum vanligir flokkar flyta út í, og so kann sertilboð vera inni í skúlanum.
b. fyribilshøli í garðinum í Eindini við Landavegin hjá Skúlanum á Fløtum (Ytra skúla), so kann 4-10 tilboðið víðkast til at umfata børn frá forskúla/fyrsta flokki til og við 10. flokki.
c. Lon 4 (ovara hæddin) á Frælsinum, sum kann vera til annan málbólk enn tann í 4-10 og samstarva við 4-10 tilboðið.
d. Lon 4 og lon 7, har eru 10 flokshøli, tvær skrivstovur, starvsfólkarúm, bókasavn, trý bólkarúm, goymslurúm, fimleikahøll og í niðaru hæddini í lon 7 eru høli til handaverk og list.
e. Lon 7 til sertilboð, men um lon 4 ikki er við, so skal lon 7 tillagast til tørvin.
f. Nám X flytur út á Frælsið, og sertilboð verður í hølunum hjá Nám X í Eysturskúlanum.

Stutt frágreiðing um nevndu møguleikar.

a.
Fyribilshølini talan kann vera um, eru tey, sum verða brúkt til Skúlan á Fløtum, byggingina. Um henda loysn verður vald, fara fýra flokkar í Eysturskúlanum at hava hesi høli til flokstovur, og so fær eitt sertilboð høli inni í skúlanum. Hetta sertilboð verður stovnað undir leiðsluni í Eysurskúlanum, og kann t.d. vera eitt tilboð fyri yngri næmingar, forskúla til við 3. flokki.

b.

Fyribilshølini talan kann vera um, eru tey sum verða brúkt til Skúlan á Fløtum, byggingina, ella tey, sum eru í garðinum hjá frk. Cohr. Verður hetta loysnin, verður 4- 10 tilboðið útbygt til at umfata forskúla til og við 10. flokki, og tilboðið verður framhaldandi undir leiðsluni í Skúlanum á Fløtum.

c.
Um lon 4 verður brúkt til sertilboð, ber ikki til at hava frítíðarvirksemi har, tó ber kanska til, at Havnar Dartfelag fær høli í kjallaranum, men tað krevur, at ventilatión verður gjørd har. Sum er verða hølini í kjallaranum í lon 4 bert brúkt til goymslu.

d.
Um talan verður um lon 4 og 7 á Frælsinum er neyðugt at gera ein sáttmála við landið, sum í minsta lagi er galdandi í fimm ár. Um bæði lon 4 og lon 7 verða tøk til sertiboð, verður 4-10 flutt úr eindini við Landavegin og nýggj størri eind, sum umfatar allar árgangirnar, verður skipað á á Frælsinum undir leiðslu av Skúlanum á Fløtum. Eindin kann so býtast sundur í tveir ella tríggjar aldursbóllkar, ella í tveir bólkar eftir, hvør tørvurin hjá næmingunum er.

Frítíðarskúlin í Kongagøtu hevur eina eind í leigaðum hølum á Frælsinum. Í hesi eind eru nøkur børn, sum ganga í Skúlanum á Trøðni. Um sertilboð verða í lon 4 og lon 7 á Frælsinum, hevði borið til at brúkt høli har til henda partin av frítíðarskúlanum, og so sagt leigumálið upp.

Um farið verður úr eindini hjá Skúlanum á Fløtum við Landavegin, verður bygningurin tøkur til onnur endamál, og tað kundi so verið til onkrar av frítíðarfelagsskapunum, sum hava verið frammi í sambandi við bygningin á Frælsinum. Haraftrat kann talan vera um Skansastovu til onkrar av hesum felagsskapum.

e.
Um talan bert verður um lon 7 er neyðugt at gera ymsar tillagingar, t.d. til starvsfólkahøli, og talan kann so antin verða um eitt tilboð aftrat ella til 4-10, sum so fær tikið eitt sindur fleiri næmingar.

f.
Um Nám X flytur út á Frælsið verður neyðugt at gera ein sáttmála við landið um lon 7 umframt onnur serhøli í bygninginum. Um Nám X flytur út ber til at skipa eitt stórt sertilboð í Eysturskúlanum, sum verður undir leiðsluni í skúlanum.

**Langtíðarloysnir**
Tær langtíðarlosynir, sum eru eyðsýndar eru:
- at Nám X flytur út á Argir, og so verða høli tøk í Eysturskúlanum.
- í sambandi við høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla, verður skúlin útbygdur, so pláss verður fyri einum sertilboði aftrat ella fyri einum størri tilboði fyri næmingar við autismu
- at byggja Eysturskúlan út, so pláss verður fyri einum sertilboði har.

**Fíggjarligar avleiðingar**
Viðvíkjandi fyribilshølum er avgerandi um til ber at nýta hølini, sum Tórshavnar kommunu longu eigur. Kostnaðurin aftrat verður so fyri flyting og fundament umframt tillaging av hølum.

Viðvíkjandi bygninginum á Frælsinum verður neyðugt at økja um viðlíkahaldsútreiðslurnar av lon 4 og saman við Landsverki økja útreiðslurnar til viðlíkahald fyri tann partin, sum er felagsogn, og haraftrat gera nýggjan sáttmála og avtalu við landið um møguliga leigu. Harumframt er ætlanin um gerðabýti við landið um bygningin í sambandi við kampusætlanina.

Aftrat hesum verða stovningarútreiðslur til fleiri serflokkar umframt rakstrarútreiðslur til hesar flokkar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til fundin 5. feb. 2020.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 21. januar 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umboð fyri Mentamáladeildina, Barna- og ungdómsdeildina og Húsaumsitingina hava verið á fundi við leiðsluna í Eysturskúlanum og hugt at umstøðunum har. Tosað varð um at flyta fyribilshølini, sum eru í garðinum hjá frk. Cohr niðan til Eysturskúlan, so til ber at skipa eitt sertilboð til børn í forskúla til og við 3. flokki í skúlanum. Í løtuni eru tríggir næmingar í fyrsta flokki í Eysturskúlanum í lonunum í Hoydølum meginpartin av skúladegnum.

Tørvur er á fleiri plássum í sertilboðum í Tórshavnar kommunu, og mett verður, at tað er umráðandi at skipa eitt skúla- og frítíðarskúlatilboð til tey yngstu børnini líknandi tilboðnum, sum er í Skúlanum á Fløtum til næmingar í 4. til og við 10. flokki. Tilboðið í Skúlanum á Fløtum er tó bert eitt skúlatilboð, einki skipað frítíðartilboð er til 4-10.

Á fundinum vísti leiðslan í Eysturskúlanum á møguleikan, at um fyribilshølini í garðinum hjá frk. Cohr verða flutt niðan til Eysturskúlan, so kunnu hølini verða til lærugreinina náttúru og tøkni, og eitt sertilboð kann so skipast í hølunum í A-lonini, sum verða brúkt til náttúru og tøkni í dag. Hølini eru beint við førleikastovuna og í sernámsfrøðiliga økinum hjá skúlanum.

Fyrimunirnir við at skipa eitt sertilboð inni í einum skúla eru, at tilboðið er tættari at skúlanum, at næmingarnir eru ein partur av skúlanum, næmingarnir hava størri møguleika at kenna seg sum ein part av felagsskapinum, starvsfólkini eru ikki í bygningi fyri seg, men partur av starvsfólkahópinum, og leiðslan er á staðnum.

Mett verður, at uml. fimm børn, sum eru innskrivað í fyrsta flokk skúlaárið 2020/21, hava tørv á serligum tilboði. Um eitt sertilboð til 1. – 3. flokk verður í Eysturskúlanum, verður tað til uml. 15 børn, ætlanin er tó ikki at byrja við so nógvum, men heldur taka børn inn so við og við, so tað um eini tvey ár er komið upp á fult næmingatal.

Tey fyrstu árini verður bert talan um børn í 1.- 3. flokki, ætlanin er so, at seinni kann sertilboðið víðkast til at fevna um forskúlabørn eisini.

Hugt var at økinum við Eysturskúlan, og mett var, at fyribilshølini kundu verið sett upp í skúlagarðinum við A-lonina móti Djóna í Geilgøtu. Kostnaðarmetingin at flyta hølini, gera fundament, seta tey upp aftur við Eysturskúlan og gera neyðugar installatiónir er 650.000 kr.

Kostnaðarmetingin at laga hølini inni í skúlanum slíkt sertilboð er er 60.000 kr., talan er í hesum sambandi um at seta ein vegg upp og seta hurð í, sum gongur út í garðin. Aftrat hesum er tørvur á innbúgvi, útgerð og tilfarið til bólkin, mettur kostnaður fyri tað er 165.000 kr.

Leigumálið um lonirnar í Hoydølum er galdandi til 31. desember 2020, tí kann tilboðið vera í Hoydølum hetta árið út. Men best er, um til ber at flyta í Eysturskúlan sum skjótast. Frítíðarskúlin í Kongagøtu brúkar fyribilshølini, og verða tey sostatt ikki tøk fyrrenn flutt er í nýggja bygningin úti á Fløtum í summar. Tað kann verða ein avbjóðing at fáa hølini flutt og tøk hjá Eysturskúlanum at taka í nýtslu til skúlaársbyrjan í august. Tað er óivað meir sannlíkt, at hølini kunnu vera liðug eftir heystfrítíðina í oktober.

Frítíðarskúlin hjá børnunum í sertilboðnum er Smílibýlið. Ætlanin er, at frítíðarskúlin Smílibýlið brúkar fyribilshølini seinnapart, tá skúlavirksemið eru liðugt, Tað eru næmingar í 4.- 6- árgangi, sum hava

náttúru og tøkni Um hølini verða innrættað til lærugreinina náttúru og tøkni, ber eisini væl til hjá frítíðarskúlanum at skipa virksemið har við denti á náttúruna.

Ætlanin er at gera leiðreglu um sertilboðið líknandi henni, sum eru galdandi fyri tilboðið, ið er í Eysturskúlanum hetta skúlaárið (í lonunum í Hoydølum). Samstarvspartarnir eru Eysturskúlin, Barna- og ungdómsdeildin, Mentamáladeildin, Undirvísingarstýrið/ Uttanríkis- og mentamálaráðið og Sernám.

Nýggi parturin av Argja skúla verður eisini tøkur, tá Skúlin á Fløtum flytur í nýggja skúlan. Har ber til at skipa sertilboð, og talan kundi so verið um, at 4-10 fer úr skúlabygninginum við Landavegin (Gula skúla) og út á Argir. Tilboðið hevði so verið víðkað til næmingar í grunddeildini og verið til uml. 60 næmingar, sum vóru býttir í tríggjar deildir, grund-, mið- og hádeild. Hetta kundi verið ein fyribilsloysn í eini 5 ár, og sertilboðið hevði hildið fram undir leiðsluni í Skúlanum á Fløtum.

Arbeitt eigur at verða fram ímóti, at sertilboð í mest møguligan mun verða inni í skúlum, tí verður mett skilabest at skipa sertilboð til yngru næmingarnar í Eysturskúlanum og undir leiðsluni har. Tað er eisini umráðandi, at sertilboðini ikki blíva ov stór, tí tað er avmarkað, hvussu nógvir næmingarnir kunnu vera í einum skúla, áðrenn tað fyllir ov nógv í vanliga gerandisdegnum í skúlanum.

Kostnaðarmetingin at skipa sertilboð til grunddeild í Eysturskúlanum er 815.000 kr. Sí hjálagda kostnaðarmeting.

Um samtykt verður at seta á stovn serrtilboð í Eysturskúlanum, verður málið lagt fyri aftur á næsta fundi í mentamálanevndini við tilmæli um fígging og leiðreglu/samstarvsskjali fyri skipanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at samtykkja at seta á stovn sertilboð til grunddeild í Eysturskúlanum og at farið verður undir endaligar fyrireikingar at skipa tilboðið.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Víst verður til hjáløgdu kostnaðarmeting. Umsitingin hevur mett um møguleikar fyri fígging og vil mæla til at verkætlanin verður fíggjað av fylgjandi kontum:

Konta 4140 Ætlanir á skúlaøkinum – 275 tkr. (tøkt at raðfesta)
Konta 4113 Velbastaðar skúli – 50 tkr. (minni tørvur)
Konta 4175 Dagføring av skúlum 158 tkr. (játtan áður ætlað til gerð av byggiskrá til framtíðar høvuðsumvæling v.m. av Hoyvíkar skúla. Er ikki aktuelt í 2020).
Konta 4124 Frískúlin í Havn 275 tkr. (minni tørvur)
Tilsamans 758 tkr.

Samstarvsskipan o.a.
Leiðreglur/samstarvsskjal millum avvarðandi partar og gjøllari lýsing av tilboðnum verður lagt fyri nevndina til komandi fund. Støðið verður tikið í leiðregluni frá í fjør-

Hoyring av skúlastýrinun í Eysturskúlanum
Av tí at talan er um ávísar broytingar í undirvísingarligum og praktiskum viðurskiftum í skúlanum eigur málið at vera sent til ummælis í skúlastýrinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at senda ætlanina til ummælis hjá skúlastýrinum í Eysturskúlanum
og

at tilboðið til 1.-3.flokk í Eysturskúlanum verður fíggjað við at flyta:
b). 50 tkr. av kontu 4113 til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
c). 50 tkr. av kontu 4113 Velbastaðar skúli til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
d). 158 tkr. av kontu 4175 Dagføring av skúlum til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
e). 275 tkr. av kontu 4124 Frískúlin í Havn til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. mai 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**
Ætlanin at skipa sertilboð er send skúlastýrinum í Eysturskúlanum til ummælis. Svarið frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum er hjálagt.

Skúlastýrið mælir frá, at fyribilshøli verða sett upp í skúlagarðinum í Eysturskúlanum, men staðfestir tó, at tað er tørvur á tílíkum tilboði í Tórshavnar kommunu, og at bæði leiðsla og starvsfólk í skúlanum rúma væl hesum tilboði.

Grundgevingarnar fyri frámælinum eru:
1.
a) at tað er ikki nøktandi at seta fyribilshøli upp í skúlagarðinum
b) at Tórshavnar kommuna ikki leggur í tilboðið, tá ið hølisviðurskiftini, sum kommunan bjóðar skúlanum afturfyri at rúma tilboðnum, eru tvey brúkt fyribilshøli
2.
a) at tað minkar munandi um tað lítla økið, børnini hava at spæla á
b) at tað misprýðir skúlan, at hølini arkitektoniskt ikki hóska til skúlabygningin, og tað sendir eitt signal um, at hetta ikki verður gjørt heilhjartað
c) at vandi er fyri, at hølini verða standandi
d) at økið við skúlan kann ikki samanberast við grøna umhvørvið í Hoydølum, sum er stórur partur av læringsætlanini hjá serflokkinum
e) at skal sertilboðið vera á sama matrikli sum Eysturskúlin, so mælir skúlastýrið til, at skúlin verður útbygdur við einari lon aftrat, og at umstøðurnar í útiøkinum verða betri.

Skúlastýrið mælir til at skipa verður soleiðis fyri, at sertilboðið kann verða verandi í Hoydølum, til ein útbygging er farin fram í Eysturskúlanum, sum nøktar tørvin hjá sertilboðnum. Viðmerkingarnar frá skúlastýrinum verða tiknar við í viðgerðini av staðsetingarmøguleikum og í sambandi við byggimálsviðgerðina í verður í næstum.

**Fígging**
Feilur er í upphæddunum og kontunum í tilmælinum, sum varð samtykt á fundinum í mentamálanevndini 13. mai, og verður uppskotið til fígging, tí lagt fyri nevndina aftur.

Mælt verður til at fíggja verkætlanina av hesum kontum:
4113 Velbastaðar skúli 75 tkr.
4124 Frískúlin í Havn 315 tkr.
4126 Forskúli til Lítlaskúla 20 tkr.
4140 Ætlanir á skúlaøkinum 275 tkr.
4141 Undirvísingarportalur 10 tkr.
4142 Aðrar útreiðslur skúlar 29 tkr.
4144 Skúlabarnaflutningur 30 tkr.
Tilsamans 754 tkr.

Ætlanin er at megna at fíggja ætlanina innanfyri henda fíggjarkarm, hóast talan er um lægri upphædd, enn kostnaðarmetingin er.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at sertilboðið í Eysturskúlanum verður fíggjað av hesum kontum:
a) 275 tkr. av 4140 Ætlanir á skúlaøkinum
b) 75 tkr. av 4113 Velbastaðar skúli
c) 315 tkr. av 4124 Frískúlin í Havn
d) 20 tkr. av Forskúli til Lítlaskúla
e) 10 tkr. av 4141 Undirvísingarportalur
f) 29 tkr. av 4142 Aðrar útreiðslur skúlar
g) 30 tkr. av 4144 Skúlabarnaflutningur
h) Mælt verður eisini til at játtaðu upphæddirnar verða fluttar á 4140 Ætlanir á skúlaøkinum

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti**:
Í sambandi við at ADHD felagið hevur sent opið bræv um at finna pláss til serflokkar, serliga í Skúlanum á Fløtum, hava umboð fyri mentamáladeildina havt fund við felagið, har greitt var frá, at málið er partur av størri evni um alt sernámsfrøðiliga økið, og at umsitingin í Tórshavnar kommunu hevur havt fundir og verkstovur við avvarðandi myndugleikar –serliga um verandi tilboð.

Á skúlaøkinum eru hesi tilboð:
- Hoyvíkar skúli hevur eitt tilboð til børn í autismu-spektrinum. 15 næmingar eru í tilboðnum
- Í Eysturskúlanum er tilboð til børn við ymsum avbjóðingum. Tilboðið er til børn í 1-3. árgangi og er í lonunum í Hoydølum, men flytur inn í Eysturskúlan seinni í ár. 6 næmingar eru í tilboðnum.
- Lopfjølin er eitt tilboð til næmingar, ið av ymsum orsøkum ikki megna vanliga skúlagongd og aftra seg við ella ikki koma í skúla. Tilboðið er í Margarinfabrikkini, og skúlaparturin er undir Skúlanum á Fløtum 11 næmingar eru í tilboðnum.
- 4-10 tilboðið hjá Skúlanum á Fløtum var upprunaliga til næmingar við ADHD, men er nú til næmingar við ymsum avbjóðingum. Tilboðið er í gula skúla við Landavegin, men fer út á Argir, tá Skúlin á Fløtum flytur í nýggja bygningin. 33 næmingar eru í tilboðnum.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
**Viðv. flyting av fyribils hølunum til Eysturskúlan**
Ætlanin er sett í fyribils bíðistøðu.

**Greiningar**
Forkvinnan í trivnaðarnevndini Súna Mørk setur fram ynski um at fáa greinað fylgjandi viðurskifti:

- At fáa lýst hvørji tilboð eru á sernámsfrøðiliga økinum sum eitt samlað yvirlit íroknað førleikastovur, sertilboð og serflokkar.
- Hvat fakliga verður mett, tørvur er at fáa afturat, hvat manglar?
- Hvat verður mett, er neyðugt at uppraðfesta?
- Hvat ítøkiliga "skríggjar" eftir hjálp?
- Tørvur er kanska eisini at vit "foreinkla" skipanina" ella fáa eitt meira greiðari yvirlit hvørji tilboð eru, hvar tey eru, hvar skal eg venda mær osfr
- Hvussu arbeiða vit okkum víðari fram við at fáa fleiri serstovur?
- Skuldi man uppraðfest stuðulstímar inni í flokkunum, til tað vanligu undirvísingina?
- Tilboðið við serflokki til børn 1 til 3 flokk, hvussu ber til at fáa sett tað á stovn? Eysturskúlin/Hoydalar sum er ein royndarverkætlan í dag
- Hvussu nógvir pengar eru avsettir til serøkið?

Meting hjá umsitingini
Talan er um viðurskifti og greiningar, ið tað ber til at fáa greinað her í vár at leggja aftur fyri nevnd.
Neyðugt verður við einum breiðum samskifti við skúlar og aðrar myndugleikar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til um umsitingin skal fara undir hesar greiningar.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at umsitingin fer undir hesar greiningar, at leggja aftur fyri nevndina.

**Ískoyti:**
Hóast mentamálanevndin hevur samtykt at seta á stovn sertilboð í Eysturskúlanum, so hevur tilboðið ikki fingið endaliga góðkenning frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

Umsitingin hevur verið á fundi við Uttanríkis- og mentamálaráðið um serøkið í Tórshavnar kommunu. Á fundinum varð kunnað um, at Undirvísingarstýrið og Sernám hava sent Uttanríkis- og mentamálaráðnum tilmæli at skipa sertilboð í Eysturskúlanum. Mælt verður til, at sertilboð ætlað næmingum í 1.-3. fl. verður skipað eftir kunngerð nr. 24 frá 2019 "Kunngerð um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð." Tilboðið í Eysturskúlanum er enn ein royndarskipan, og tí eru starvsfólkini ikki sett eftir skipanini við sjálvstýrandi toymum.

Tilmælið frá Undirvísingarstýrinum og Sernámi er treytað av, at Tórshavnar kommuna kann veita neyðug høli til endamálið. Skal skipanin halda fram og útbyggjast, er neyðugt við støðugum kørmum, sum eru tættari skúlanum

Samtykt er at flyta fyribilshølini í garðinum hjá frk. Cohr, niðan í skúlagarðin í Eysturskúlanum, men hølini eru ikki flutt, og tí heldur tilboðið heldur enn til í lonunum í Hoydølum.

Ætlanin er, at serhølini verða brúkt til lærugreinina náttúru og tøkni, og umframt Eysturskúlan fer Smílibýlið at brúka hølini. Skal sertilboðið flyta inn í Eysturskúlan komandi skúlaár, er neyðugt at fara undir at flyta fyribilshølini nú, so tey kunnu vera tikin í nýtslu í august, og hølini inni í skúlanum kunnu vera klár til sertilboðið til grunddeildina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at fyribilshølini í garðinum hjá Frk. Cohr verða flutt í Eysturskúlan so skjótt góðkenning er komin frá UMMR um at skipa sertilboð í Eysturskúlanum.

**Trivnaðarnevndin 06. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Við støði í spurningunum, sum forkvinnan í trivnaðarnevndini hevur sett um ymisk viðurskifti á sernámsfrøðiliga økinum, hevur umsitingin skrivað eitt upprit, sum verður lagt fram á fundinum. Víst verður til samtykt á fundi í trivnaðarnevndini tann 11. mars 2021.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða uppritið.

**Trivnaðarnevndin 10. juni 2021:** Uppritið umrøtt.

**Ískoyti**
Hjálagt er dagført upprit um sernámsfrøðiliga økið.

Fyrra útgávan av uppritinum hevur verið til hoyringar hjá skúlaleiðslunum og er viðgjørt á fundi við umboð fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, Undirvísingarstýrið, Sernám, Eysturskúlan og Skúlan á Fløtum. Uppritið er dagført við støði í tí fundinum og í hoyringarsvari.

Við støði í uppritinum er ætlanin at raðfesta og fara í gongd við at gera kostnaðarmeting viðvíkjandi umbygging og tillaging av hølum til serflokkar og sernámsfrøðiliga økið sum heild.

Málið um dagføring av skúlabygnaðinum (mál 21/02652) verður lagt fyri trivnaðarnevndina á næsta fundi, og avgerðir í tí málinum hava ávirkan á, hvussu høliskapasiteturin í ymsu skúlunum verður gagnnýttur og sostatt eisini, hvørji høli møguliga eru tøk til sernámsfrøðiliga økið.

Skúlin á Argjahamri (mál 21/03568) hevur ætlanir um at søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn serflokk í skúlanum. Hesin serflokkur er ætlaður næmingum í grund- og miðdeild. Á s. 6 í uppritinum stendur, at tørvur er á einum tilboði aftrat til næmingar við autismu ella líknandi avbjóðingum, og at hetta tilboð kundi verið í Skúlanum á Argjahamri, men neyðugt er at finna hølisloysn til tað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at umsitingin saman við avvarðandi pørtum raðfestir og fær til vega kostnaðarmeting av nøkrum uppskotum í uppritinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Trivnaðarnevndin 07. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Skúlin á Argjahamri hevur ætlanir um at søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn serflokk í skúlanum (mál 21/03568). Í hesum sambandi samtykti trivnaðarnevndin 7. oktober í 2021, at umsitingin saman við skúlanum kannar, um tað ber til at finna aðrar góðar hølisloysnir til serflokk í Skúlanum á Argjahamri.

Umboð fyri byggningsdeildina og mentamáladeildina hava verið ástaðarfundi saman við skúlaleiðsluni og hugt at hølismøguleikum til serflokk í Skúlanum á Argjahamri.

Á fundinum vórðu hesir møguleikar umrøddir:

a) tannlæknahølini, men so má tannlæknin flyta. Ein møguleiki er at flyta tannlæknahølini í niðasta partin av Látrinum, innanfyri stólparnar har garaguhurðin er. Men tað gevur lítla meining at taka dýr høli niður í bygninginum, og síðani byggja tey aftur av nýggjum í sama bygningi.

b) innrættað part av Látrinum til serflokk. Skúlastjórin metir ikki, at tað er ein hóskandi loysn. Har er ov ófriðarligt. Atgongd verður ikki beinleiðis inn í skúlan, tað verður antin soleiðis, at tú fer út, og so inn gjøgnum høvuðsdyrnar inn í skúlan aftur ella gjøgnum Látrið, sum er innandura spæliøki.

c) í frítíðarskúlanum, tí partinum, sum er útbygdur, skúlin metir ikki, at tað er ein loysn, tí tað eru høli hjá frítíðarskúlanum.

d) byggja lon aftrat niðaneftir, har sum frítíðarskúlin er. Seta fyribilshøli upp, meðan bygt verður

e) seta fyribilshøli upp niðanfyri høllina, men spurningurin er, um tað er hóskandi økið til serflokk, tað er nakað árent. Hølini kundu verið til tveir flokkar í skúlanum, men so verður deildarbýtið brotið, og tað er ikki so heppið. Skúlin er bygdur soleiðis, at grund-, mið- og hádeild hava heimastovur, sum eru í hvør síni eind.

Tilmæli:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðanin mæla nevndini til at umrøða málið og taka støðu til, hvørjum møguleika arbeiðast skal víðari við at greina gjøllari.

**Trivnaðarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við at greina møguleika b.

**Ískoyti:**
Umsitingin er í holt við at kanna loysnir á ymisu skúlunum viðv. evt. neyðugum hølisloysnum til serøkið, og er hesaferð komin til eina ávegis niðurstøðu fyri Skúlan á Argjahamri. Uppskot til loysnir á øðrum skúlum kemur stigvíst gjøgnum árið.

Ein loysn er møgulig har innrættaði vera serstøk hølir til endamálið inni í hølinum, ið verður nevnt Látrið. Hóast tað vera tiknir fermetrar frá Látrinum, ið virkar sum eina innanhýsis skúlagarður og virknishøll, so vil funktiónin vera at kalla ótarnað. Sí hjáløgdu tekning. Skúlastjórin tekur undir við loysnini.

Umsitingin vil á fundinum greiða frá mettum kostnaði. Um ætlanin skal fremjast verður hon at raðfesta t.d. í sambandi við fíggjarætlanartilgongdina fyri 2023.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmæli til komandi fund.

**Trivnaðarnevndin 10. februar 2022:** Ein meiriluti, Súna Mørk, Bjørg Dam og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Gunvør Balle og Jákup Dam, ynskja at fáa lýst avleiðingarnar av at taka burturav innandura spæliøkinum, Látrinum.

**Ískoyti**
Eftir ætlan skal 1-3 sertilboðið í Eysturskúlanum flyta omann í skúlan. Hølini í Eysturskúlanum vera væntandi liðug til summarferiuna.

Málið við tilboðnum er at geva børnunum eitt hóskandi tilboð so tíðliga sum møguligt við tí endamáli, at tey fara í vanligan flokk í seinasta lagi, tá tey skulu í 4. flokk. Um hetta í onkrum førum ikki ber til, eiga tey tá at verða visiterað til 4-10.

Størstu avbjóðingarnar, sum tilboðið arbeiðir við, eru kenslulig órógv og tilknýtisórógv, har tað at vera í einum stórum flokki, byggir upp eina strongd, sum næmingarnir hava torført at stýra.

Skúlaárið 2021/22 eru 10 børn í tilboðunum, og tvey av teimum verða visiterað úr tilboðnum hetta skúlaárið.

Nøkur børn eru visiterað inn í tilboðið úr øðrum skúlum. Hetta eru børn, sum hava gingið í vanligan flokk, men ikki megna tað og heldur ikki megna at vera í einum sertilboði, sum er staðsett inni í einum skúla. Talan er um børn, sum hava tørv á tilboði líknandi 4-10 tilboðnum.

Mikudagin 23. mars var fundur um sertilboð í Tórshavnar kommunu. Á fundinum vóru umboð fyri skúlar og frítíðarskúlar í kommununi, sum hava sertilboð, umboð fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, Sernám, Barna- og ungdómsdeildina og Mentamáladeildina. Tosað varð um 1-3 tilboðið, og at tørvur er á tilboði aftrat til tey børnini, sum ikki megna at fara í vanligan flokk.

Ein møguleiki er, at 1-3 tilboðið verður í tveimum eindum, og at onnur eindin fyribils verður í lonunum í Hoydølum. Børnini í hesi eindini eru tey, sum ikki megna at fara inn í vanligan flokk. Bæði Sernám og skúlin vísa á, at í Hoydalar er eitt sera gott umhvørvið til henda málbólkin, har børnini bæði trívast og mennast.

Lonirnar í Hoydølum eru ein fyribilsloysn, so neyðugt verður at finna eina varandi hølisloysn til tann bólkin í 1-3, ið neyvan fer at megna ein vanligan flokk, og tí verða visiterað inn í 4-10, tá tey fara úr 1-3.

Dagstovnavirksemið, sum er í lonunum, skal útbyggjast, so øll niðara hæddin verður dagstovnur burturav, og tí verður bert ovara hæddin tøk til sertilboðið, og tað er ikki vist, at tað er nøktandi til sertilboðið.

Hin eindin verður so inni í serstovuni í Eysturskúlanum. Hetta eru tey børnini, sum so líðandi kunnu fara inn í vanligan flokk, og har málið er, at tey í seinasta lagi, tá tey skulu í 4. flokk fara ella eru farin í vanligan flokk burturav.

Í eindini í Eysturskúlanum er pláss fyri 15 børnum, meðan í eindini í Hoydølum í ovaru hæddini í syðra enda á bygninginum kunnu í mesta lagi vera 6 børn.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeilini mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at partur av 1-3 sertilboðnum heldur fram í lonunum í Hoydølum.

**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælin

**Ískoyti**
Í skrivi, dagf. 27. mai 2021, góðkendi landsstýrismaðurin sertilboðið í Eysturskúlanum. Ein treyt fyri góðkenningini er, at Tórshavnar Kommuna kann veita neyðugu hølini til sertilboðið *inni* í Eysturskúlanum.

Fyribilshølini eru sett upp í skúlagarðinum í Eysturskúlanum, fyirbilshølini verða brúkt til náttúru og tøkni, og so er eitt høli aftrat. Eysturskúlin og Frítíðarskúlin Smílibýlið fara at brúka hølini. Hølini til náttúru og tøkni inni skúlanum, kunnu nú innrættast til sertilboðið.

Upprunaliga varð mett, at bert ein skilaveggur skuldi setast upp í hølinum til náttúru og tøkni, soleiðis at tvey høli blivu til sertilboðið, men tað er als ikki nøktandi. Tørvur er á tveimum lítlum stovum, einum bólkarúmi og felagsøki við lítlum tekøki. (Tekning er hjáløgd).

Kostnaðarmetingin fyri innrætting av hølinum (náttúru og tøkni hølinum) í A-lonini til sertilboðið er 641.400,-kr. (Kostnaðarmetingin er hjáløgd). Játtan er ikki sett av til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at fáa gjørt hølini til sertilboðið, men vísir á, at játtan er ikki tøk til endamálið.

**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og játta kr. 641.000,00 av konto 20910 og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 141/22 Umsókn um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla skúlaárið 2022-23

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 29.11.2021 | 95/21 | 21/04845-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 288/21 | 21/04845-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 324/21 | 21/04845-2 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 316/21 | 21/04845-2 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 38/22 | 21/04845-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 128/22 | 21/04845-2 |
| 7 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 118/22 | 21/04845-2 |
| 8 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 141/22 | 21/04845-2 |

**Upprunin til málið**
Fyrstilærarin í Kaldbaks skúla og dagstovnaleiðarin á Flatnagarði hava sent Tórshavnar kommunu umsókn um fígging til forskúlalíknandi tilboð í Kaldbak. Umsóknin er send í telduposti 18. november 2021.

**Lýsing av málinum**
Skúlaárið 2022/23 ynskja skúli og dagstovnur at skipa eitt forskúlalíknandi tilboð við støði í royndunum hjá Nólsoyar skúla og Látrinum við líknandi tilboði.

Í umsóknini sendur m.a.:"Sum er, hevur verið vanligt, at elsti bólkur í barnagarðinum vitjar í skúlanum nakrar ferðir. Vanligt hevur tá verið, at hesi børn vitja inn í ein tíma hjá 1.,2.- og 3. flokki. Hetta er stak hugnaligt og virðismikið, men fer av undirvísingartíðini hjá næmingunum í hesum flokkum."

Søkt verður um 12,5 tímar um vikuna til skúlan. Nólsoyar skúli hevur játtan til 10 tímar. Lønarútreiðslurnar í 5 mánaðir frá august og árið út eru uml. 105 tkr fyri 12,5 tímar um vikuna og uml. 84 tkr fyri 10 tímar um vikuna.

Skúli og dagstovnur meta, at tílíkt tilboð er til gagns bæði fyri skúla, dagstovn, børn, námsfrøðingar og lærarar.
Í stuttum er ætlanin í høvuðsheitum at hava eina forvitnisliga og spælandi tilgongd til tøl og mongdir eins og bókstavir og ljóð – umframt hetta er ætlanin, at tilboðið fylgir ársætlan skúlans, og har tað er natúrligt eisini er partur av til dømis evnisvikum og útferðum, sum skúlin skipar fyri.

Støða er ikki enn tikin til um forskúlalíknandi tilboðið skal byrja um morgunin. Um so er, verður skúlin opin frá 7:30, og børnini fara aftur í barnagarð, tá tey eru liðug í skúlanum, ella um næmingarnir skulu byrja seinni um dagin og so enda við at vera í frítíðarskúla saman við 1.-3. flokki. Um børnini møta í skúlanum um morgunin, so er neyðugt, at skúlin er opin kl. 7:30, og starvsfólk má vera á staðnum tá, tað verður so ein hálvur tími eyka hvønn dag, tí er søkt um 12,5 tímar. Um børnini møta seinni um dagin, soleiðis at tey fylgjast við børnunum í 1. og 2. fl., tá tey fara í frítíðarskúla, so er ikki neyðugt við einum hálvum tíma eyka um dagin, og í tí føri verður talan um 10 tímar.

Sambært § 6 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla, kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013, kann forskúlaflokkur verða stovnaður, tá 12 børn eru í flokkinum, tó kann undantak gerast í smærru skúlunum.

Sambært fólkaskúlalógini § 4 stk. 4 kann verða loyvt at seta 1 árs forskúlaflokk/ar á stovn eftir gjøllari reglum, sum landsstýrismaðurin setur. Í § 30 stk. 3 stendur, at undirvísingin í ávikavist forskúlaflokki, 1. og 2. skúlaári ella 1., 2. og 3. skúlaári kann lutvís verða samskipað. Á hesum somu flokssstigum kann øll undirvísingin í teimum smáu skúlunum verða samskipað.

Útreiðslurnar til forskúlalíknandi tilboðið í Nólsoy eru læraraløn og rakstrarjáttan pr. næm. Foreldrini rinda foreldragjald, men tað er til dagstovnin, og skúlin hevur ikki inntøkur av foreldragjaldi.

Um forskúlalíknandi tilboð verður í Kaldbaks skúla frá august 2022, verða útreiðslurnar í 2022 uml. 105 tkr til løn umframt uml. 4 tkr fyri hvørt barn. Játtan er ikki sett av í fíggjarætlanini fyri 2022 til endamálið. Endaligt uppskot til fígging verður lagt fyri nevnd í vár.

Tað eru 6 børn í Kaldbak, sum hava aldur at fara í forskúla skúlaárið 2022/23. Núverandi árgangir í skúlanum í Kaldbak eru millum og 5 næmingar.

Samstarvsavtalan millum Látrið og Nólsoyar skúla er hjáløgd, og um forskúlalíknandi tilboð verður stovnað í Kaldbak verður støði tikið í royndunum við forskúlalíknandi tilboði i Nólsoy, og tilboðið skipað eftir sama leisti.

Í umsókníni stendur, at skúlastýrið og foreldraráðið taka undir við skrivinum um forskúlalíknandi tilboð í kaldbaks skúla.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

Kunngerð nr. 108 frá 8. august 2013 um skipan og læring í forskúla

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmekja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**
Samstarvsavtala um forskúlalíknandi tilboð í Nólsoy er hjáløgd

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla trivnaðarnevndini til:
a) at játta umsóknini og søkja Uttanríkis- og mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla frá skúlaárinum 2022/23
b) at málið verður lagt fyri aftur í vár við tilmæli um fígging.

**Trivnaðarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini 29. november 2021.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fyrstilærarin í Kaldbaks skúla hevur vent sær til forkvinnuna í trivnaðarnevndini við uppskoti um at skipa forskúla heldur enn forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla. Sambært § 6 í kunngerðini um skipan og læring í forskúla kann forskúlaflokkur verða skipaður, tá ið 12 børn eru í flokkinum, og eiga í mesta lagi at vera 24 børn við skúlaársbyrjan, tó kann undantak gerast í smærru skúlunum. Sostatt ber til at søkja landsstýrismannin um loyvi seta á stovn forskúla í Kaldbak, hóast næmingatalið er niðanfyri 12.

Skipanin í Runavíkar kommunu er tann, at har er forskúli til tey seks ára gomlu og ikki barnagarður. Børnini eru í forskúla 4 tímar um dagin og fara síðani í frítíðarskúla. Starvsfólkanormeringin í Runavíkar kommunu er ein lærari og ein námsfrøðingur til hvønn forskúlaflokk. Í Tórshavnar kommunu er normeringin eitt starvsfólk til 9 børn, starvsfólkini eru lærarar og námsfrøðingar.

Fyrstilærarin vísir á, at heilt forskúlatilboð er bara ein vinningur fyri tey í Kaldbak, barnagarðinum tørvar pláss, og skúlin vil fegin hava tey seks ára gomlu børnini í skúlanum í forskúla. Haraftrat er lættari at fáa skikkað starvsfólk til fleiri tímar.

**Fígging forskúlalíknandi tilboð**
Víst verður til mál 20/00759 um samsýning fyri leiðslu í forskúlalíknandi tilboðum. Í útreiðslunum niðanfyri er roknað við lønarbrotið 0,067 til samsýning fyri leiðslu.

Útreiðslurnar til forskúlalíknandi við 12,5 tímum um vikuna við 6 næmingum teir 5 mánaðirnar frá august til desember í 2022 eru 131.000.- kr.

Útreiðslurnar til forskúlalíknandi við 12,5 tímum um vikuna og 6 næmingum í eitt ár eru 314.000,- kr.

**Fígging forskúli**
Um talan verður um forskúla, so kemur foreldragjald aftrat, og tað er í løtuni 9.290,- kr. um árið.

Útreiðslurnar til forskúlaflokk við 20 tímum um vikuna eftir sama leisti sum í Runavíkar kommunu við einum námsfrøðingi og einum lærara til hvønn flokk og við 6 næmingum teir 5 mánaðirnar frá august til desember í 2022 eru 323.000,- kr.

Útreiðslurnar til forskúlaflokk við 20 tímum um vikuna við einum námsfrøðingi og einum lærara til hvønn flokk eru 775.000,- kr.

**Forskúli ella forskúlalíknandi tilboð**
Tórshavnar kommuna hevur í skrivi til Uttanríkis og mentamálaráðið dagfest 9. des. 2021 søkt um loyvi at seta á stovn forskúlalíknandi tilboð í Kaldbaks skúla, og Mentamálaráðið hevur tann 21 desember 2021 góðkent, at forskúlalíknandi tilboð verður skipað í Kaldbaks skúla frá 1. august 2022.

Skal forskúli verða í Kaldbaks skúla er neyðugt at senda landsstýrismanninum í Uttanríkis og mentamálaráðnum umsókn um loyvi at skipa forskúla í Kaldbak.

Fyrimunur at hava forskúla heldur enn forskúlalíknandi tilboð, er, at børnini fáa ein meira samanhangandi dag og eitt tilboð, har báðir fakbólkarnir eru til staðar í flokkinum samstundis og betur fáa útfylt karmarnar í tilboðnum.

Vansi kann vera, at dagstovnurin missir ein árgang, og tey 6 ára gomlu børnini fara at mangla í tí tilboðnum.

Víst verður eisini til býráðssamtykt 24. februar 2022 um at skipa forskúla sum tilboð í øllum kommunalum skúlum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta umsóknini um forskúla og søkja Uttanríkis- og Mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn forskúla frá skúlaárinum 2022/23. Málið at beina í fíggjarnevnd og býráð.

Treytað av góðkenning frá Uttanríkis- og Mentamálaráðnum verður eisini mælt nevndini til útvega neyðuga játtan til rakstur av forskúlavirkseminum í Kaldbaks skúla. Fyri tíðarskeiðið august-desember 2022 er talan um kr. 323.000, sum tøk játtan ikki er til. Virksemið í 2023 verður at játta í fíggjarætlanini 2023.

**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á fíggjarnevndina um at ávísa fígging og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og játta kr. 323.000,00 av konto 1110 Býráðið framflytnig frá 2021 og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 142/22 Stórhøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2021 | 238/21 | 21/03920-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 222/21 | 21/03920-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 21/03920-1 |
| 4 Mentamálanevndin | | | 21/03920-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 154/22 | 21/03920-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 188/22 | 21/03920-1 |
| 7 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 142/22 | 21/03920-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna saman við handils- og vinnulívi vilja taka stig til at byggja altjóða stórhøll.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Endamál við stórhøllini er at skapa bestu karmar til stór føroysk og altjóða tiltøk innan ítrótt, mentan, ráðstevnur, keypsstevnur, samkomumøtir v.m., umframt at vera karmur sum ítróttahøll til flestu innandura ítróttagreinir.

Kommunan hevur havt ætlan um stórhøll í høvuðsstaðnum í fleiri ár, og kommunan hevur áður sett sett fígging á íløgujáttanina til fyrireikingar.

Í eina tíð hevur samskifti verið við partar úr handils- og vinnulívinum við tí endamáli saman at fáa bygt eina stórhøll, sum mett verður Føroyar hava stóran tørv á. Í uppskoti er at byggja stórhøll við eini brutto gólvvídd uppá 8.350 m2 og planerað lendi uppá 23.000 m2, harímillum 650 parkeringspláss. Kostnaðarmeting er kr. 217,8 mió u/mvg.

Stórhøllin er ætlað eisini at verða partur av føroysku tilbúgvingini við egnari streym- og hitaveiting; høllin kann herberga stórari mannfjøld, skuldi kreppustøða gjørt tað neyðugt.

Sjálv stórhøllin kann skipast alt eftir tiltøkunum. Til ein hondbóltsdyst kunnu vera eini 2.700 áskoðarar, og til eina konsert, har áskoðararnir standa, kunnu vera 4.600. Sita áskoðararnir, er pláss fyri uml. 3.600. Aftrat høllini eru umklæðingarrúm, fundarhøli, veitingarrúm, goymsla v.m.

Mett verður, at byggitíðin er 20 mðr.

Sambært ætlanini skal sjálvsognarfelag standa fyri byggingini og eiga stórhøllina, og rakstrarfelag skal standa fyri dagliga rakstrinum av høllini. Hesi feløg eru ikki stovnað enn.

Í uppskoti er, at Tórshavnar kommuna ber 50% av samlaða byggikostnaðinum, meðan restfíggingin skal koma frá stuðli frá fyritøkum og úr ymsum grunnum heima og uttanlands. Við støði í kostnaðarmetingini er kommununnar lutur at fíggja kr. 108,9 mió u/mvg.

Kommuna kann sambært kommunustýrislógini grein 50 einans taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at virksemið tænir einum almannagagnligum endamáli og ikki hevur vinning fyri eyga. Eisini er ásett, at kommuna kann seta almenn tiltøk í verk, um so er, at hetta er til frama fyri vinnulívið á staðnum, men stuðul til einstaklingar ella einstakt virki má ikki latast uttan so, at serligar orsøkir eru.

Stórhøllin sum karmur hevur í sær mangar møguleikar bæði av almannagagnligum og vinnuligum slag, sum ikki eru til í Føroyum frammanundan, men sum stórur tørvur er á serliga innan ávísar ítróttagreinir og events.

Tórshavnar kommununa hevur harumframt sum mál at gera Tórshavn til altjóða ráðstevnubý, sum handils- og vinnulívið og stovnar annars fyriskipa, og sum er við til at stuðla undir menningina av ferðavinnuni og tænastuvinnuni í kommununi.

Leikluturin hjá kommununi at fíggja part av byggingini, so at stórhøll í høvuðsstaðarøkinum kann realiserast, er fyrst og fremst tann at fáa til vega serstakar karmar til almannagagnlig endamál innan ítrótt, mentan og almennar upplivingar annars, umframt at handils- og vinnulívið eins væl og tað almenna kann fáa atgongd til nútímans høli og hentleikar, sum kunnu draga til býin og landið stór tiltøk. Ein stórhøll skapar nýggjar forteytir fyri samfelagsmenningini eisini í kappingini við okkara grannalond.

Til tess at seta sjøtul á verkætlanini er neyðugt, at kommunan gevur tilsøgn um hennara part av fíggingini soleiðis, at fyrireikingararbeiðið kann gerast meira ítøkiligt, harundir eisini at fáa til vega alla fíggingina, og at skipa formligu viðurskiftini viðvíkjandi bygging, lendisútvegan, ognarviðurskifti v.m.

Kommunan eigur at seta sum treyt fyri tilsøgn um fígging, at játtanin verður ikki goldin uttan so, at kommunan eins væl og sjálvsognarfelagið undir stovnan hava fingið øll myndugleikaloyvi til vega, og at játtan er sett av á fíggjarætlanini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla býráðnum til at taka støðu til, um kommunan skal veita sjálvsognarfelagnum undir stovnan tilsøgn uppá 50% ella í mesta lagi kr. 108,9 mió í fígging til byggingina av stórhøllini treytað av, at øll loyvi fyriliggja, og um játtað, at seta neyðugu fíggingina til vega í fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin 28. september 2021:** Annika Olsen og Elsa Berg seta fram soljóðandi broytingaruppskot: Tórshavnar kommuna fer undir arbeiðið at byggja eina stórhøll í samráð við ítróttarfeløg í kommununi og privatum aktørum. Kommunan stuðlar byggingini við at lata lendi og gera lendisarbeiðið. Fíggingin til hallarbyggingina skal fáast til vega frá privatum aktørum. Setast skal sum treyt, at kommunan yvirtekur ognarrættin og raksturin av høllini, tá høllin er liðug.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Anniku Olsen og Elsu Berg, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen og Elsa Berg.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá kommunustjóranum og trivnaðarstjóranum, og samtykti ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðson og Annfinn Brekkstein, at kommunan veitir sjálvsognarfelagnum undir stovnan tilsøgn uppá 50% av samlaða kostnaðinum ella í mesta lagi kr. 108,9 mió í fígging til byggingina av stórhøllini treytað av, at øll loyvi fyriliggja og at sjálvsognarfelagið sjálvt útvegar restina av fíggingini. Fíggingin verður at seta á fíggjarætlanina, tá ið verkætlanin fer í gongd.

Annika Olsen og Elsa Berg atkvøddu blankt.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og mentamálanevndina, ið fall við fimm atkvøðum fyri, sjey ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen:

Tórshavnar kommuna fer undir arbeiðið at byggja eina stórhøll í samráð við ítróttarfeløg í kommununi og privatum aktørum. Kommunan stuðlar byggingini við at lata lendi og gera lendisarbeiðið. Fíggingin til hallarbyggingina skal fáast til vega frá privatum aktørum. Setast skal sum treyt, at kommunan yvirtekur ognarrættin og raksturin av høllini, tá høllin er liðug. Og at heita á landið um at vera við í fíggingini.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, fýra blonkum og ongari ímóti.

Fyri atkvødddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jón Kragesteen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sambært skrivi frá Føroya Arena er fíggingin uppá kr. 218,9 mió eru fingnar til vega, sum er kr. 1, 1 mió meira enn upprunaliga kostnaðarmetingin at byggja stórhøllina.

Seinastu mánaðirnar eru prísirnir á tilfari, veitingum og flutningi hækkaðir, serliga vegna kríggið í Ukraina. Vísandi til óvissuna, ið valdar á marknaðinum, er ikki møguligt at gera avtalur um tilfar og veitingar við undirveitarar og harvið fastlæsa byggiprísin, fyrr enn endalig avgerð er tikin um, at farið verður undir at byggja stórhøllina.

Gjørd er tí nýggj kostnaðarmeting, ið ljóðar uppá kr. 242 mió sum fastur prísur, tvs. íroknað lønar- og prísvøkstur. Ætlanin er, at kommunan fíggjar hetta soleiðis, at samlaði karmurin er kr. 132 mió.

Sambært fíggjar- og gjaldførisætlanini er ætlaða játtanin hjá kommununi kr. 132 mió býtt yvir 3 ár. Í mun til gjaldførið í byggingini kann vera, at gjald skal framskundast alt eftir, nær hinir stuðlarnir gjalda sín part.

**Trygd**
Sum stovnari veitir Tórshavnar kommuna sjálvsognarstovninum Føroya Arena trygd fyri, at parkeringsøkið verður liðugtgjørt, og at nøktandi tal av parkeringsplássum – herundir felags parkeringsplássum – eru tøk til hentleikarnar í økinum. Trygdin fevnir um skjalprógvaðan prís- og lønarvøkstur í mesta lagi kr. 26 mió sbrt. kostnaðarmeting, j.nr. 21/03920-14.

**Lendið**
Sjálvsognarstovnurin eigur og rekur høllina. Kommunan letur sjálvsognarstovninum lendið undir høllini sum stovnandi fæ og brúksrætt til øki til parkering, sum verður lagt í sjálvstøðugan matrikul.

**Viðtøkur**
Tórshavnar kommuna skal sambært uppskotinum til viðtøkur stovna Føroya Arena, ið er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at byggja og reka eina stórhøll, ið kann rúma stórum ítróttartiltøkum, messum, mentanartiltøkum av ymsum slag og vera partur av føroysku krepputilbúgvingini, j.nr. 21/03920-17.

Sjálvsognarstovnurin fær heimstað í Tórshavnar kommunu, men stovnarin ella tey, ið hava skotið pening í verkætlanina, hava eingi rættindi í mun til ognirnar hjá stovninum. Sjálvsognarstovnurin er sjálvstøðug løgfrøðilig eind, leysur og óheftur av stovnaranum.

Ein nevnd við fimm limum skal veljast at stýra grunninum. Tórshavnar kommuna velur tveir nevndarlimir, Vinnuhúsið ein, ÍSF ein og Visit Faroe Islands P/f velur ein lim. Limirnir verða valdir fyri tvey ár í senn. Varalimur verður valdur fyri hvønn lim sær.

Til at standa fyri sjálvari byggingini av høllini, velur nevndin eina bygginevnd, ið skal sita, til høllin er liðug og avhendað sjálvsognarstovninum.

**Nevndin**
Heitt er á Vinnuhúsið, ÍSF og Visit Faroe Islands P/f um velja lim í nevndina. Umboð fyri Vinnuhúsið er xx, og sum varalimur xx. Umboð fyri ÍSF er Elin Heðinsdóttir Joensen, ÍSF-forseti og sum varalimur John Kjær. Umboð fyri Visit Faroe Islands P/f er Guðrið Højgaard, stjóri, og sum varalimur Annleyg Lamhauge.

Tórshavnar býráð velur tveir limir í nevndina eftir lutfalsvalháttinum.

**Altjóða krøv til høllina**
Samskift er við Hondbóltsamband Føroya og Flogbóltssamband Føroya um krøv til høllina í sambandi við altjóða dystir, j. nr. 21/03920-10.

Hondbóltssamband Føroya upplýsir við støði í ráðgeving frá norska hondbóltssambandinum, at høll sum henda er góðkend til altjóða dystir. Flogbóltsamband Føroya upplýsir, at høllin verður góðkend til altjóða dystir upp til kategori 3.

Høllin uppfyllir eisini krøvini til sjónvarping.

**Staðseting**
Staðseting av stórhøllini hevur verið viðgjørd sum liður í samlaðu skipanini av Stórutjørn. Tað er mest skynsamt at staðseta ítróttarøkið norðalaga í økinum, soleiðis at ítróttaøkið verður skipað sum eitt samlað økið, sum umframt at hýsa stórhøllini somuleiðis við tíðini kemur at fevna um aðrar ítróttahentleikar, sí skjal 21/03920-15.

Umsitingin hevur saman við Articon og ráðgevunum av heildarætlanini fyri Stórutjørn samstarvað um hetta. Víst verður til viðheftu skitsu, sum sýnir, hvussu stórhøllin verður staðsett í lendið útfrá lendisviðurskiftunum. Harumframt sæst á skitsuni, hvussu aðrir ítróttahentleikar í framtíðini kunnu koma at viðvirka til, at økið verður ein heild, og at hentleikarnir kunnu skapa samvirkanarárin.

**Tilmæli:** Skal stórhøllin byggjast eftir leistinum, ið er lýstur omanfyri, krevst, at Tórshavnar kommuna tekur stig til at stovna sjálvsognarstovnin Føroya Arena. Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla í hesum sambandi til at, Tórshavnar kommuna:

- Stovnar Føroya Arena sum sjálvsognarstovn

- Samtykkir viðtøkurnar fyri Føroya Arena

- Veitir stuðul áljóðandi kr. 132.000.000,00 til bygging av stórhøllini. Peningurin verður játtaður soleiðis, at kr. 11.000.000,00 verða játtaðar í ár av LK 57038, og restin verður játtað á fíggjarætlanini fyri 2023 og 2024.

- Velur hesi umboð í nevndina fyri Føroya Arena:

Fyri Vinnuhúsið: xx, og sum varalimur xx.
Fyri ÍSF: Elin Heðinsdóttir Joensen, ÍSF-forseti, og sum varalimur John Kjær.
Fyri Visit Faroe Islands P/f: Guðrið Højgaard, stjóri, og sum varalimur Annleyg Lamhauge.
Harumframt tvey umboð og tveir varalimir vegna Tórshavnar kommunu.

- Sum stovnari veitir Føroya Arena trygd fyri, at parkeringsøkið verður liðugtgjørt, og at nøktandi tal av parkeringsplássum – herundir felags parkeringsplássum – eru tøk til hentleikarnar í økinum. Trygdin fevnir um skjalprógvaðan prís- og lønarvøkstur í mesta lagi kr. 26 mió sbrt. kostnaðarmeting, j.nr. 21/03920-14.

- Loyvir Føroya Arena at staðseta stórhøllina sambært kortskjali, j. nr. 21/03920, og veitir lendið undir høllini sum stovnandi fæ umframt trygd fyri brúksavtalu um parkeringsøkið til høllina.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við at stovna Føroya Arena eftir omanfyrinevnda leisti og tekur undir við tilmælinum frá kommunustjóranum og trivnaðarstjóranum.

Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnvndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímói og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

Býráðið valdi síðani hesar limir í nevndina fyri Føroya Arena:

Vegna meirilutan í býráðnum, Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin: Heðin Mortensen, borgarstjóra, sum nevndarlim og Annfinn Brekkstein, varaborgarstjóra, sum varalim.

Vegna minnilutan í býráðnum, Tjóðveldi, Fólkaflokkin og Framsókn: Anniku Olsen sum nevndarlim og Gunvør Balle sum varalim.

Fyri Vinnuhúsið: Berg Poulsen sum nevndarlim og Ester Dahl sum varalim.

Fyri Visit Faroe Islands: Gurið Højgaard, stjóra, sum nevndarlim og Annleyg Lamhauge sum varalim.

Fyri ÍSF:  Elin Heðinsdóttir Joensen, ÍSF-forseta, sum nevndarlim og John Kjær, ÍSF-starvsnevndarlim, sum varalim.

# 143/22 Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.10.2020 | 53/20 | 20/03654-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2020 | 182/20 | 20/03654-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 262/20 | 20/03654-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 230/20 | 20/03654-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 343/20 | 20/03654-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.12.2020 | 360/20 | 20/03654-1 |
| 7 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 313/20 | 20/03654-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 254/20 | 20/03654-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 137/21 | 20/03654-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 175/21 | 20/03654-1 |
| 11 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 182/21 | 20/03654-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 142/22 | 20/03654-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 182/22 | 20/03654-1 |
| 14 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 143/22 | 20/03654-1 |

**Upprunin til málið:**
Ásannandi at tørvur støðugt er á fleiri bústøðum í Tórshavnar kommunu, og at neyðugt er at útvega fleiri byggiøki, fer kommunan undir at bjóða økið við Miðhorn út í almenna sølu.
Kommunuætlanin vísir á, at tørvur er á ymiskum bústaðasløgum, og metir umsitingin at hetta økið kann skipast við blandaðari bústaðabygging.

Mál nr. *19/01753* um útstykking av økinum við Miðhorn varð viðgjørt og samtykt í fíggjarnevndini 22. januar 2020.

Samtykt var:

- at kanna eftir um NN Holding eru áhugaðir í at makaskifta til íbúðarbygging, sambært avtalu undir Kongavarða.
- at økið, sum er eftir, eftir møguligt makaskifti, verður lýst til sølu í almennum útboði, til bústaðarbygging, eftir treytum sum umsitingin setur.

Kommunala eftirlitið hevur ikki góðkent ætlanina um at makaskifta ognina til NN Holding, og verður tí mett, at økið undir Miðhorni eigur at verða boðið út til almenna sølu til skipan av blandaðari bygging, bæði sethúsa- og íbúðabygging, herundir eisini leigubústaðir, eftir treytum ið umsitingin setur.
Økið, ið boðið verður út er sambært vegleiðandi kortskjali: *Møgulig byggilinja og útstykking til bústaðir, journal nr. 20/03654 - 3.*

Økið við Miðhorn liggur millum tveir býlingar, ið lýsa hvør sín bústaðardám. Vestanfyri liggur Norðasta Horn við sethúsum og tvíhúsum og eystanfyri liggur Millum Horna við íbúðarhúsum og sethúsum.
Um hugt verður eftir lendinum, kundi ein byggilinja við íbúðarhúsum verið løgd sum framhald frá íbúðarhúsunum Millum Horna og vestureftir móti Norðasta Horni og sethúsaútstykking verðið sambinding millum býarpartarnar.
Sí skjal 20*/03654 – 3 møgulig byggilinja og útstykkingar til bústaðir*

Keypari av ognini, skal prosjektera útstykkingina, soleiðis at samlaða byggingin er skipað í eini heild í mun til lendið og felagsøki. Økið skal skipast við atliti at atkomuviðurskiftum fyri øll, bæði í byggingini sjálvari og í mun til atkomu- og ferðsluviðurskiftum í økinum.

Tilboðsgevarar skulu hava neyðugar fakligar førleikar til at lýsa og loysa samlaðu ætlanina í síni heild.

**Lýsing av málinum – samandráttur**:
At byggja bústað á økinum við Miðhorn, hevur tað við sær, at Norðasta Horn fær betri samband við býin. Talan er um eitt avmarkað øki á matr. nr. 1160a, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, sí kortskjalið.

Kortskjalið er bert vegleiðandi, og skal eitt hóskandi øki sundurbýtast frá matr. 1160a til endamálið. Á økinum eru fýra leigumál um traðarbrúk, sum eru uppsøgd at fara úr gildi 30. November 2020.

Í sambandi við útbjóðingina av økinum, fáa grannar høvi at koma við viðmerkingum, so teirra ynski í størst møguligan mun verða tikin við í ætlanina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vegaatkoma verður frá Landsvegi ella frá privatum vegi, millum Horna.
Økið liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum í høvuðsheitum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.
Almenna byggisamtyktin skal tí broytast fyri økið, um farið verður undir útstykkingina, soleiðis at økið verður fevnt av ásetingunum fyri A1 øki, og alt eftir nágreiniligu útstykkingarætlanini, verður helst neyðugt at gera serstaka byggisamtykt. Tað vil siga, at byggisamtyktin skal broytast fyri økið.
Hugsast kann, at partur av økinum verður í A1 øki og partur verður í A3 øki, og at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri part av økinum.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Málið verður avgreitt við allar avvarðandi myndugleikar og leigarar. T.d. liggur økið upp at landsvegi, sum krevur eina hoyring hjá Landsverki. Harafturat skal ein matrikulering fara fram, sum krevur eitt samskifti við Umhvørvisstovuna.

**Skjøl:**
*Møgulig byggilinja og útstykking til bústaðir, journal nr. 20/03654 - 3.*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- at umsitingin fær heimild at bjóða økið við Miðhorn út í almenna sølu.
- útbjóðingin skal skipast í tvær verkætlanir:
  1. Sethúsaøki
  2. Íbúðarbygging til leigu
- Útbjóðingin verður skipað eftir sama leisti, ið áður er brúkt, sambært útbjóðingartreytum, ið umsitingin setir.

Umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 06. oktober 2020:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass og Tróndur Sigurðsson, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við málinum og mælir til, at spurningurin um yvirtøku av landsvegnum verður avgreiddur, áðrenn økið verður boðið út sambært omanfyristandandi treytum.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, ongari ímóti og seks blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata tilboð inn 4. des 2020 kl. 15 var farin, vóru ávikavist 8 tilboð innkomin – 4 tilboð uppá íbúðarøkið og 4 tilboð upp á set-/raðhúsaøkið. Harumframt góvu tveir tilboðsgevarar alternativt tilboð inn upp á bæði økini.

Boðgevararnir fingu síðani møguleika at lata inn hægri boð, og skuldu hesi verða kommununi í hendi í seinasta lagi 8. desember 2020 kl. 15.

Tá seinna freistin at lata tilboð inn 08. des 2020 kl. 15 var farin, vóru ávikavist 4 tilboð innkomin – 2 tilboð uppá íbúðarøkið og 2 tilboð upp á set-/raðhúsaøkið, umframt at tveir tilboðsgevarar góvu alternativt samlað tilboð inn upp á bæði økini.

Av tí at útbjóðingarskrivini ikki biðja um samlað tilboð fyri bæði økini, so verður mett, at alternativu tilboðini ikki kunnu takast við í viðgerðina av tilboðunum, og verða tey tí strikaði.

Tilboðini fyri 1. og 2. rundu eru lýst í viðhefta skjali, Tilboðsupphæddir Miðhorn, journal nr. 20/03654-33.

Hægsta tilboðið var tilboðið frá Felag undir stovnan v/Gordon Rajani. Felagið lat eitt samlað tilboð inn áljóðandi kr. 5.105.400,00, og er tilboðið sum omanfyri nevnt ikki tikið við í viðgerðina. Tó verður í tilboðnum boðin fermetra kostnaður á kr. 402 kr/fermetur, sum samlað gevur omanfyri nevndu tilboðsupphædd. Verður upphæddin býtt á ávikavist íbúðaøkið á 5.700 fermetrar og set-/raðhúsaøkið á 7.000 fermetrar, eru boðini ávikavist kr. 2.291.400,00 fyri íbúðaøkið og 2.814.000,00 fyri set-/raðhúsaøkið. Tilboðið hevði harumframt hesi fyrivarni:

> **Fyrivarni:** Vit hava uml. 4.827m2 av lendi til avlops undir Kongavarða. Hetta lendi ynskja vit at lata innaftur til Tórshavnar Kommunu fyri ein prís á 870 kr/m2 sum er hóskandi og sum tí skal mótroknast. Millumgjald verður sostatt: 822.510,-
>
> Fyrivarni verður eisini tikið fyri, at man blívur samdur um, hvussu vegurin verður gjørdur. Tí ynskiligt er at tillaga vegaloysnina.

Umsitingin metir, at hesi fyrivarni frá felagnum víkja ov nógv frá kravinum um fígging, til at tilboðið kann góðtakast.  Viðmerkjast kann, at verkætlanin undir Kongavarða og málið um sølu at lendi við Miðhorn ikki kunnu knýtast saman á tann hátt, ið gjørt verður í fyrivarninum til tilboðið.

Fortreytin fyri tilboðnum er, at Tórshavnar kommuna keypir uml. 4.800 m² av lendi undir Kongavarða frá felagnum fyri 870 kr./m², og at peningurin frá hesi sølu gongur inn í boðið upp á lendið við Miðhorn.

Víst skal verða á, at Tórshavnar kommuna ikki hevur samtykt at keypa aftur uml. 4.800 m² av lendi frá felagnum undir Kongavarða fyri 870 kr./m², og tí fyriliggur eingin avtala um hetta.

Av tí at tilboðsgevarin treytar sítt boð av einum øðrum handli, sum eingin avtala fyriliggur um, fer umsitingin at mæla frá at taka av tilboðnum, og mælt verður tískil til at vraka tilboðið frá felagnum.

Næst hægsta tilboðið á kr 1.635.900,00 fyri íbúðaøkið var frá Articon. Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi 287,00 kr fyri teir 5.700 fermetrarnar. Tilboðið er væl lýst við einum sokallaðum skipanaruppskotið og er uttan nøkur fyrivarni.

Næst hægsta tilboðið á kr. 2.550.000,00 fyri set-/raðhúsaøkið var frá Felag undir stovnan v/ Janus Petersen. Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi 364,28 kr fyri teir 7000 fermetrarnar. Tilboðið hevði harumframt hesi fyrivarni:

> Boðið er givið við teirri fortreyt, at ein annar keypir stykkið til íbúðarbygging, og at kostnaðurin til skipan av økinum, og at gera vegin og fríøkið, verður býttur líka millum keyparan av íbúðarverkætlanini og keyparan av sethúsa-/raðhúsaverkætlanini.
>
> Viðmerkjast skal, at boðið er givið við atliti til ta óvissu, sum liggur í, at myndugleikatreytir v.m. í pkt. 3.2 í útbjóðingartilfarinum ikki er útgreinað nærri. Harvið er ein ávís óvissa hjá tilboðsgevara í mun til kostnaðarútrokningar og váðan við verkætlanini.
>
> Tað er ein fortreyt, at ein leistur verður gjørdur til at handfara eina møguliga støðu, har semjast ikki fæst við keyparan av íbúðarstykkinum og/ella kommununa, um skipan og útbygging av økinum.

Umsitingin metur ikki, at hesi fyrivarni eru ov víttgangangandi í mun til treytirnar í útboðstilfarinum.

Tó hevur umsitingin mett um tilboðið í mun til aðrar sambærligar sølur av lendi seinastu árini, og lendi, ið er til sølu í privatum handli í løtuni. Hesar sølur vísa greitt, at byggilendi til sethús verður selt fyri ein munandi hægri kostnað enn tann, sum er boðin fyri lendið undir Miðhorn, sí j.nr. 20/03654-32.

Av tí at tilboðsupphæddirnar fyri set-/raðhúsaøkið ikki er at meta ájavnar við onnur líknandi økir, sum antin standa til sølu ella nýliga eru seld í kommununi, so metir umsitingin, at útbjóðingin fyri set-/raðhúsaøkið eigur at verða strikað vísandi til, at ein søla fyri tann prís, ið er boðin, ikki er fíggjarliga skynsom.

Skotið verður í staðin upp, at kommunan sjálv stendur fyri einari kommunalari sethúsa/raðhúsaútstykking í økinum, og á henda hátt tryggjar borgarum í kommununi nøkur grundøkir, sum verða útlutað eftir kommunala leistinum í sambandi við útlutan.

Viðvíkjandi økinum til íbúðarbygging verður tó mett, at innkomna boðið er nøktandi, vísandi til tær avmarkingar, ið eru lagdar á økið, herundir serliga at talan skal vera um leigubústaðir .

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og býararkitekturin mæla til:

- At annulera alternativu tilboðini.
- At annulera tilboðini upp á set-/raðhúsa økið, grundað á at sambærlig øki í kommununi verða seld fyri væl hægri kostnað enn innkomnu tilboðini eru ájóðandi, og grundað á, at mett verður skilabetri, at kommunan fer undir at skipa set-/raðhúsa útstykkingina.
- At taka av tilboðnum hjá Articon upp á íbúðarøkið, hetta grundað á, at kostnaðurin verður mettur at vera á nøktandi støði fyri hetta lendið í mun til tær avmarkingar, ið ætlanin er at leggja á økið í sambandi við søluna.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at økið til set-/raðhús verður boðið út aftur til sølu við treytum um, at byggjast skulu leigubústaðir á hesum øki. Málið beint í býráðið.

Heðin Mortensen atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turid Horn, Bogi Andreasenn og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um uppskot frá Heðini Mortensen um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen:

Mælt verður til at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini við teirri broyting, at viðvíkjandi lendinum til set-/raðhús verður - vísandi til samtyktina í máli 18/01973 og ætlanina at makaskifta lendi á Kongavarða við lendi við Miðhorn, mælt býráðnum til enn einaferð at troyta møguleikan at fáa loyvi til upprunaligu ætlanina um at makaskifta og, um hetta ikki ber á mál, at bjóða lendið við Miðhorn, ið var ætlaður til set-/raðhús, út í fríari sølu við treytum um, at leigubústaðir skulu byggjast á ognini.

Broytingaruppskotið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Turid Horn, Bogi Andreasenn og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Býráðslimirnir Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein gera galdandi, at teir ikki eru kunnaðir um teir nýggju upplýsingarnar, sum fyriliggja í málinum og sum grunda avgerðina hjá meirilutanum og føra tískil fram, at málið ikki er nóg væl lýst og átti at verið beint aftur í nevnd at viðgera.

**Ískoyti:**
26. mars 2021 móttók kommunan endaligt svar frá Kommunala eftirlitinum, har ætlaða makaskiftið, sum varð samtykt 17. desember 2020, verður noktað.

Síðani hava fundir verið við tveir teir hægst bjóðandi upp á bæði lendini. Roynt hevur verið, at fáa teir bjóðandi at samstarva um eina ætlan fyri alla útstykkingina, men tað hevur ikki víst seg at borið á mál.

Ásannandi at tað kann gera tilgongdina meiri fløkta, at hava tveir aktørar at samstarva um skipanina og útinnanina av økinum, hetta tí at tað liggur ein fíggjarligur vági í, umframt at tilgongdin kann verða merkt av, at ósemjur millum aktørarnar kunnu seinka tilgongdini, so verður mett ráðiligt at kanna møguleikan fyri at fáa ein arbeiðstakara at taka sær av allari verkætlanini, soleiðis at verkætlanin kann verða framd skjótt og gott.

Articon vann útboðið av íbúðarbygginini við hægsta tilboðnum. Undir stovnan v/Janus Petersen hevði hægsta tilboðið upp á lendi til set-/raðhúsini, men bjóðaði hetta felagið ikki upp á íbúðarverkætlanina.

Tilboðini upp á lendið til set-/raðhúsini var mett ov lág grundað á at sambærlig øki í kommununi verða seld fyri væl hægri kostnað enn innkomnu tilboðini, og grundað á, at mett varð skilabetri, at kommunan fór undir at skipa set-/raðhúsa útstykkingina. Býráðið samtykti at bjóða lendið, ætlað til set-/raðhús, út í fríari sølu við treytum um, at leigubústaðir skuldu byggjast á ognini. Í tilgongdini at fáa teir bjóðandi at samstarva um útstykkingina hevur tað víst seg óheppið at hava tveir aktørar á eini útstykking, og tí verður mælt til, at fáa ein arbeiðstakara at taka sær av allari útstykkingini, bæði íbúðarbyggingini og set-/raðhúsabyggingini, umframt at sleppa kravinum um, at bústaðirnir á set-/raðhúsa økinum skulu vera til leigubústaðir.

Kommunan er í bústaðarneyð, og tí verður í næstum farið undir eina nýggja útstykking á Argjum. Fíggjarligi vágin fyri kommununa við at gera útstykkingar er rættiliga stórur, og tí verður mett, at tað kann loysa seg um ein aktørur fær alla útstykkingina millum Horna at menna, bæði fyri kommununa í mun til at fáa fleiri bústaðir í kommununi skjótt, umframt við at sleppa undan eini møguligari fígging av at veita fleiri bústaðir.

Av tí at Articon vann útboðið upp á lendi til íbúðarbyggingina, so verður mett ráðiligt fyri at fáa ein aktør upp á alla útstykkingina, at fara í eina tilgongd við Articon, har Articon fær í boði at keypa lendið til set-/raðhús fyri tilboðskostnaðin, sum felagið Undir Stovnan bjóðaði. Talan er um ein tilboðshækkan uppá áleið 500.000 kr. Mett verður, at verður farið undir eina tílíka tilgongd, so kann útstykkingin verða framd skjótt og gott, grundað á at ein aktørur tekur sær av øllum viðurskiftunum.

Articon lat saman við tilboðnum kommununi uppskot uppá skipan av báðum stykkjunum, sí viðhefta ávegis skipanaruppskot, journal nr. 20/03654-41. Væntandi verður hetta ætlanin aftanfyri alla útstykkingina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Articon fær í boði at keypa lendið til set-/raðhús fyri tilboðsupphæddina, sum var hægst, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í samband matrikulering og frábýti av lendi til Articon eru smærri broytingar á skapinum og staðsetingini á komandi matrikulmarkið saman borið við ávísta kortskjalið í Grein 4 í sølusáttmálanum. Víst verður til kortskjal »J.nr. *20/03654-45 21_01539-2 Økið 1318453_1_1.pdf* .«

Støddin á frábýtta økinum er óbroytt og talan er bert um broyting í skapi og staðseting. Víst verður til skjal »*J.nr. 22/00438-25 Mið_K01_C07.3_N001_A4_Byggistig og Nýtslustig - Staðfesting.pdf«*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri, leiðarin á byggimálsdeildini og býararkitekturin mæla til at viðmæla nýggja skapinum og staðsetingini á sundurbýtta økinum, sum víst á »*J.nr. 22/00438-25 Mið_K01_C07.3_N001_A4_Byggistig og Nýtslustig - Staðfesting.pdf«.*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

## 144/22 Miðbýarætlan - Havnará

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 8/21 | 21/00407-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.02.2021 | 8/21 | 21/00407-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 27/21 | 21/00407-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 57/21 | 21/00407-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 97/21 | 21/00407-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 141/21 | 21/00407-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 55/21 | 21/00407-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 143/22 | 21/00407-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.06.2022 | 49/22 | 21/00407-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 184/22 | 21/00407-1 |
| 11 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 144/22 | 21/00407-1 |

**Upprunin til málið**
Politiskt er ynski um at raðfesta miðbýin, soleiðis at trivnaðurin í miðbýnum framhaldandi hækkar, og er ynski um at lata Havnará uppaftur á strekkinum frá Betri banka og oman á Vaglið framvið Tinghúsgarðinum.

**Lýsing av málinum**
Fleiri málsetningar eru í visiónini hjá býráðnum um at skapa trivnað í einum býi. Høvuðsstaðurin skal vera alheimsgjørdur og fjølbroyttur, har rúm skal vera fyri ymiskum áskoðanum, hugskotum og mentanum, tí soleiðis verður gott hjá øllum at liva, búgva og virka. Býurin skal vera ein livandi býur við upplivingum og avbjóðingum, men eisini ein býur við tryggleika og nærleika.

Eitt nú við hesi visjónini fyri høvuðsstaðin varð hugskots- og prosjektkappingin fyri miðbýin í 2014 hildin. Bæði kappingin og seinni Miðbýarætlanin frá 2016, arbeiða báðar fyri, at býurin gerst áhugaverdur og savnandi fyri borgararnar í kommununi, men somuleiðis ein slóðandi høvuðsstaður fyri Føroya land.

Borgarar spyrja eftir upplivingum og sakna ein livandi bý eins og teir vit kenna frá útlondunum. Býarøkini mugu skapa møguleika fyri uppihaldi millum havnarfólk, Føroya fólk og ferðafólk, og tí skal Tórshavnar kommuna skapa karmar fyri einum náttúrligum samanspæli millum hesi.

At lata Havnará upp aftur er eitt beinleiðis átak fyri at geva býnum enn eitt býarrúm við einum aktiviteti/virki, sum vit annars ikki hava niðri í miðbýnum longur. Søguliga sæð, so eru áirnar spor í lendinum, og hava tær stóran týdning fyri, hvussu lendið verður fatað, og eru tær við rennandi vatninum og tí lívið, sum kann nørast á staðnum, livandi, dragandi og savnandi.

Í uml. ár 1960 varð Havnará lokað á leiðini frá Ebenezer fram við Tinghúsinum og oman á Vaglið.

Upprunaliga gekk áin frá Villingadali, oman í Gundadal, víðari oman gjøgnum plantasjuna, framvið Sjónleikarhúsinum og oman gjøgnum miðbýin/Vaglið og oman á Kongabrúnna. Størsti parturin av ánni er

í dag undir jørð, og verður væntandi heldur aldrin latin uppaftur, hetta grundað á ymisk viðurskiftir, so sum kloakk, núverandi virksemið omaná lokinum o.s.fr.

Í fyrstu atløgu verður mett ráðiligt, at fara undir at lata partin av ánni upp frá Betri banka og oman á Vaglið, fyri síðani at meta um og taka støðu til, um tað er ráðiligt at lata ánna upp allan vegin omaneftir Áarvegnum og oman á Kongabrúnna.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Øllum kunnugt, so verður áin í dag nýtt sum kloakk heilt uppi frá Sjónleikarhúsinum, og skal tað gerast møguligt at lata part av ánni uppaftur, so verður neyðugt at taka hædd fyri hesum og fáa kloakkina skipaða serskilt frá ánni. Tekniska deild, sum varðar av kloakkunum vísir á, at hetta kann gerast upp á fleiri mátar, men verður neyðugt at gera eitt neyvari kanningar og prosjekteringsarbeiði hesum viðvíkjandi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
16/00491_Miðbýarætlanin

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í framhaldandi tilgongdini verður neyðugt at kanna málið væl, tosa við avvarðandi áhugapartar, soleiðis at øll viðurskiftir eru greidd, tá farið verður undir arbeiðstøkuna.

**Skjøl**
Sí j.nr. 21/00407-2: Mynd: Havnará – Vaglið,

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Verkætlanin er í núverandi løtu ongan veg komin, og tískil er ómøguligt at lýsa fíggjarligu viðurskiftini. Hetta verður at greina nærri seinni í tilgongdini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- At 1.000.000 kr. verða fluttar av konto 8175, L00001, Løgukarmur fyri árið til nýggja íløgu "Havnará" á konto 8175.
- At umsitingin fer undir at lýsa verkætlanina, gera neyðugar kanningar og fyrireika verkætlanina.
- At umsitingin verður heimilað at bjóða partar av verkætlanini út, um mett verður neyðugt við serráðgeving til verkætlanina
- At avvarðandi nevndir verða kunnaðar leypandi.
- At beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við ætlanini vísandi til óvissuna um endaliga kostnaðin og hvussu hetta ávirkar aðrar grundtænastur, ið kommunan skal veita.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingararbeiðið til verkætlanina at lata ein part av Havnará upp, hevur verið neyðugt at kanna fleiri viðurskifti, áðrenn farast kann í holt við sjálvt projekteringsarbeiðið. Arbeitt hevur somuleiðis verið við uppskoti til tekniska loysn, hvussu áin kann latast upp við reinum vatni, har dálkað vatn verður leitt uttan um sjálva ánna.

Tvær tekniskar loysnir eru uppi at venda um, hvussu áin kann gerast, men áðrenn áin kann endurskapast/nýggjast, má dekkið og gamalt tilfar takast oman av ánni. Um hugt verður við arbeiðstakarans eygum, er neyðugt at skipa verkætlanina í stigum. Endurnýggjanin er treytað av niðurtøkuni, og mælir umsitingin tí til at heinta tilboð frá tveimum arbeiðstakarum fyri at kenna ítøkiliga kostnaðin á niðurtøkuni og fyrsta byggistigi.

Ímeðan bíðað verður eftir tilboðum, verður næsta byggistig fyrireikað, sum er at tekna uppskot til endurnýggjanina/skapanina av ánni. Arkitektoniski parturin fevnir um útsjónd og skipan av botni, vangum, girðingum, álegging, vøkstri o.s.fr.

<u>Skráseting og kanningar</u>
Í 2017 varð ein skráseting av Havnará gjørd frá Sjónleikarhúsinum og oman til Etika niðri á Áarvegnum. Skrásetingin fevndi um allar írenningar, sum eru knýttar í Havnará, og skapið á ánni, t.v.s. botn, vangar og dekk. Tilsamans vórðu 317 leiðingar skrásettar, 247 av hesum vóru annað hvørt dren ella regnvatnsleiðingar, t.e. vatn í seyrar niður í lendið og avvatning av vegum, túnum ella tekjum, meðan hinar 70 vóru kloakk leiðingar.

Flestu leiðingar, sum renna inn í Havnará, eru gomul betong ella leirrør, sum í fleiri førum eru brotin uttan fyri vangan, í støðum kemur mannatrekkur úr leiðingum, og aðrastaðni var nógv feitt at síggja. Kloakkvatn lekur tí inn millum rivur á vangunum, og eru hetta annars avleiðingar av m.a. vantandi rottangum,

feittútskiljarum og skeivum íbindingum. Mett varð í 2017, at áleið ein triðingur av teimum 70 kloakkleiðingunum hava brot ella rivur. Ramur kloakkdeymur er í støðum í miðbýnum, og verður ein avbjóðing við at taka dekkið av ánni, at tað fer at lukta í miðbýnum.

Lendisuppmáting er gjørd av økinum og nærumhvørvinum, sum verður nýtt sum grundarlag til uppskotið og víðari tilgongdina. Møguliga verða avbjóðingar við verandi leiðingum, sum mugu umleggjast í sambandi við verkætlanina.

Mátingar av vatnnøgd í Havnará eru settar í gongd, og verða gjørdar yvir tíð. Neyðugt er at kenna vatnnøgdina, bæði í turki og áarføri, tí síðukanalir til umlegging av skitnum vatni, har áin skal latast upp, skulu dimensionerast út frá hesum.

Lívfrøðiligar kanningar vístu í summar, at áarvatnið í Havnará oman fyri Sjónleikarhúsið er dálkað við E. Coli og koliformum bakterium. Áarvatnið, sum skal leiðast oman, har Havnará skal latast upp, er sera illa dálkað, og úrslitið bendir á, at kloakkvatn rennur í ánna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at heinta tilboð frá tveimum arbeiðstakarum (undirhondstilboð) uppá niðurtøku og at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í tilgongdini hevur verið arbeitt við møguleikanum at lata Havnará upp og eisini partvís at lata ánna upp, men verður hetta ikki mett ráðiligt, sum umstøðurnar eru í dag, og tekur verkætlanin tí støði í at gera eina á oman á verandi Havnará. Verkætlanin fevnir í fyrsta umfari um strekkið frá Betri Banki og oman til sunnara enda á tinghúsvøllinum, har standmyndin av R.C. Effersøe stendur.

Zeta Architects hevur tilevnað eitt skipanaruppskot, sum lýsir arkitektoniska konseptið, har arbeitt verður við trimum hugtøkum; botnur, áarbakki og vatn. Uppskotið, sum fevnir um eina nýggja og nútímans á, vísir á eina loysn í trimum stigum, har áin rennur ígjøgnum ymisk býarrúm og tillagar seg til umstøðurnar við at broyta dám og eginleikar. Til tíðir er áin lyft upp úr gøtuni, aðrastaðni flýtur hon saman við gøtuni og aftur aðrastaðni grevur hon seg niður í gøtuna. Sí annars skipanaruppskotið.

Umsitingin hevur somuleiðis latið gjørt útbjóðingartilfar til verkætlanina sambært skipanaruppskoti og projekttilfari, og vórðu tríggir arbeiðstakarar bjóðaðir at lata undirhondstilboð uppá verkætlanina.

Tilboðini eru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| J&K Petersen | kr. 9.438.586 u/mvg |
| Húsavarðartænastan | kr. 15.363.149 u/mvg |
| Articon | kr. 15.469.505 u/mvg |

J&K Petersen vann útboðið við lægsta tilboði.

Grótvirkið hevur latið tilboð uppá bassaltið, ið skal nýtast í verkætlanini, og er samlaða upphæddin áljóðandi kr. 1.843.200 íroknað samlaðu tilboðsupphæddina, lýst omanfyri.

Av tí at prísurin fyri neyðugt býarrúmsinnbúgv, t.e. gøtuljós, beinkir, ruskspannir o.a., list, ráðgeving og óvantað ikki er íroknað tilboðsupphæddina, skulu hesir postarnir leggjast afturat samlaðu upphæddini.

Byggiharraráðgevi hevur havt byggileiðsluna av verkætlanini, og skal byggiharraráðgevi framhaldandi verða knýttur at verkætlanini. Talan er um eitt tíðarskeið áljóðandi 10 mánaðir, harav 2 mánaðir eru fyrireiking til verkætlanina og 8 mánaðir eru byggitíðin fram til avhanding.

Samlaða roknistykkið fyri verkætlanina er soljóðandi:

| | |
|---|---|
| J&K Petersen | kr. 9.438.586 |
| Býarrúmsinnbúgv og list | kr. 400.000 |
| Ráðgeving | kr. 300.000 |
| Óvantað 15% | kr. 1.139.308 |
| Íalt | kr. 11.277.894 |

Samlaða upphæddin fyri verkætlanina verður soleiðis kr. 11.982.762 v/mvg.

Umsitingin hevur áður fingið eina tilsøgn frá Løgtinginum uppá, at tey eru áhugaði í at rinda fyri partin, sum liggur inni á teirra matrikli. Umsitingin fer tí í samráðingar við Løgtingið skjótast gjørligt.

Byggitíðin er sett at vera 8 mánaðir, frá byrjan til avhandan íroknað frítíð og frídagar. Eftir ætlan verður arbeiðið sett í gongd beint eftir summarfrítíðina.

**Skjøl:**
Dagført skipanaruppskot, journal nr. 22/02992-1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum, at játta kr. 11.982.762 til verkætlanina, harav kr. 7,3 mió. verða játtaðar av LK62996, Miðbýarætlan, og kr. 4.682.762 má útvegast. Peningurin skal flytast á kt. 6275, L62045, Miðbýarætlan – Havnará og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at restupphæddin kr. 4.690.000 verður fíggjað soleiðis:
- kr. 2.860.000 av LK62997, Lendisgøtur
- kr. 1.000.000 av L62997, Lendisgøtur
- kr. 830.000 av L62032, Gøta kring Havnina og Fiskastykki

**Tekniska nevnd 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Annika Olsen, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

# 145/22 Brúgv í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 48/21 | 21/00684-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 59/21 | 21/00684-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 96/21 | 21/00684-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.05.2022 | 109/22 | 21/00684-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 152/22 | 21/00684-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 185/22 | 21/00684-1 |
| 7 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 145/22 | 21/00684-1 |

**Upprunin til málið**
Í des. 2018 varð frílendisætlanin fyri Havnardal gjørd av Ósbjørn Jacobsen Arkitektum. Ætlanin legði upp til at fremja ymisk átøk hvørt eftir annað. Sí j.nr. 21/00684-4, Havnadalur Frílendisætlan Desember 2018_Ósbjørn Jacobsen Ark.

Í 2019 vóru nøkur av átøkunum framd. Hesi vóru:

1. *Nýggj gróðurseting, sum styðjar uppundir verandi viðarlund, og sum samstundis virðir serstaka landslagið í dalinum.*
2. *Víðka um gøtukervið og skapa atgongd til størri part av økinum.*
3. *Fleiri benkur fram við gøtunum*

Sambært ætlanini er næsta átak, ið skal raðfestast, átak 4

4. *Lætta um atgongd tvørtur um ánna á ávísum støðum, við at gera smáar timburbrúgvar.*

**Lýsing av málinum**
Grøna økið og viðarlundin í Havnardali er eitt fríøki, ið verður dagliga nýtt av mongum. Sandá rennur ígjøgnum økið, og er hon samlandi fyri fríluftsvirksemið í Havnardali.

Sum nú er, eru gonguleiðir lagdar inn í lendið báðu megin áarbakkan, men ongar gongubrúgvar eru gjørdar yvir um ánna, sum ger tað torført og til tíðir vandamikið at koma sær yvirum.

Sambært frílendisætlanini hevur júst hetta sambandið yvir um ánna eisini ein berandi leiklut í upplivingini av staðnum.

Roknast kann við, at hetta fríøkið fer at draga munandi fleiri fólk at nýta økið komandi árini í tráð við at býurin veksur, og at økið millum Horna verður bygt.

Í fyrstu atløgu verður mett ráðiligt at gjørdar verða tríggjar brúgvar í økinum. Sí j.nr. 21/00684-2, Ætlaðar brúgvar í Havnadali01, umframt j.nr. 21/00684-3, Sniðdømi, Ósbjørn Jacobsen 2018.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í D1 økið í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, lagt av til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt.

Umframt at økið er innanfyri friðingarlinjuna við Sandá og skal Náttúrufriðingarmyndugleikin sostatt hoyrast og geva loyvi til brúgvarnar.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Havnardalur – fríøkið, Journal nr. 17/02248

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Journal nr. 21/00684-2, Ætlaðar brúgvar í Havnardali01
Journal nr. 21/00684-3, Sniðdømi_Ósbjørn Jacobsen2018
Journal nr. 21/00684-4, Havnardalur Frílendisætlan, Desember 2018_ Ósbjørn Jacobsen Ark.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | x | | |
| Umhvørvisavleiðingar | x | x | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at farið verður undir at gera brúgvarnar, treytað av loyvi frá friðingarmyndugleikanum, at játtaðar verða kr. 1 mió. av konto 6275, L0001, Løgukarmur fyri árið, á konto L62033, Havnardalur – fríøkið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Síðani 2018 hevur Tórshavnar kommuna gjørt almennar lendisgøtur báðumegin áarbakkan í fríøkinum í Havnardali. Hetta er bæði inni á lendinum eystaru megin ánna, sum kommunan eigur, og eisini inni á lendinum vestaru megin hjá festaranum á Velbastað, Dánjal Paula í Búðini. Hesar lendisgøturnar eru gjørdar sambært frílendisætlanini fyri Havnardal, sum býráðið samtykti í 2018.

Ein partur av hesum ætlaða lendisgøtuteininum er í gerð nú, og skal hesin eftir ætlan knýta gøturnar og brúgvarnar í økinum saman í ein samlaðan kring-gongutein.

Festarin sigur, at ongin greið avtala er gjørd við seg í sambandi við at Kommunan fór í gongd við at gera lendisgøtur á festijørðini hjá bóndanum í 2018.

Hann sigur m.a., at hann fær ikki brúkt lendið hjá sær í Havnardali til seyð um fólk ganga túr við hundi á økinum hjá sær, har einki hegn er sett upp.

Hann krevur tískil, at um kommunan framhaldandi ynskir at sleppa at brúka hendan partin av festijørðini til kommunala lendisgøtu, og um arbeiðið við gøtuni, sum nú er í gerð. skal gerast liðugt, so skal ein brúksavtala gerast partanna millum.

Bóndin góðtekur sostatt, at kommunan framhaldandi nýtir lendið sum almenna gonguleið, undir hesum treytum:

1. At kommunan áðrenn 1. oktober 2022 fráhegnar økið við almennu lendisgøtuni, og sjálv heftir fyri kostnaðin av hegninum umframt at hevur ábyrgd av hesum hegninum framyvir.

   Við hesum missir bóndin 26.746 fermetrar av síni festijørð til almenna nýtslu.
   Sí kortskjal: *Almenn gøtuskipan á festijørð í Havnardali*, journal nr. 21/00684.22

2. Og sum endurgjald fyri mist bit, skal kommunan veita 1000 m av øðrum hegni. Hetta hegnið setir bóndin sjálvur upp longri niðri í Havnardali, har nógv fólk eisini eru farin at nýta økið at ganga í.

Sí skjal: *Brúksavtala_Lendi til gøtu á festijørð 22april 2022*, journal nr. 21/00684-23

Býarskipanardeildin metir, saman við Løgdeildini, at hendan brúksavtalan er ein rímilig loysn fyri allar partar í málinum, og skotið verður upp at brúksavtalan skal standa við í 20 ár.

Sjálvur kostnaðurin at fráhegna lendisgøturnar í Havnardali verður á leið kr. 300.000, íroknað arbeiðstøku og tilfar.

Og kostnaðurin fyri hegnið, sum skal latast bóndanum sum endurgjald fyri mist bit, er kr. 70.000.

Umsitingin metir, at kostnaðurin av hesum tilsamans verður kr. 450.000, íroknað óvæntaðar útreiðslur og kommunalt mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta treytirnar í brúksavtaluni um lendisgøturnar á festijørð í Havnardali, at játta kr. 450.000 av konto LK62997, Lendisgøtur á konto L62033, Havnardalur – fríøkið, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 146/22 Skúlin við Løgmannabreyt : Karlamagnusarbreyt 47 – 188 Hoyvík – matr. nr. 135fe – Kanna klæðing – útveggir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 222/21 | 17/00415-67 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2022 | 128/22 | 17/00415-67 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 160/22 | 17/00415-67 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 146/22 | 17/00415-67 |

**Upprunin til málið**
Skúlin við Løgmannabreyt fekk ein skaða í jólaódnini 2016. Í sambandi við at skaðin varð kannaður, fekk húsaumsitingin illgruna um, at tað var vátt aftan fyri klædningin.

**Lýsing av málinum**
Húsaumsitingin gjørdi tí av, at kanna timbur og plátu- klæðingina fyri vætu, og varð hendan kanningin gjørd 23. januar 2017.
Timburklæðingin varð tikin niður ymsa staðni á skúlanum fyri at síggja inn í konstruktiónina. Kanningarnar vístu, at í fleiri kanningarstøðum er væta i konstruktiónini og í nøkrum førum eru tekin um soppavøkstur. Sambært tekniskum vegleiðingum er plátan innanfyri træklædningin, ikki egnað til endamálið.

Fyribils er einans talan um visuellar kanningar. Ongar sopparoyndir eru tiknar enn.

Árni Winther teknaði skúlan og hevði projektleiðsluna. Búsetur hevur bygt skúlan.

Skúlin varð avhendaður í 2009. Í sambandi við 5 ára eftirlitið vóru eingi tekin um lekar staðfest.

Í sambandi við fyrireikingar til møguligt sakarmál í móti Arkitektavirkinum Árni Winther, var sýns- og metingarfrágreiðing gjørd, dagf. 25.08.2018
Frágreiðingin staðfestir, at konstruktións uppbygnaðurin ikki er rættur, og vandi er fyri at partar av konstruktiónini verða niðurbrotnir yvir tíð.

Notatini í sambandi við kanningar, sum húsaumsitingin gjørdi í 2017, saman við sýns- og metingarfrágreiðingini frá 2018, geva eina ábending av skaðanum, men ikki eina fullfíggjaða mynd av hvussu umfatandi skaðin er.

**Lógir, ásetingar o.a.**
SBI 224 Fugt i bygninger. Byg-Erfa (21)050928

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Sýn og meting sí skjal: 17/00415-68

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Býráðsfundur<br>22. juni 2022 | Blað nr.: 619<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**
Fíggjarligir avleiðingar verða lýstir seinni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til, at vit í fyrsta umfari (2022) gera umvælingar í einum avmarkaðum parti av framsíðunum, soleiðis at vit fáa eitt gott grundarlag at taka støðu til hvat skal gerast við restina av framsíðunum.

Kostnaðurin fyri at rætta konstruktiónsfeilin í einum avmarkaðum parti, umframt at kanna tørvin á størri umvæling, er mettur til 1,9 mió. kr.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Samráðingar hava verið við byggifyritøkuna Búsetur um at umvæla ein part av framsíðunum á skúlanum og at fáa hetta arbeiðið gjørt á sumri 2022.

Eisini hava umboð fyri SNA arkitektar gjørt nýggjar sermyndir fyri umvælingararbeiðið og gjørt leist fyri skráseting og uppfylging meðan bygt verður.

Ætlanin er enn sum áður, at fyrsti parturin skal verða grundarlag fyri framhaldandi umvælingararbeiði av øðrum framsíðum seinni, bæði plátu- og timburklæðing.

Umframt handverkaraútreiðslur til arbeiðstakara verða eisini útreiðslur til uppfylging, eftirlit, skráseting, ókendar útreiðslur og kommunalt mvg.

Viðlagt. Tilboð, kostnaðarmeting og uttanhýsis tilmæli.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til
- at flyta 1.310.000 mió. kr. av løgukarminum LK41014 á konto 4175, til verkætlan L41014 á konto 4175
- at fara í endaligar samráðingar og gera arbeiðstøkusáttmála við Búsetur á kr. 735.182,00 kr u. Mvg
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 147/22 Kloakk við sjógv (økið við gamla skúla)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.03.2021 | 16/21 | 20/03632-29 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 62/21 | 20/03632-29 |
| 3 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 92/21 | 20/03632-29 |
| 4 Tekniska nevnd | 30.05.2022 | 43/22 | 20/03632-29 |
| 5 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 161/22 | 20/03632-29 |
| 6 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 147/22 | 20/03632-29 |

**Upprunin til málið**
Fyri uml. 10 árum síðani fór Tórshavnar kommuna undir at betra um kloakk viðurskiftini í Kollafirði. Arbeiðið er ikki liðugt, og hetta málið er eitt av fleiri økjum, ið liggja eftir.

**Lýsing av málinum**
Hetta arbeiði er partvís at deila yvirflatuvatn frá kloakk, og partvís at samla grátt spillivatn og leiða tað í ein pumpubrunn, fyri at minka um talið av útrenningum út í fjørðin. Eisini fevnir arbeiðið um at drena feskvatn fram við matr. nr. 154 og 107h, ið er ein gomul avtala millum Tórshavnar kommunu og eigararnar av nevndu matriklum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umhvørvislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**
NA

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
NA

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
NA

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>22. juni 2022 | Blað nr.: 622<br><br>Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at
1) Omanfyri nevnda arbeiðið verður boðið út, sí 20/03632-31 og 20/03632-30
2) Kr. 750.000 verða játtaðar av konto 6875, Kloakkir, L00001, Løgukarmur fyri árið, á nýggja verkætlan "Kloakk við Sjógv”
3) beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Av tí at verkætlanin nú ikki bert verður gjørd av kommununi, at prísvøkstur ger um seg og at ov lítið varð avsett til eftirlit, prosjektløn og óvist, er neyðugt at tað verða játtaðar kr. 500.000, um arbeiðið skal gerast sum ætlað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kr. 500.000 verða játtaðar av konto 6875, Kloakkir, LK00001, Løgukarmur fyri árið 2021, á verkætlan "Kloakk við Sjógv” L68039 og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 148/22 Dagføring av reinsiverkinum í Havnardali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.05.2022 | 46/22 | 22/02522-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 162/22 | 22/02522-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 148/22 | 22/02522-1 |

**Upprunin til málið**
Vatnverkið í Havnardali hevur í longri tíð trongt til at blivið dagført og møguliga nýtt vatnreinsiverk bygt. Í 2008 var verkætlan gjørd hesum viðvíkjandi og kostnaðarmeting gjørd. Mett var tá, at kostnaður av verkætlanini var ov høgur til at farið kundi verið undir hesa verkætlan tá, og varð verkætlanin tí slept. Vatnverkið er síðani tá vorðið 14 ár eldri, og eru onkrar smærri ábøtur gjørdar hesi árini, men tað er ein sannroynd, at reinsikapasiteturin á verandi vatnverki ikki er nøktandi til verandi nýtsluna, og tí er vatnið úr hesum verkinum ofta dálkað og krevur tað tá, at borgarar kóka vatnið, til reint er aftur.

**Lýsing av málinum**
Verandi vatnverk, ið varð tikið í brúk í 1966, er í dag ov lítið og ótíðarhóskandi og tá vatngoymslan í Havnardali er og verður álitið viðv. vatnveiting til býin, er ikki ov tíðliga at taka upp aftur arbeiðið, at fyrireika dagføring av verkinum.

Býurin veksur skjótt, og serliga í Hoyvíkshaganun, har íbúðarøkini liggja á so høgari kotu, at vatnveitingin har má koma úr Villingadali.

Vatnveitingin úr Villingadali er avmarkað vegna lítla avfallsøkið og sum kunnugt høvdu vit stórar trupulleikar á sumri 2000, tá byrgingin varð um at verða tóm.

Neyðugt verður fyrr ella seinni at knýta størri part av niðaru Havnini uppí Havnardalsverkið, sum helst kann lata vatn upp til eina kotu á 105 m.

Krøvini til drekkivatn gerast alt meira umfatandi, og mugu vit altíð vera uppá forkant.
Í 2007 búðu 13.000 fólk á tí øki, sum verkið í Havnardali kann lata vatn til. Økist fólkatalið í hesum øki til 15.000 og hvør íbúgvi nýtur 400 l. Pr. dg. gevur tað 15,000 X 0,4 $m^3$ = 6.000 $m^3$/dg.

Vatnnýtslan á eystara- og vestara kaiøki við sínum virkjum og skipaferðslu kunnu koma upp í 100 $m^3$ av vatni um tíman í eitt døgn.

Hetta samanlagt gevur ein vatntørv uppá 8.400 $m^3$ um døgnið ella 350 $m^3$ um tíman.
Verður eitt vatnverk bygt við eini reinsiorku uppá 400 $m^3$/h, skuldi tørvurin verið nøktaður fleiri ár fram.

Krøv og ynskir til nýggja reinsiverkið kunnu í stuttum sigast at vera hesi:

1. Liggja á leið har gamla verkið er, og á so høgari kotu so gjørligt.
2. Hava eina reinsiorku uppá 400 $m^3$ um tíman, og eina reintvatnsgoymslu til 2000 $m^3$.
3. Vera einstreingjað, 1 X 400 $m^3$, í mun til Villingadal, sum er tveystreingja, 2 X 300 $m^3$
4. Lúka øll altjóða krøv.
5. Hava sama bygna sum verkið í Villingadali, men tó við broytingum.

*Galdandi lógir o.a. fyri økið.*
Økið úti í Havnardali, talan er um, er í 4. grundumráði.

Í 4. grundumráði er bert loyvt at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðabrúk at gera

Eisini stendur at hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og verða sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.

Hetta merkir, at serligt byggiloyvi má fáast, og at friðingarmyndugleikar koma inn í myndina.

Viðv. verandi vatnverki og innsavningarøkinum í Havnardali er at siga, at tey fingu løggilding frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni 05.07.1996 við nummarinum 5101002.

Eisini kann nevnast, at avvarðandi bøndur í Havnardali hava fingið skriv, har tað verður álagt teimum at taða á slíkan hátt, at tað ikki ávirkar vatnbyrgingina á nakran hátt.

Fyri at á skjótasta hátt, at fáa nærri greinað og lýst, hvussu Vatnverkið í Havnardali kann dagførast, ella nýtt vatnverk kann gerast í sambandi við byrgingina í Havnardalið metir umsitingin, at tikið eigur at verið aftur í verkætlanina frá 2007 við tí endamálið, at kanna hvørjar tillagingar kunnu gerast í hesi verkætlan fyri at fáa til vega eina verkætlan, sum kann gjøgnumførast. Umsitingin metir, at slík ráðgeving kann gerast innan ein karm á kr. 400.000, sum verað funnar innan løgukarmin LK67005 Vatnreinsiverk í Havnardali á konto 6775 Vatnveiting (Løgur)

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
2004-0389, 2007-3388 og 2008-0642

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 400.000 av konto 6775 Vatnveiting (Løgur), løgukarmur LK67006 á løgukonto L67005 undir somu høvuðskonto og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið við teirri rætting, at talan er um at játta kr. 400.000,00 av konto 6775 Vatnveiting (Løgur), løgukarmur LK67005.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 149/22 Umsókn frá Føroyskt Íslandsrossafelag um at byggja Skeiðbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2022 | 138/22 | 22/02539-11 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 159/22 | 22/02539-11 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 149/22 | 22/02539-11 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Føroyskt Íslandsrossafelag um at byggja eina Skeiðbreyt undir Kráarheyggi í Havnardali.

**Lýsing av málinum**
Umsókn er um eina kappingarbreyt, sum er um 250 metur long. Breytin verður bygd sum partur av verandi ringbreyt. Eystan fyri kappingarbreytina er breyt/gøta teknað, har rossini tálma ferðina aftur.

Fyri at taka nakað av vindinum, er ætlanin eisini at gera eina 2,6 metur høga høvd, vestan fyri verandi ringvøll.

Planur av ætlan er víst á skjali 20220506_støðumynd.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Byggingin er bæði í grundumráði 4 og í grundumráði 3, har tað er D2 øki. Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsóknin er send til Friðingarmyndugleikan og hevur lokali friðingarmyndugleikin havt ástaðarfund. Niðurstøða er send til kommununa, niðurstøðan er m.a., at einki má byggjast nærri Tvørá enn 10 metrar. Hetta ger, at ætlaða breytin má antin flytast ella styttast. Lokali friðingarmyndugleikin hevur sent niðurstøðuna til Yvirfriðingarnevndina.

Felagið leigar økið frá kommununi, ætlaða breytin fer út um leigaða økið, og tí má ískoytis sáttmáli gerast fyri hetta øki.

Á kommununi hevur verði tosa um, at tað møguliga kundi verði bara <u>ein</u> long felags ríðingarbreyt, sum øll feløgini kundi nýtt saman.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Málið er partur av øðrum máli hjá kommununi: *Umsókn um stuðul til víðkan og dagføring av kappingarøkinum hjá Føroyskum Íslandsrossafelag undir Kráarheyggi í Havnardali. TK mál nr. 21/02231.*

Ytri ringvegur kann væntast at koma oman gjøgnum økið, Landsverk hevur ikki fingið umsóknina til ummælis.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- 20220506_støðumynd
- Útskrift úr gerðabókini 5600-88130-00037-22.pdf (skriv frá lokalu friðingarnevnd)
- 181/21 Samtykt Býráðsfundur, 23.06.2021 Umsókn um stuðul til víðkan og dagføring av kappingarøkinum hjá Føroyskum Íslandsrossafelag undir Kráarheyggi í Havnardali.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, treytað av at aðrir myndugleikar geva loyvi og annars við treytum sum umsitingin og aðrir myndugleikar seta, og at beina málið í fíggjarnevndina viðvíkjandi leigumálinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnvndini og at leingja leigusáttmálan í 25 ár. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 150/22 Umsókn um at seta 24 m høga mastur upp á Hjalla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2021 | 240/21 | 21/04566-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 325/21 | 21/04566-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.01.2022 | 13/22 | 21/04566-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 150/22 | 21/04566-2 |

**Upprunin til málið**
FT net søkir um at fáa eina mastur upp við vendiplássið á Hjalla

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at seta nýggja 24 m mastur upp á nýtt fundament. Við síðuna av verandi tøknihúsi.
FT- net vil til einhvørja tíð tryggja sær, at stráling frá radiobylgjum, til har fólk uppiheldur sær, er innan fyri tey mørk, ið eru ásett av heims heilsustovninum WHO (ICNIRP).
Hetta eru somu markvirðir, ið eru galdandi í Danmark.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í B7 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
FT net má gera leigusáttmála av lendi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið hjá øðrum deildum til viðmerkingar ella til grannakunning.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at senda málið til grannakunning og at ganga umsóknini á møti, um eingi mótmælisskriv koma, umframt at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við leigu av øki til mastur og fundament.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Viðmerkingar eru komnar frá einum granna, sum viðmerkir um strálur frá antennunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, treytað av at strálingin heldur seg innanfyri tey markvirði, sum WHO setir, og at kommunan kann krevja, at Net kannar markvirði, tá masturin er sett upp, umframt at Net vil loyva øðrum veitarum at nýta mastrina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Brúksavtala verður gjørd sum er galdandi í 9 ár. Í hesum 9 ára tíðarskeiði kann brúksavtalan ikki sigast upp av eigara. Eftir hetta kann brúksavtalan uppsigast við ½ árs varningi. Sí j.nr. 21/04566-10.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at samtykkja brúksavtalu sí j.nr. 21/04566-10

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 151/22 Dagføra mastur Inni á Gøtu, matr. nr. 1ob, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2021 | 239/21 | 21/04572-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 326/21 | 21/04572-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.01.2022 | 14/22 | 21/04572-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 151/22 | 21/04572-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn er komin frá FT net um at seta nýggja 18 metrar mastur upp inni á Gøtu, norðan fyri núverandi mastur, sum stendur har.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at seta nýggja 18 m mastur upp á nýtt fundament, sum eisini hevur pláss fyri 2 tøkniskápum á leið HxBxD: 190x90x90 cm. Masturin verður sett upp við síðuna av verandi mastur, ið eigarafelagið eigur. Masturin hjá eigarafelagnum er ikki longur tíðarhóskandi til framtíðar krøv til teleútgerð, sum fevnir um meira útgerð í mastrina og krøv til styrki av fundament og mastur.
Mastur og fundament verða gjørd sterk, so tey klára tað harða føroyska veðurlagið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 í 3. grundumráði í Almennu Byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsing frá umsitingini**
FT- net vil til einhvørja tíð tryggja sær, at stráling frá radiobylgjum, til har fólk uppiheldur sær, er innanfyri tey mørk, ið eru ásett av heims heilsustovninum WHO (ICNIRP).
Hetta eru somu markvirðir, ið eru galdandi í Danmark.
Verandi mastur hjá eigarafelagnum verður standandi. So har verða 2 mastrar á økinum.
Málið hevur ikki verið til grannakunning
FT net má gera leigusáttmála av lendi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Hevur ikki verið á øðrum deildum ella grannakunning

**Skjøl**
21/04572-1 tekning

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at senda málið til grannakunning og at ganga umsóknini á møti, um eingi mótmælisskriv koma, umframt at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við leigu av øki til mastur og fundament.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Viðmerkingar eru komnar frá einum granna, sum heldur at tað er nokk við einari mastur á staðnum, at fleiri mastrar kunnu geva óljóð, at masturin fer at skugga fyri sólini, og at tað verður stráling frá antennunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, treytað av at bert ein mastur verður á staðnum, sum allir veitarar kunnu brúka, at strálingin heldur seg innanfyri tey markvirði, sum WHO setir, og at kommunan kann krevja, at Net kannar markvirði, tá masturin er sett upp.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Brúksavtala verður gjørd sum er galdandi í 9 ár. Í hesum 9 ára tíðarskeiði kann brúksavtalan ikki sigast upp av eigara. Eftir hetta kann brúksavtalan uppsigast við ½ árs varningi. Sí j.nr. 21/04572-10.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at samtykkja brúksavtalu sí j.nr. 21/04572-10

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 152/22 Keyp av kommunalari ogn at leggja afturat 1230c, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.05.2022 | 48/22 | 22/01974-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 141/22 | 22/01974-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 187/22 | 22/01974-5 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 152/22 | 22/01974-5 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur frá eigarum á matr.nr. 1230c.

**Lýsing av málinum**
Kommunan hevur fingið eina umsókn um at keypa eitt øki á áleið 240 $m^2$ av matr.nr. 1230d, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, at leggja afturat matr.nr. 1230c, sum umsøkjarin eigur.

Í 2011 keypti eigarin lendið frá Tórshavnar kommunu til nýggjan atkomuveg til húsini á Írarók 1. Keyparin valdi ikki at fylgja upprunaligu vegætlanini men valdi at grava og leggja veg á lendið hjá Tórshavnar kommunu og Landsverk.

Umsøkjarin hevur eftirfylgjandi fleiri ferðir søkt um keyp av øki av matr.nr. 1230, tí umsøkjarin ynskir meir pláss at venda og parkera á.
Tekniska deild hevur gjørt koyrikurvar, ið vísa at tað ber til at venda á núverandi grundstykki, við einum 4,8 m longum bili. Víst verður til j.nr. 20/04028-12.

Umsóknirnar eru partvís gingnar á møti. Umsøkjarin hevur ikki fingið loyvi til at koma nærri vegnum enn 4 m. Hetta fyri at tryggja vegkassan og fyri at seinni kunna breiðka vegin oman frá Oyggjarvegnum.

Umsøkjarin hevur uttan loyvi grivið seg inn á økið, ið søkt verður um.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðisparti A1 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn.

Høvuðsreglan viðvíkjandi sølu av kommunalari fastogn er, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast, uttan so at ognin hevur verið boðin út alment, sbrt § 44, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 2000 um kommunustýri.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Viðmerkingar frá Teknisku deild**
Umsøkjarin er biðin um at útvega Tórshavnar kommunu tekningar, sum vísa hvussu ætlaði koyrivegurin rundan um húsini fram við Hjaltarók verður gjørdur, serliga við atliti til hvussu verandi vegkassi ikki skalast av hesum arbeiði. Hetta er ikki fingið kommununi til vega, men mett verður, at keypið av kommunalum lendi kortini kann fremjast. TK hevur áður ikki gingið umsóknini um keyp av lendi til hetta endamálið á møti vegna manglandi vitan um, hvussu kommunan framyvir ferð at skipa ovasta part av Hjaltarók. Hetta er nú gjørt, og vísir hetta, at vegøkslin fram við ognini hjá umsøkjaranum ikki kemur at broytast munandi. Tað er tó av týdningi fyri kommununa, at hava ræði á lendinum fram við vegnum, og ein ítøkilig meting av tørvinum her er 1,5 m. Hetta gevur umsøkjaranum 2,92 m úr sínum húsahorni niðan móti Hjaltarók, har tað er smalast. Hetta ger, at økið, sum TK kann selja umsøkjaranum, verður 225 $m^2$ heldur enn uml. 240 $m^2$.
Hóast lendið verður selt umsøkjaranum, vil umsitingin leggja dent á, at møgulig verkætlan hjá umsøkjaranum fram við Hjaltarók, skal góðkennast av kommununi, fyri at tryggja, at skaði ikki verður gjørdur á vegkassan.

Av tí at ovasta strekkið av Hjaltarók er bundið í Oyggjarvegin, sum er landsvegur, verður tað mett sum treyt, at møgulig samtykt at selja umrødda økið er treytað av at Tórshavnar kommuna yvirtekur henda partin av Oyggjarvegnum.

**Viðmerkingar frá Stjórnarskrivstovuni**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*2003-0270* Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr.nr. 1230c, Tórshavn
*2009-3015* Umsókn um at leingja verandi veg longur inn á Írarók 1, Tórshavn
*16/04567* Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr. 1230d og 1230c, Tórshavn
*20/04028* Umsókn um keyp av økið at leggja afturat matr.nr. 1230d, Írarók 1, Tórshavn
*21/01304* Ólóglig bygging – útgrevstur á kommunalari ogn matr.nr. 1230d, Írarók 1, Tórshavn

**Skjøl**
J.nr. 22/01974-1 Víðkan av stykki 240 m$^2$.pdf
J.nr. 20/04028-12 Írarók 1 – Koyrikurvar 4,8 m.pdf
J.nr. 22/01974-6 Ætlan mai 2022-yvirlitsplanur TK.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at selja umsøkjaranum lendi, sum víst í skjali J.nr. 22/01974-6 Ætlan mai 2022-yvirlitsplanur TK.pdf, treyta søluna av, at Tórshavnar kommuna yvirtekur Oyggjarvegin frá Hotel Føroyum oman í Norðara Ringveg og beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmlælinum.

**Ískoyti:**

Um fíggjarnevndin tekur undir við at selja umsøkjaranum lendið, mælir kommunustjórin býráðnum til at selja lendið fyri 2.000 kr.m2, sum er samsvarandi tí fermeturprísi, sum kommunan hevur keypt lendi frá privatum eigarum, í samband við breiðkan av Landavegnum og Marknagilsvegnum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at sejla umsøkjaranum lendið fyri 2.000 kr./m² og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 153/22 Umsókn til ummælis um sundurbýti av matr.nr. 255b, Undir Kongavarða, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2022 | 130/22 | 22/02075-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 166/22 | 22/02075-3 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 153/22 | 22/02075-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Umhvørvisstovuni og Eigarafelagnum Undir Kongavarða.

**Lýsing av málinum**
Umhvørvisstovan biður kommuna um ummælið at sundurbýta matr.nr. 255b, undir Kongavarða, Argir.

Eigarafelagið Undir Kongavarða hevur heitt á Umhvørvisstovuna um at fáa matr.nr. 255b, sundurbýtt í sambandi við at P/f Fjarhitafelagið yvirtók hitamiðstøðina undir Kongavarða. Økið, ið ynskist frábýtt er áleið 545 fermetrar til støddar.

Í somu umbøn ynskir eigarafelagið at keypa áleið 315 fermetrar av kommunalari ogn at leggja afturat økinum við hitamiðstøðina.

Víst verður til *J.nr. 22/02075-1 Kort sundurbýti 255b, Argir.pdf*, ið vísir bæði ynskta sundurbýti og økið, ið eigarafelagið ynskir at keypa.

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn*

Høvuðsreglan viðvíkjandi sølu av kommunalari fastogn er, at føst ogn hjá kommununi ikki má seljast, uttan so at ognin hevur verið boðin út alment, sbrt § 44, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 2000 um kommunustýri. Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um:

1. sølu til landsmyndugleikar, kommunu ella kommunalan felagsskap, sbr. § 57 í kommunustýrislógini,

2. sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,

3. sølu av økjum, ið eru minni enn 300 m² til víddar og sum tað ikki sjálvstøðugt kann verða bygt á ella

4. kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan ásettum reglum.
Stk. 2. Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um alment útboð í sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð, sambært §§ 2, stk. 2 – 4.

*Almenna byggisamtykt*
Økið liggur í A3 í 3.grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin mælir til at viðmæla sundurbýti av matr.nr 255b sum víst á kortskjal *j.nr. 22/02075-1 Kort sundurbýti 255b, Argir. pdf.* Soleiðis at hitamiðstøðin og økið rundan um verður frábýtt.

Viðmælið er treytað av, at tinglýst verður á frábýttu ognina at:

1) ánarar av leiðingum, ið liggja í økinum, til ein og hvørja tíð skulu kunna fáa atgongd til leiðingar um tørvur er á hesum.

2) Gøtan liggur opin fyri almennari ferðslu, soleiðis sum matrikulkortið vísir og átalurætt á gøtuni hevur Tórshavnar kommuna.

Umsitingin heitir á Fjarhitafelagið um at søkja um keyp av kommunalari ogn av nýggjum, tá frábýtta økið er yvirtikið, tí søla av yvir 300 fermetrum skal bjóðast alment út.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at viðmæla sundurbýtinum av matr.nr. 255a, Argir, treytað av, at tinglýst verður á frábýttu ognina, at:

1) Ánarar av leiðingum, ið liggja í økinum, til ein og hvørja tíð skulu kunna fáa atgongd til leiðingar um tørvur er á hesum.

2) Gøtan liggur opin fyri almennari ferðslu, soleiðis sum matrikulkortið vísir og átalurætt á gøtuni hevur Tórshavnar kommuna.

Og at beina málið um sølu, av áleið 315 fermetrum av kommunalari ogn í fíggjarnevndina, vísandi til *Kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn.*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla til at selja 299 $m^2$.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at selja lendið fyri kr. 89 kr.m2, sum er sami prísur sum kommunan keypti lendið fyri frá Búnaðarstovuni sambært skeyti dagfest 14.07.2017.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 154/22 Broyting av Serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 140/22 | 22/02915-4 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 154/22 | 22/02915-4 |

**Upprunin til málið**
Byggiloyvi hevur verið givið til tilbygning til Nólsoyarstovu matr.nr. 50, Gongin 10, Tórshavn.
Í sambandi við kæru av byggiloyvinum hevur Føroya Kærustovnur avgjørt at ógilda avgerðina um byggiloyvið til tilbygningin. Føroya Kærustovnur mælir til, at byggisamtyktin verður tillagað soleiðis, at bygningurin kann verða játtaður.

Gongdin í málinum:

23. mars 2020 móttekur Tórshavnar kommuna umsókn um byggiloyvi til endur- og umbygging av Nólsoyarstovu matr. nr. 50, Gongin 10, Tórshavn.
Umbyggingin inniber, at verandi tilbygningur á vestursíðuni verður fluttur 1,6 m norðureftir og smalkaður við 60 cm. Víddin verður óbroytt, men ein hædd verður løgd afturat, og kjallarin undir tilbygninginum grivin út til fulla hædd.

30. apríl 2020 gevur kommunan niðurrívingar- og útgravingarloyvi til at taka verandi tilbygning niður, at grava út eystanfyri Nólsoyarstovu, undir tilbygninginum, har ein gomul grund/kjallari er, og at brekka betonggólvið í kjallaranum í Nólsoyarstovu. Hetta arbeiði var treytað av, at Tjóðsavnið fylgdi arbeiðinum.

25. mai 2020 verður byggiloyvi til tilbygning á vestursíðuni útskrivað.

27. august. 2020 verður byggiloyvið kært til Føroya Kærustovn, og samtykti Kærunevndin í lendismálum tann 10. desember 2020 at heimvísa málið til nýggja viðgerð.

25. januar 2021 bleiv avgjørt á fundi, at koyra málið umaftur, soleiðis sum Kærunevndin í lendismálum hevði sett fram krav um.

8. juni 2021 verður nýtt byggiloyvi játtað, við treytum um, at húsasíður, ið eru nærri øðrum húsum enn 4 m, skula verða eldverjuveggur (BS-bygningsdel 120), og at vindeygu nærri øðrum húsum enn 4 m verða við brandgarðin sum bæði verja fyri eldi og royki.

29. oktober 2021 verður byggiloyvið enn einaferð kært til Føroya Kærustovn.

28. apríl 2022 avgerð Føroya Kærustovnur, kærunevndin í lendismálum, at ógilda avgerðina um byggiloyvið til tilbygning til Nólsoyarstovu.
Avgerðin er grundað á, at kærunevndin í lendismálum ikki metir, at frávikini eru heimilað eftir galdandi ásetingum fyri økið.
Til síðst vísir kærunevndin í lendismálum enn einaferð á, at um Tórshavnar kommuna ynskir at játta byggingini, hevur kommunan møguleika at tillaga byggisamtyktina ella gera eina serstaka byggisamtykt fyri ognina.

Sostatt søkir Tórshavnar kommuna um loyvi til at gera tillaging í Serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna, soleiðis at byggingin kann verða játtað.

**Lýsing av málinum**

Upprunaliga var tað bert eindin A1 í serstøku byggisamtyktini nr. 4, ið var tilætlað til bústaðaendamál, har matr.nr. 50, Gongin 10, Tórshavn var partur av eind A1.

Broytingin inniber at matr.nr. 50 verður broytt til at vera eind A2, og sum eisini skal vera til búðstaðarendamál. Eindin A2 verður tillagað eftir verandi bygningi á matriklinum. Bygningurin, “Nólsoyarstova”, sum er nógv størri í vavi enn øll onnur hús á Reyni, var bygdur, áðrenn Serstaka byggisamtyktin nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina var gjørd. Tí verður mett, at fyri at kunna gera broytingar, sum eru nútíðarhóskandi, bæði til bústaðir og til útvent virksemi, er neyðugt at tillaga serstøku byggisamtyktina fyri økið.

Broytingin verður gjørd í sambandi við umsókn um byggiloyvi til endur- og umbygging av Nólsoyarstovu, mál: 20/01099.

Økið í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina verður sundurbýtt í eindirnar A1, A2, C1, C2, C3, C4, D1, D2, E og F.

<u>Eindirnar A1 og A2: Bústaðaendamál</u>

Eindirnar A1 og A2 skula bert verða nýttar til bústaðaendamál, og byggingin skal vera einans stakhús, ið standa fyri seg.

Á hvørjari ogn kunnu bert verða bygd eini sethús til eitt húski hvørt, undantikin er eindin A2, har tað kann verða bygt eitt hús til trý húskir.

Í A2-økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafé, matstova, handil, v.m.

<u>Eind A2</u>

a. Dámurin í hesum øki skal varðveitast mest møguligt, hvat ið viðvíkur byggihátti, húsastøddum, gróðuri o.ø. Serstakan týdning hevur hetta fyri teir partar, sum strikumerktir á fylgiskjali I.

b. Byggistigið kann ikki fara upp um 0,53 umframt 5 $m^2$ teknikrúm í kjallara, sum bert kann nýtast í tí parti av kjallara, ið er undir jørð. Nýtslustigið kann ikki fara upp um 2,16.

c. Tá endurbygt verður, skal, um tað er gjørligt, byggjast við somu umvídd og á sama stað sum tey niðurtiknu húsini.

d. Tá bygt verður uppí, skal fyriskipanin í b. haldast.

e. Húsini kunnu ikki gerast við meira enn trimum hæddum umframt kjallara. Hartil kunnu húsini bert gerast við sløttum taki við rekkverki omaná.

Hægsta punkt við útvegg má ikki vera hægri enn 12 m, tað er frá yvirkanti á kjallaragólvi til yvirkant á tekju. Harafturat kann rekkverk, trappurúm og hjallur á tekjuni framhaldandi vera.

h. Ikki er loyvt at byggja bilskúrar á ognini.

k. Úthús og onnur tílík smáhús skulu ikki vera størri í vídd enn 10 $m^2$.

l. Hús til bústaðir skulu ikki standa grannamarki nærri enn 2m ella nærri øðrum húsum enn 4 m, uttan so at húsasíður millum bygningarnar eru úr tilfari, ið ikki tekur við eldi.

m. Leiðingarløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum er sýnd á fylgiskjali III, ið liggur til skjals á býarverkfrøðingarskrivstovuni.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og í komandi eind A2 í Serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna.

**Upplýsingar frá umsitingini**
- Grundøkið matr.nr. 50, Tórshavn, er 236 $m^2$ til víddar.
- Ábygt er bygningur í trimum hæddum umframt kjallara.
- Byggistigið verður óbroytt 0,53. Mest loyvda er 0,5.
- Verandi nýtslustig v/kjallara er 1,9. Komandi nýtslustig verður 2,16.
- Varðveitingarvirði 2-3 er høgt sambært Tórshavnar býaratlasi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
- 22/02915-1 Tillaga "Serstøk byggisamtykt nr. 4 fyri Tinagnes og gomlu Havnina, Tórshavnar kommuna." matr.nr 50, Gongin 10.
- 21/04658-20 Avgerð hjá Kærunevndini í lendismálum frá fundi 28. apríl 2022.
- 20/03212-17 Avgerð hjá Kærunevndini í lendismálum frá fundi 10. desember 2020.
- 22/02915-5 broyting av kortið tilhoyrandi Serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinagnes og gomlu Havnina.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ja ☐ Nei ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til, at eind A í serstøku byggisamtykt nr. 4 verður broytt sambært skjali 22/02915-1 soleiðis, at partur (matr.nr. 50) av eind A verður broyttur til at vera eind A2 og restin til eind A1.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 155/22 Umsókn um broytan av byggisamtyktini á matr. nr. 8a og 8d, Kirkjubø í sambandi við verkætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 153/22 | 22/02516-3 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 155/22 | 22/02516-3 |
| 3 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | | | 22/02516-3 |

**Upprunin til málið**
Kongsbóndaparið í Kirkjubø hava í eina tíð arbeitt við eini verkætlan um uppskot til ferðavinnubygning í Kirkjubø, og hava nú søkt kommununa um at tillaga byggisamtyktina í mun til hesa verkætlan.

**Lýsing av málinum**
Í eina tíð hevur verkætlanin um uppskot til ferðavinnubygning í Kirkjubø verið í umbúnað. Ætlanin er, at ferðavinnubygningurin skal kunna taka ímóti ferðafólkum (bæði útlendingum og føroyingum), ið koma til Kirkjubøar.
Nýggi bygningurin kemur at húsa, café/veitsluhølum, framsýning, stórkøki, starvsfólkarúmi, vesum, billettsølu, sølu av ferðaminnum v.m., og eisini inngongd til Fjósið.

Í stuttum kann nevnast:
Tað er umráðandi, at bygningurin leggur seg undir verandi bygningar og letur søguligu bygningarnar koma fram. T.v.s. at tá mann kemur koyrandi til staðið, skal kirkjubøgarður, múrurin, kirkjan og fjósið vera tað, sum sæst burturúr beinanvegin.

Enn er ætlanin á byrjunarstøði, men ráðgevarnir, Arkitektar99, sum arbeiða saman við bóndaparinum, hava sett verkætlanina soleiðis saman, at hesir táttar verða stýrandi fyri byggingina:
- at seta bygningin so lágt sum gjørligt í lendið.
- Partar av bygninginum verða lagdir undir jørð.
- Ovara hæddarmark er verandi bussskýli/bygningur (sum er uml. 4 m høgt).

Sí viðheftu 22/02516-4, Ferðavinnubygningur í Kirkjubø_yvirskipað ætlan, sum sýnir greiningar av økinum, eina ávegis byggiskrá og uppskot til bygning.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið, sum ætlanin er at byggja á, liggur partvís í J-øki og H-øki í serstøku byggisamtyktini fyri Kirkjubø og Velbastað.

Ásetingar fyri øki H: Frílendi
1. Frílendi, t.e. bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.
2. Á teim í 1. stk. fyrr nevndu økjum mugu bert verða gjørdir vegir, gøtur, bilstøðlar, veitingar, garðar o.t. Á teimum einstøku økjunum kunnu verða reistir bygningar, sum skila til virðið á økinum.
3. Loyvi kann gevast til at byggja einstøk úthús, sum eru neyðug fyri raksturin av garðsbrúkinum, t.d. seyðahús, og uppdyrkingarvegir kunnu gerast, tá nýtingarætlan er gjørd og góðkend fyri eitt náttúrligt avmarkað størri øki.
4. Útstykking má ikki fara fram.

Ásetingar fyri øki J: Bóndahús
1. Øki verður lagt av til bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og bert er loyvt at hava eini sethús til hvørt festi.
2. Sethúsini skulu annars lúka somu treytir, ið eru galdandi fyri øki B.

3. Útstykking má ikki fara fram.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at enn eru fleiri viðurskiftir, sum eiga at verða nágreinaði nærri.

- Tá verkætlanin av fyrstan tíð kom inn til kommununa, umrøddi kommunan ætlanina við Tjóðsavnið, grundað á at ætlanin er at byggja í einum, tí mest søguliga og fornfriðaða økinum í Føroyum. Tjóðsavnið hevði tá nakrar viðmerkingar, og upplýsir umsøkjari, at tey hava umrøtt ætlanina við Tjóðsavnið. Kommunan kundi hugsa sær at hoyrt Tjóðsavnið, soleiðis at ætlanin verður í tráð við ætlanirnar hjá Tjóðsavninum í økinum, og soleiðis at byggingin kemur at stuðla upp undir økið og ikki kemur at oyðileggja hetta serliga økið í Føroyum.
- Somuleiðis verður mett ráðiligt, at hoyra Búnaðarstovuna um ætlanirnar og harvið tryggja okkum, at eigarin av lendinum tekur undir við verkætlanini.

Kommunan hevur ikki hoyrt hesar partar enn, og verður mett neyðugt at hoyra hesar partar, áðrenn broytingin av byggisamtyktini fer til hoyringar.

Umsitingin metur somuleiðis, at rættast er at broyta ætlaða byggiøkið til eitt vinnuøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø, í staðin fyri at gera eina serstaka byggisamtykt, sum ráðgevin annars søkir um.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/02516-4, Ferðavinnubygningur í Kirkjubø_yvirskipað ætlan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ætlaða byggiøkið verður broytt til vinnuøki í byggisamtyktini fyri Kirkjubø, treytað av at Búnaðarstovan og Tjóðsavnið taka undir við ætlanini, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 156/22 Keyp av traðum til framtíðar útstykkingar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2022 | 126/22 | 22/01898-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 165/22 | 22/01898-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 156/22 | 22/01898-1 |

**Upprunin til málið**
Í Kommunuætlanini og í bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu verður mælt til, at fleiri bústaðir verða gjørdir í kommununi.

Tórshavnar kommuna hevur herfyri boðið tveir kommunalar matriklar við Villingadalsvegin út í alment útboð við tí treyt at tað verða bygdar lutaíbúðir. Kommunan kann gera sítt fyri at stýra planeggingini ávísar vegir við at útleggja lendir til ávís endamál, t.d. til bústaðarbygging. Nógvir óbygdir matriklar eru í júst hesum økinum og kundu við fyrimuni inngingið sum ein partur av einum framtíðar bústaðarøki við Villingadalsvegin, sí *Kortskjal 1 - uppskot til keyp av lendi.* Allir matriklarnir eru tó ikki ogn hjá Tórshavnar kommunu og um hetta skal gerast til veruleika, skal eitt samskifti og ein tilgongd um keyp av lendi setast í verk.

**Lýsing av málinum**
Talan er um matr. 1357b (Eystara Húsagarðsfesti), 1235a (privatur eigari) 1378 (privatur eigari), 1377a (Eystara Húsagarðsfesti).

Matrikul 1374, har inntakið til tunnilsmunnan til innkomuvegin verður, er sambært avtaluni um stuðul frá landinum til innkomuvegin handaður Tórshavnar kommunu.

Lendið fram við Villingadalsvegnum er í stórari menning, við nógvum bústøðum í gerð.
Serliga eru tað stór sethús við egnum urtagarði, ið seta sín dám á verandi bygda øki. Eisini eru nøkur tvíhús í økinum, men staðfestast kann, at størsti parturin av samlaðu bústøðunum eru eigarabústaðir. Um kommunan keypir nevndu matriklar, er møguleiki fyri at útbyggja hesi til eina fjølbroytta bústaðarsamanseting, soleiðis at ein breiðari borgaraskarði kann búseta seg her.

Økið liggur í umráðisparti A3, ið loyvir bygging av blandaðum bústaðarsløgum. Hendan áseting loyvir sethúsa, raðhúsa-, tvíshúsa- og íbúðarbygging umframt loyvi til at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Talan verður um heilt nýggjar býlingar, ið koma at liggja fyri endan á Villingadalsvegnum, har møguleikin fyri at gera økið við blandaðum bústaðar- og mistaðarfunktiónum verður til staðar.

Óbygdu matriklarnir liggja fyri endan av Villingadalsvegnum. Í verandi løtu er ein grúsvegur inn til økið, sum ikki er ein góðkendur atkomuvegur, umframt hetta skulu tekniskar leiðingar leggjast inn til matriklarnar og eftirkannast um verandi reinsiverk klárar at móttaka ein heilt nýggjan býling. Hetta er ábyrgd hjá Tórshavnar kommunu. Vanligt hevur verið, at verkætlanir fíggja hesar útreiðslur. Lutaíbúðarverkætlanin kemur væntandi at fíggja ein part av atkomuvegnum og teknisku leiðingum, og vildi tað við fyrimuni verið skynsamt at býtt hesar útreiðslur millum fleiri verkætlanir í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

Tekniska deild upplýsir, at góðkend vegatkoma skal gerast til stykkini umframt at verandi kloakk skal eftirkannast, tí hon er ikki dimensjonerað til at móttaka nógv meiri enn tað hon ger í dag. Tó kann hugsast, at leiðingarnar frá nýggju býlingunum kunnu býtast millum verandi leiðingar í økinum, og at reinsiverkið kann útskiftast til eitt størri.

**Skjøl**
Kortskjal 1 - uppskot til keyp av lendi

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar og eina tilgongd við eigarar av matr. 1357b, 1235a, 1378, 1377a um keyp av lendi
- at heimila umsitingini at fara undir kanningararbeiðið av vegatkomu og tekniskum leiðingum í økinum í mun til broytingar og kostnað
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at hon heldur, at umhvørvisáringskanningar eiga at verða gjørdar av lendinum, áðrenn avgerð verður tikin um at fara undir eina keypstilgongd.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

## 157/22 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 102/22 | 22/01377-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 33/22 | 22/01377-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 154/22 | 22/01377-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 20.06.2022 | 50/22 | 22/01377-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 186/22 | 22/01377-1 |
| 8 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 157/22 | 22/01377-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur eftirspurningur er á vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu. Býarskipanarliga er í fyrstu atløgu skilabest at víðka um verandi vinnuøkir, áðrenn farið verður undir at staðseta nýggj økir, hetta fyri at gagnnýta lendið og savna virksemið á einum stað, umframt at infrakervi, leiðingar v.m. longu er á staðnum.

Í løtuni hevur kommunan ongi vinnustykkir á sølulista. Víst verðir á økið omanfyri á Hjalla sum eina eyðsædda nýggja vinnuútstykking, tí hetta økið byggisamtyktarliga longu er eitt vinnuøki, men eisini tí at økið liggur tætt við aðra vinnuútstykking.

**Lýsing av málinum**
Linjuføringin av innkomuvegnum er nú endaliga løgd, og umsitingin mælir til, at leggja eina útstykking sunnan fyri vegin norðan fyri Stórutjørn, sí kortskjal *Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.*

Umsitingin hevur í longri tíð arbeitt við at skipa Stórutjørn sum nýggjan býling við bústøðum, stovnum, ítróttarøki, grønum økjum og lættari vinnu. Arkitektakapping varð hildin í 2020 og í mars 2022 varð ráðgevarasáttmáli undirskrivaður um skipanina av Stórutjørn. Millum økið við Stórutjørn og Vinnuútstykkingina á Hjalla liggur økið Ovari Skarðshjalli. Tað er hetta økið, sum umsitingin mælir til skal gerast til eina nýggja vinnuútstykking í kommununi.

Í sambandi við at Eysturoyartunnilin varð gjørdur, og Tunnilsfelagið hevði til ábyrgd at gera veg til tættasta innkomuveg, so varð vegur gjørdur frá rundkoyringini og allan vegin niðan á hamaran og verður eftir ætlan knýttur í innkomuvegin. Í løtuni er  innkomuvegurin í útboði til í fyrsta umfari at gera ein arbeiðsveg allan vegin yvir í Villingadalin. Nýggja vinnuútstykkingin bindir beinleiðis í innkomuvegin, og gerst íbindingin sostatt fyrsta íbindingin norðast á strekkinum.

Umsitingin mælir til, at nýggja vinnuútstykkingin verður ætlað til vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Hetta er bæði grundað á, at tað er týdningarmikið, at vinnan ikki ávirkar býlingsmenningina á Stórutjørn, umframt at mett verður at stórur tørvur er á vinnugrundstykkjum í hesum umhvørvisflokkunum. Lagt verður tí upp til at útleggja vinnuústykkingina sum B4-øki í almennu byggisamtyktini, ið umfatar vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Undir lógir og ásetingar sæst lýsing av umhvørvisflokkunum 2-4.

Tá útstykkingin verður skipað, er tað umráðandi at skipa staðsetingina av virkjunum í mun til vinnuflokkarnar, soleiðis at bústaðarøkið hevur minst møguligan ampa av virkjunum og virkseminum. T.d

kundu virkini verið lagað eftir, at tann tyngra vinnan verður staðsett oman móti Skarðshjalla og tann léttara vinnan oman móti ítróttarøkinum og bústaðarøkjunum á Stórutjørn.

Ein leyslig meting av projekteringini fram til høvuðsprojekt liggur á uml. kr. 2 mió. kr. Um farið verður undir at projektera nú í vár, so verður mett, at útstykkingin er klár at bjóða út til arbeiðstakara longu í heyst. Mett verður, at útstykkingin kann verða liðug í 2023-24.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu

*Flokkur 2*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til smávegis ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstaðir og starvstovur. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 20 metur.*

*Flokkur 3*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt umhvørvi, serliga orsakað av uttandura aktiviteti og kunnu staðsetast í ídnaðarøki ella í randarøki, sum minni dálkandi virkir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga virkir sum hava tænastuvirksemi, t.v.s. handverkstaðir, maskinvirkir og bensinstøðir. Minsta frástøðan til bústaðir fyri henda flokk er 50 metrar.*

*Flokkur 4*
*Umfatar virkir, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey léttastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kunnu staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir, klædnavirkir og bilverkstaðir við sproytukabinu. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 100 metrar.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Neyðugt verður at broyta byggisamtyktina í sambandi við gerð av útstykkingini, og tí verður mælt til at fara undir hesa broyting skjótast.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03588 Nýggj útstykking til vinnustykkir. Umhvørvisflokkur 3 til 7.
18/03468 Skipan av Stórutjørn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/01377-2 Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

Í málinum 18/03468 Skipan av Stórutjørn varð á býráðsfundi 24.03.2022 samtykt at játta fígging til keyp av lendinum til vinnuútstykkingina, umframt at játta fígging til projektering av vinnuútstykkingini. Tískil verður ikki neyðugt í hesum málinum at fáa fígging til hesi viðurskiftir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við ráðgeva um projektering av vinnustykkjunum á Ovara Skarðshjalla
- at heimila umsitingini at bjóða útstykkingina út, tá projekteringin er liðug, og at gera sáttmála um arbeiðstøkuna.
- at fara undir at broyta byggisamtyktina fyri økið til eitt B4-øki
- at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri viðmerking, at sáttmálin um arbeiðstøkuna verður at leggja fyri aftur avvarðandi nevndir.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at Articon skal gera arbeiðsvegin hjá Innkomuvegnum, sí mál 21/02196, er møguleiki at fáa avgrivið økið til vinnustykkir, ið kommunan hevur ognað sær at útstykkja til vinnustykkir, sí mál 18/03468, við at víðka arbeiðstøkuna av arbeiðsvegnum. Av tí at økið er stórt, uml. 150.000 $m^2$, vísa ávegis metingar, at tað vil kosta áleið 23 mió. kr., og er hesin kostnaður grundaður á eindarkostnaðir hjá arbeiðstakaranum í verandi sáttmála, at gera arbeiðsvegin til Innkomuvegin.

Óvissurnar í sambandi við støðuna í heimunum gera, at mett verður, at møguleikin er stórur fyri, at kostnaðurin kann hækka munandi næstu tíðina. Tí verður somuleiðis mett, at tað er ein fyrimunur fyri Tórshavnar kommunu, at partar av arbeiðinum at fyrireika vinnustykkini kunnu gerast fyri áður givnar eindarkostnaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Articon at fáa grivið økið av, ið er lagt av til vinnustykkir, soleiðis at allur avgrevstur verður grivin av, og yvirskotið verður koyrt niðan til bóndan.
- at játta 23 mió. kr. av kontu 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldið Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum.
- at beina málið í býráðið, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina, til tvær viðgerðir, tí talan er um eykajáttan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at heimilað verður umsitingini at gera avtalu við Articon sambært tilmælinum og við somu eindarkostnaðum sum eru nýttir í verandi sáttmála um arbeiðsvegin til innkomuvegin

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 158/22 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki við Stórutjørn, partur av matr. nr. 139a og 135ed, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 151/22 | 22/02687-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 158/22 | 22/02687-1 |

**Upprunin til málið**
Innkomuvegur er í gerð, projektering av vinnuútstykking er ígongd, skipanaruppskot av Stórutjørn verður í skrivandi stund teknað og stórhøll fyrireika. Býarmenningin í Hoyvíkshaganum gongur við fullari ferð, og í hesum sambandi er Tórshavnar kommuna í tilgongdini at keypa part av haganum hjá festara í økinum.

**Lýsing av málinum**
Fylgjandi tekstbrot er býtt í tveir partar, ið hvør sær lýsa grundgeving fyri broyting av byggisamtyktini til trý ymisk endamál.

**Landbúnaður**
Í sambandi við keyp av parti av matr.nr.139a, ið er partur av festinum hjá bóndanum í Flatnahaga, er avtalað gjørd við bóndan um at lendið vestanfyri innkomuvegin skal broytast frá at vera A3 og D2 øki til at vera 4 grundumráði. Grundgevingin fyri avtaluni er soleiðis, at bóndin kann tryggja sær, at økið ikki kemur at liggja sum byggiøki og hervið sum ein partur av býarmenningini í Hoyvíkshaganum, men at hann framhaldandi kann brúka økið til landbúnað.

Ein býur, serliga ein høvuðsstaður, skal kunna rúma, ymsum áhugamálum og tískil tola slíkar neyðsemjur. Avtalan fer í verandi løtu ikki at ávirka tær ætlanir, sum fyriliggja (Stóratjørn, innkomuvegur, vinnuútstykking og Stórhøll), og um hetta skuldi broytst í framtíðini, verður mælt til at endurskoða avtaluna tá.

**Vinnuútstykking og stórhøll**
Eystan fyri innkomuvegin, í økinum har sum vegurin formar eitt innvik, eru ætlanir um at gera eina vinnuútstykking og eitt ítróttarøki til m.a. eina stórhøll.
Meiri nágreiniliga, skal nýggja vinnuútstykkingin liggja umleið har, sum verandi B8-øki er nú, tvs. sunnan fyri innkomuvegin og norðan fyri Stórutjørn.
Umsitingin mælir til, at nýggja vinnuútstykkingin verður útløgd sum eitt B4 øki í almennu byggisamtyktini, ið umfatar vinnu í umhvørvisflokki 2-4.

Hetta er bæði grundað á, at tað er týdningarmikið, at vinnan ikki ávirkar býlingsmenningina á Stórutjørn, umframt at stórur tørvur er á vinnugrundstykkjum í hesum umhvørvisflokkunum. Harumframt kunnu nýggjar vinnuútstykkingar vera við til, at verandi vinnuøki verða umskipað, soleiðis at at vinnuøkini blíva meiri samtíðarhóskandi.

Býurin er undir stórari menning og broyttur nógv seinastu árini. T.d. er vinnuøkið á Hálsi eitt økið, sum í dag tykist nógv tættari við býin, enn tað hevur gjørt. Býurin hevur ment seg rundanum økið, og hevði tað við teimum handlum, sum eru har í dag, hóskað væl sum eitt handilsøki, ið eggjar vitjandi at støðast. Tó krevur hetta eina umskipan av verandi virksemi umframt eina broyting í skipanini, t.d. við gongu og súkklubreytum. Harafturímóti er økið á Hjalla blivið eitt vinnuøki við blandaðari vinnu, hóast tað er útlagt til og hóskar best til tyngri vinnu.

Økið sunnanfyri ætlaðu vinnuústykkingina er økið, ið er ætlað stórhøll, og skal hetta økið tí eisini partvís broytast frá A3 til D2.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umráðisparturin A3 verður lagdur til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

Umráðisparturin B4 verður lagdur til at byggja hús til vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi. Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 1000 m$^2$. Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum. Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.
Eingi hús og eingin húsalutur má vera hægri enn 10 m.

Umráðisparturin B8 verður lagdur til at byggja hús til vinnuvirkir, herundir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt, og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi. Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu. Bygging skal verða sett samsvarandi heildarætlan fyri alt økið ella fyri hóskiligar partar av økinum. Byggistigið má ikki fara upp um 0,5. Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 13 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir verða hægri eftir nærri góðkenning býráðsins.

4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/02687-2 Áðrenn broyting
22/02687-2 Eftir broyting

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja broytingina sambært kortinum *Eftir broyting* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 159/22 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 72/22 | 22/00463-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 28.03.2022 | 3/22 | 22/00463-1 |
| 3 Havnanevndin | 05.04.2022 | 13/22 | 22/00463-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 144/22 | 22/00463-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 159/22 | 22/00463-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Flestu bygdirnar í kommununi hava sína egnu serstøku byggisamtykt, men Kollafjørður kemur undir ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini og mett verður, at tað skal hon framhaldandi gera, av tí at talan er um størstu bygdina í kommununi, ið er meira býarkend, og nær høvuðsstaðnum. Soleiðis verður tað í hesum málinum einans býarskipanin (kortið), ið verður endurskoðað, og ikki sjálvar ásetingarnar í byggisamtyktini. Ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini vórðu endurskoðaðar í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir.*

**Lýsing av málinum**
Tær flestu broytingarnar í býarskipanini í Kollafirði eru tillagingar, soleiðis at byggisamtykt og matrikulmørk fylgjast. Aðrar broytingar eru t.d. broyting av C3 miðstaðaøkinum við bátahylin við Sjógv, ið verður mælt til at broyta til B2 havnaøki, E neystaøki og A1 sethúsaøki, av tí at hetta verður mett at hóska seg betur til økið. Somuleiðis verður mælt til, at C1 miðstaðarøkið í Homrum verður broytt til eitt A1 øki, av tí at sethús eru í øllum hesum økinum.

Allar broytingar, og stutt viðmerking til broytingarnar, eru at síggja í skjalinum *Kollafjørður – broytingar*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kollafjørður er fevndur av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktum – almenna- og serstakar byggisamtyktir, journal nr. 17/02748.*
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum**
Broytingarnar fyri havnaøkini eru gjørdar í samráð við Havnaskrivstovuna.

**Skjøl**
- *Kollafjørður – broytingar,* journal nr. 22/00463-3.
- *Kollafjørður – áðrenn broyting,* journal nr. 22/00463-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð smb. skjalinum *Kollafjørður – broytingar*, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ynski, at víðka neystaøkið úteftir undir matr. nr. 329 og at fáa samtyktu broytingina við matr. nr. 47 við, umframt at broyta part av matr. nr. 257c, sunnan fyri verandi havnaøki, til vinnuøki.

**Kollafjarðarnevndin 28. mars 2022:**
Staðbundna nevndin mælir til fylgjandi tillagingar:
- Broyting 1 í B2 øki: Nevndin ynskir ikki, at økið verður broytt til havnaøki og ynskir at økið verður eitt trivnaðarøki.
- Broyting 4 í B2 øki: Nevndin mælir til, at økið verður broytt til eitt vinnuøki, umframt at vinnuøkið verður víðkað til kaikantin.
- Taka undir við at broyta part av matr. nr. 257c til vinnuøki og víðkast til at fevna um økið, ið ikki er asfalterað.
- Nevndin tekur undir við hinum broytingunum.

**Ískoyti frá Tórshavnar havn**
Víst verður til samtyktina í Byggi- og býarskipanarnevndini hin 7.mars 2022 um ynski at broyta part av matr. 257 C til vinnuøki (økið sunnanfyri asfalteraða og innhegnaða økið).
Økið er partur av havnaøkinum á Oyrareingjum. Havnaøkið minkar sostatt við umleið eini helvt og missir munandi av virði sínum sum havn, um nevndi parturin av økinum verður broyttur til vinnuøki.

Hóast hesin parturin av havnaøkinum enn ikki hevur verið brúktur til havnarrelaterað virksemi, hevur tað tó sera stóran týdning fyri Tórshavnar havn sum ein framtíðar tilfeingisdepil í Norðurhøvum at hava eitt slíkt økið, ið er staðsett beint við eina djúphavn við góðari stórari rampu, tøkt at kunna bjóða fram til shippingvinnu av ymsum slag.

Tað er umráðandi fyri eina havn at altíð at hava økir tøk til virksemi, ið hevur tørv á flutningi umvegis bryggjukant. Alt havnaaøkið í Tórshavn er í løtuni avsett og í nýtslu til verandi virksemi hjá verandi kundum. Á Sundi er "gamla" havnaøkið næst við bryggjuni í nýtslu alt sum tað er, meðan helvtin av nýggju útfyllingini eystureftir á Sundi er útleigað. Sostatt eru nærum eingi tøk øki eftir á verandi havnaøkjum til at kunna viðka um virksemi, um og tá ið tørvur verður á tí, t.d. sum komandi tilfeingisdepil.

Strandalinjan í Tórshavnar kommunu, har ið til ber at staðseta góð havnaløg, er avmarkað, og tí er tað umráðandi, at fáu havnaløgini verða nýtt skynsamt og einans til virksemi, ið hevur tørv á flutningi umvegis bryggjukant ella sambandinum við sjógvin. Onnur vinna, ið ikki hevur hendan tørvin, eigur heldur at verða staðsett aðrastaðni enn við havnaløgini.

**Tilmæli**

Havnarmeistarin mælir havnanevndini til at taka undir við upprunauppskotinum um endurskoðaða byggisamtykt sambært skjalinum *Kollafjørður – broytingar*, men mælir samstundis havnanevndini frá, at partur av matr. nr. 257c (økið sunnanfyri asfalteraða og innhegnaða økið) verður broytt til vinnuøki.

**Havnanevndin 05. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting at verandi havnaøki verður varðveitt sum havnaøki við matr.nr.257c.

**Ískoyti:**
Í smb. við politisku viðgerðina av uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð, eru ymiskar broytingar samtyktar.

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 7. mars 2022 varð samtykt at:

1. Víðka neystaøkið úteftir undir matr. nr. 329.
2. Fáa samtyktu broytingina við matr. nr. 47 við.
3. Broyta part av matr. nr. 257c sunnan fyri verandi havnaøki til vinnuøki.

Á fundi í Kollafjarðanevndini hin 28. mars 2022 varð mælt til, at:

4. Broyting 1 í B2 økinum (bátahylurin í Líðini) verður varðveitt sum eitt trivnaðarøki og ikki broytt til eitt B2 havnaøki.
5. Broyting 4 í B2 økinum verður broytt til eitt vinnuøki ístaðin fyri havnaøki, og at vinnuøkið verður víðkað yvir til kaikantin.
6. Taka undir við at broyta part av matr. nr. 257c til vinnuøki og víðkast til at fevna um økið, ið ikki er asfalterað.

Á fundi í Havnanevndini hin 5. apríl 2022 varð samtykt at:

7. Verandi havnaøki við matr. nr. 257c verður varðveitt sum havnaøki.

Til hetta hevur umsitingin hesar viðmeringingar:
Ad. 1. Tikið verður undir við hesi viðmerking.
Ad. 4. Tikið verður undir við hesi viðmerking, men mælt verður til, at økið verður eitt C1 øki ístaðin fyri C3 øki. Munurin á ásetingunum í teimum báðum økjunum er, at C1 er lagt til miðstaðabygging og C3 er lagt til miðstaðabygging, skúlar og íbúðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja punkt 1, 2 og 4, at nevndin tekur støðu til punkt 3, 5, 6 og 7 og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir tilmælinum frá umsitingini, punkt 1, 2, og 4, og við punkt 7.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 160/22 Broyting av ásetingum um nýtslustig fyri 1. og 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 148/22 | 22/02494-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 160/22 | 22/02494-1 |

**Upprunin til málið**
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu viðger í løtuni nakrar umsóknir um bygging inni í miðbýnum (1. og 2. Grundumráði), sum ikki eru í tráð við almennu byggisamtyktina fyri økið, men sum annars politiskt og býarskipanarliga verða mettar sum ætlanir, ið gagna býnum og eru í tráð við ymiskar ætlanir fyri býin, t.d. Miðbýarætlanina. Tá bygging ikki er í tráð við almennu byggisamtyktina, men man annars tekur undir við ætlanini, eru møguleikin fyri at gera serstakar byggisamtyktir mest nýtta býarskipanarliga amboðið. Tað er júst hetta amboðið, ið hevði verið nýtt í teimum umsóknunum, ið eru inni, men ein áseting í almennu byggisamtyktini um mest loyvda nýtslustig fyri økið sum heild forðar hesum.

**Lýsing av málinum**
Í øllum byggiøkjum í kommununi eru ásetingar um bygging so sum byggistig, nýtslustig og hæddir ásettar í almennu byggisamtyktini. Somuleiðis stendur lýst, hvørjum ásetingum víkjast kann frá, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Hetta er eitt nógv nýtt amboð í fleiri ymiskum byggiøkjum, og verður nýtt til at skipa tað avmarkaða økið nærri í mun til nærumhvørvið, politikkir og ætlanir í kommununi og tílíkt. Fyri 1. og 2. Grundumráði er ásett, at víkjast kann frá ásetingunum um byggistig, nýtslustig og hæddir, um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri eitt natúrligt avmarkað øki. Tá kemur til byggistig og hæddir, so er einki hægsta mark fyri, hvussu stórt frávikið kann vera, men tá tað kemur til nýtslustig er ásett, at frávikið í mesta lagi má vera 3,0 fyri økið sum heild í 1. grundumráði og 1,25 fyri økið sum heild í 2. grundumráði. At áseta eitt mark fyri, hvussu høgt nýtslustigið fyri eitt økið sum heild, verður mett at vera ein ótíðarhóskandi og órímiligur máti at skipa øki í byggisamtyktini, av tí at talan er um ymiskir eigarar í sama øki, ið ikki fáa somu treytir at byggja undir.

Mett verður, at ásetingin um, at nýtslustigið ikki skal fara upp um eitt vist (3,0 í 1. grundumráði og 1,25 í 2. grundumráði) fyri økið sum heild, eigur at verða tikið úr almennu byggisamtyktini.

Nýtslustigið regulerar fyrst og fremst tættleikan í einum øki. Tættleikin hevur ávirkan á, hvussu nógv øki er eftir til fríøki, samlaða vavið av byggingini í økinum og hvussu nógv trýst er á ymisku teknisku leiðingunum í økinum.

Tað kunnu vera fleiri orsøkir til, at hægri nýtslustig er neyðugt fyri víðari menningina av miðbýnum. T.d. fleiri eldri økjum í miðbýnum, har flestu bygningarnir vóru bygdir, áðrenn almenna byggisamtyktin varð gjørd, og tí eru flestu bygningarnir størri í vavi enn ásetingar fyri 2. grundumráði loyva. Tá kann tað vera hóskandi at loyv tættari bygging, enn almenna byggisamtyktin loyvir, soleiðis at nýggja byggingin í vavi hóskar til byggingina í nærumhvørvinum.

Tað kann eisini vera, at mett verður, at ávíst virksemi tolir størri tættleika, enn ásetingar í almennu byggisamtyktini loyva. Tað kann t.d. virskemi, ið ikki hevur eins stóran tørv á fríøkjum og ikki lastar teknisku leiðingarnar í økinum eins nógv, og økið annars er ætlað til.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sí viðhefta skjal *Broyting í ásetingum fyri 1. og 2. Grundumráði.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Broyting í ásetingum fyri 1. og 2. Grundumráði*, journal nr. 22/02494-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ásetingin um nýtslustig sum heild, §2, stk. 7 og §3, stk. 7, smb. skjali *Broyting í ásetingum fyri 1. og 2. Grundumráði*, verður tikið úr almennu byggisamtyktini og beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 161/22 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Dr. Jakobsensgøtu og Sverrisgøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 149/22 | 22/02850-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 161/22 | 22/02850-1 |

**Upprunin til málið**
Liður í arbeiðinum at gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna í Tórshavn.

**Lýsing av málinum**
Í smb. við arbeiðið at gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna, sí mál 21/00642, skulu øki, ið ætlanin er at nýggja serstaka byggisamtyktin skal fevna um, takast úr øðrum galdandi serstøkum byggisamtyktum. Í hesum førinum er talan um at taka matriklarnar 321, 322, 368, 369 og 370, Tórshavn, úr serstøku byggisamtyktini fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu, og verður hendan avloyst av nýggju serstøku byggisamtyktini fyri miðbýarkjarnuni.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Áðrenn broyting eru matriklarnir fevndir av serstøku byggisamtyktini fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu, sí skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu.*

Eftir broyting eru matriklarnir fevndir av nýggju serstøku byggisamtyktini fyri miðbýarkjarnuna, sí skjal *Serstøk byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri økið har nýggja bakaríið skal byggjast matr. nr. 322 og 323, Tórsgøta/Sverrisgøta, Tórshavn*, journal nr. 21/00642. Avtøkan av serstøku byggisamtyktini fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu fyri matr. nr. 321, 322, 368, 369 og 370 er treytað av, at serstaka byggisamtyktin fyri miðbýarkjarnuna verður samtykt og góðkend.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Serstøk byggisamtykt fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu* - áðrenn broyting, journal nr. 22/02850-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at uppskotið um at taka matr. nr. 321, 322, 368, 369 og 370, Tórshavn úr serstøku byggisamtyktini fyri Dr. Jakobsensgøtu og Sverrisgøtu, treytað av, at uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna verður samtykt, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 162/22 Umsókn um broyting av hæddarásetingini fyri B1 øki í almennu byggisamtyktini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 146/22 | 20/01023-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 162/22 | 20/01023-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar havn hevur sent umsókn um at broyta mest loyvdu hædd í B1 økjum frá 12 m til 16 m. Hetta er í sambandi við, at Smyril Line ynskir at byggja nýggjan terminalbygning, og sambært Tórshavnar havn er tað av stórum strategiskum týdningi fyri havnina, at teir fáa loyvi til hetta.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í innleiðandi fundunum, ið hava verið í smb. við umsóknina hjá Smyril Line, hevur umsitingin hjá Tórshavnar kommunu lagt dent á, at talan skal verða um ein bygning, ið tekur seg væl út í økinum, tí hóast talan er um eitt vinnuøki, so verður bygningurin sera sjónligur frá býnum og verður fyrsta møti hjá nógvum ferðafólkum við Føroyar.

Smyril Line hevur latið gjørt eitt skipanaruppskot, sí skjal *20220401_Smyril Line _SKIPANARUPSKOT APRÍL 2022.* Í uppskotinum sæst, at dentur er lagdur á arkitektoniska dygd og at skipanin skapar eitt meirvirði fyri økið. Niðari parturin av bygninginum er úr betong og sýnist at vaksa upp úr havnalagnum. Hann er ein tilsipan til ídnaðarpartin og í hesi hæddini eru eisini goymslu- og pakkhølir, sum er virksemi, vit kenna frá havna- og ídnaðarøkjum. Omaná liggur ein træstrukturur, sum er munandi lættari og heitari enn betonggrundarlagið. Í hesum partinum er ovari terminalur og skrivstovurnar.

Skipanin av økinum leggur stóran dent á at geva “molan aftur til fólkið”. Hetta verður gjørt við einari almennari gonguleið, ið endar uppi á tekjuni á bygninginum, hagar útsýni er yvir fjørðin, Nólsoynna og havsbrúnna. Á hendan hátt verður ætlaða nýggja umhvørvið við Eystara havnaøki, við t.d. Tjóðleikhúsinum, longt út á Molan.

Mett verður, at loyvast kann at byggja hægri í partum av økinum, um ikki á øllum økinum. Tí verður mælt til, at gjørd verður ein serstøk byggisamtykt fyri økið, í staðin fyri at broyta hæddarásetingina fyri øll B1 havnaøki í kommununi. Soleiðis kann serstaka byggisamtyktin skipa økið neyvari, víst verður t.d. á øki, har hægri bygging verður loyvd, øki, har bygging smb. almennu byggisamtyktini verður loyvd, og øki, ið skulu nýtast til bíðirøð og farm, og har lítil og eingin bygging verður.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- *§8, stk. 1. Umráðisparturin verður sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í samband við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt og til virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.*
- *§8, stk. 4. Mest loyvda hædd á bygging er 12 m, tó kann undantak gevast tá talan er um kranar og einstakar bygningslutir, t.d. trapputorn, ið eru í mesta lagi 200 m$^2$ til víddar.*
- *§8, stk. 5. Hæddir á húsum skulu verða settar í hvørjum einstøkum føri út frá heildarmeting av nýtslu og skapi.*
- *§8, stk. 7. Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3 og 4 í serstakari byggisamtykt fyri alt økið ella ein náttúrligan part av tí.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *20220401_Smyril Line _SKIPANARUPSKOT APRÍL 2022.,* journal nr. 20/01023-6.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Molan,* journal nr. 20/01023-9.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Molan og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

# 163/22 Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri økið har nýggja bakaríið skal byggjast matr. nr. 322 og 323, Tórsgøta/Sverrisgøta, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 147/22 | 21/00642-6 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 163/22 | 21/00642-6 |

**Upprunin til málið**
Ymiskir íleggjarar/byggiharrar hava í eina tíð víst áhugað í at byggja íbúðir á matr. nr. 32, har gamla bakaríið hjá Franst Restorff var. Nú eitt felag hevur keypt ognirnar (ella gjørt avtalu um at keypa ognirnar) á matr. nr. 322, 321, 369 og 370, sí skjal *Broyting av byggisamtykt*, er klárt hjá umsitingini at viðgera umsóknina um at gera serstaka byggisamtykt fyri ognirnar.

Nýggi eigarin ynskir somuleiðis, at serstaka byggisamtyktin skal fevna um matr. nr. 323 og 368, ið eru privat ogn hjá øðrum eigara, umframt matr. nr. 365, ið eru ogn hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Í smb. við at formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini hevur havt eitt ynski um at endurskoða ásetingarnar fyri miðbýin, hevur umsitingin hjá Tórshavnar kommunu greinað miðbýarkjarnina, og er komin við nøkrum átøkum ið kundu verði gjørd, soleiðis at tey serligu eyðkennini í miðbýnum verða varðveitt, samstundis sum man byggir meir, og fær fleiri bústaðir í miðbýnum. Í greiningini hjá umsitingini verður m.a. víst á nakrar kvalitetir í miðbýnum, ið man ynskir verða varðveitir, og hvussu man kann byggja hægri í útvaldum økjum. Tá bygt verður hægri hevur tað týdning, at ovasta hædd verður trekt inn, hetta soleiðis at bygningurin ikki sýnist so høgur og ger betur ljósviðurskifti niðri á vegnum. Harumframt eigur niðasta hædd at verður trekt inn, soleiðis at vegur og fortov verður rúmligari, og tað ber til at hava forpláss til bygningarnir, ið hava útvent virksemi á niðastu hædd, og at atlit verður tikið til veðurviðurskiftini vit hava í Føroyum.

Tríggir ráðgevar eru bidnir um at koma við tilboði uppá at gera eina ætlan fyri miðbýarkjarnuna, ið nágreinar hesi átøk, og sum kann vera grundarlag fyri eini nýggjari serstakari byggisamtykt fyri økið. Tilboðini frá ráðgevunum verða eftir ætlan inni 1. juli, soleiðis at arbeiðið at gera ætlanina kann byrja 1. september og handast kommununi 1. desember 2022.

Av tí at ætlanirnar við gamla bakarínum hjá Frants Restorff eru komnar nakað ávegis, er ætlanin í fyrstu atløgu at gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 321, 322, 323, 365, 368, 369 og 370. Ætlanin er at víðka hesa serstøku byggisamtyktina seinni, í tráð við ætlanina fyri miðbýarkjarnuna, sum vinnandi ráðgevarnir eftir ætlan handa kommununi 1. desember 2022.

Verkætlanin sum P/F Frants Restorff hevur í umbúnaði, umfatar 35+12 leiguíbúðir í ymiskum støddum, samantvinnað við 700 m$^2$ av handilshølum og parkering undir jørð. Leiguíbúðir í ymiskum støddum – frá 2-3 rúmum er við til at tryggja ymiskleika og sentrala staðseting av bústøðum. Handilshølini á niðastu hædd eru við transparentum framsíðum, sum verður partur av miðbýarvirkseminum, og 1 parkeringspláss til hvørja íbúð er staðsett undir jørð, soleiðis at parkeringstørvurin hjá íbúgvunum verður nøktaður á ognini sjálvari, uttan at parkeringin gerst ein sjónligur partur av býarmyndini.

Uppskotið til serstøku byggisamtyktina loyvir bygging smb. innsendu umsókn, sí skjal *Miðbýarbygging,* vit tí broyting, at niðasta hædd móti Sverrisgøtu og Tórsgøtu verður trekt inn, soleiðis at eitt yvirdekkað øki verður á miðhædd, við møguleika fyri upphald, og lívd fyri veðrinum.

Eigararnir byggja íbúðirnar og síðani er ætlanin at selja til annað felag, ið skal leiga út og umsita. Ásetingar um nýtslu verða settar í serstøku byggisamtyktina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Ásetingar fyri 1. grundumráði eru m.a.:

- 1. grundumráði verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhølir og tílíkt.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,6.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 1,3
- Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallarin verður roknaður sum húsahædd.
- Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, nattúrliga avmarkað øki. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 3,0.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Av tí at hetta er ein stór broyting fyri miðbýin er tað týdningarmikið, at hendan ætlanin tekur atlit til ætlanirnar fyri miðbýin, sum umsitingin arbeiðir við síðuleypandi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Broyting av ásetingum um nýtslustig fyri 1. og 2. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu,* journal nr. 22/02494

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Broyting av byggisamtykt,* journal nr. 21/00642-10.
- *Miðbýarbygging,* journal nr. 21/00642-12.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læ<br>ttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera serstaka byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna smb. umsóknini *Miðbýarbygging*, við tillagingunum sum nevndar eru omanfyri og treytað av at avtala fæst við aðrar eigarar av ognum, ið eru fevndar av uppskotinum, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Tróndur Sigurðsson setti fram broytingaruppskot um, at matr. nr. 327, Tórshavn, eisini verður fevnt av ætlaðu broytingini í byggisamtyktini.

Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskiparnevndini við broytingaruppskotinum frá Tróndi Sigurðsson, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi: Ruth Vang.

# 164/22 Umsókn um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri matr. nr. 410a, 411d, 413a, 413b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 136/21 | 21/02554-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 201/21 | 21/02554-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 145/22 | 21/02554-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 164/22 | 21/02554-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 410a, 411d, 413a og 413b hevur søkt um at fáa gjørt serstaka byggisamtykt fyri økið, soleiðis at parkeringshús, við íbúðum ovast, kann loyvast, sí skjal *Parkering og íbúðarbygningur*. Í innsenda uppskotinum er pláss fyri 150 p-plássum, umframt 8 íbúðum á ovastu hædd.
Matr. nr. 410a, 411d, 413a og 413b liggja í miðbýnum í Tórshavn. Økið liggur millum Bøkjarabrekku sunnanfyri og Kongagøtu norðanfyri. Eystanfyri er Tinghúsvegurin og vestanfyri er Niels Finsens gøta.

**Lýsing av málinum**
Ferðslan í miðbýnum hevur í nógv ár verið merkt av manglandi parkeringsplássum, og fleiri ymiskir møguleikar hava seinastu árini verið umrøddir, fyri at loysa hendan trupulleikan. Ein teirra er parkeringshús á matr. nr. 410a, men eru hesar ætlanir ongantíð komnar á mál. Nú hevur eigarin gjørt eitt uppskot, sum tykist kunna loysa ein part av parkeringsavbjóðingunum í miðbýnum. Talan er um eitt parkeringshús í 3 hæddum (6 forskotnar hæddir), parkeringskjallara og 8 íbúðum á ovastu hædd. Innkoyring til bygningin er frá Kongagøtu, við inn- og útkoyring skipað á hvør sínum vegbana.

Økið liggur í 1. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu – økið til blandaða bústaða- og miðastaðabygging.
Byggingin, ið søkt verður um, hevur eitt byggistig á 0,825, nýtslustig á 3,759 og hæddin frá lendinum er 13 m (ovasta hædd er trekt inn frá framsíðuni). Økið liggur í 1. Grundumráði og ásetingarnar fyri økið eru m.a., at mest loyvda byggistig er 0,6, mest loyvda nýtslustig er 1,3 og mest loyvda hædd er 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Í serstakari byggisamtykt er tó møguligt at víkja frá ásetingum viðvíkjandi hædd, byggi- og nýtslustigi. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 3,0.

Almenna byggisamtyktin er í stóran mun menta á bústaðar- og vinnubygging, og í minni mun á eitt nú parkeringshús, og hetta sæst aftur nú søkt verður um loyvi at byggja eitt parkerinshús í miðbýnum. Um byggingin, sum søkt verður um, skal vera møgulig, er soleiðis neyðugt at gera serstaka byggisamtykt fyri økið. Í hesum føri er talan um eitt parkeringshús, sum stórur tørvur er á í býnum og sum hevur eina aðra ávirkan á býin, enn onnur bygging. T.d. hevur bygningurin ikki tørv á fríøki rundan um, og ein tílíkur bygningur setur ikki stórvegis krøv til tekniskar leiðingar. Tí verður mett, at tað í hesum føri er ráðiligt at gera serstaka byggisamtykt, ið loyvir bygging, ið er størri enn loyvt verður í almennu byggisamtyktini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri 1. grundumráði eru m.a.:

- 1. grundumráði verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhølir og tílíkt.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,6.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 1,3

- Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallarin verður roknaður sum húsahædd.
- Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, nattúrliga avmarkað øki. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 3,0.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Parkeringviðurskiftini í miðbýnum hava leingi verið ein avbjóðing, m.a. orsakað av øktari bilferðslu og trupulleikum at útvega neyðug parkeringsøki til tað, ið verður bygt. Fyri at royna at bøta uppá hesi viðurskifti, verður mælt til at broyta ásetingarnar fyri 1. og 2. Grundumráði, soleiðis at byggi- og nýtslustig fyri parkeringshús verður hækkað.
Hetta er somuleiðis ein fortreyt fyri, at serstaka byggisamtyktin fyri parkeringshúsið, sum verður viðgjørt í hesum málinum, kann gerast.

Byggingin, ið søkt verður um, er treytað av at avtala fæst við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a, av tí at byggingin fer inn á teirra ognir/liggur heilt upp at markinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska fyrisiting ger uppskotið til serstøku byggisamtyktina.

**Skjøl**
*Parkering og íbúðarbygningur*, journal nr. 21/02554-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ja ☐ Nei ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At serstøk byggisamtykt, sum loyvir bygging av parkeringshúsi smb. skjalinum *parkering og íbúðarbygningur* verður gjørd, treytað av at avtala verður gjørd við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a.
- Um eingin avtala fæst við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a, at umsitingin tillagar uppskotið, soleiðis at parkeringshúsið rúmast á ognum umsøkjarans.
- At arbeiðið at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at eitt hægri byggi- og nýtslustig verður loyvt fyri parkaringshús í 1. og 2. grundumráði, verður byrjað.
- At beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongai ímóti og einari blankari.
Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð viðgjørt seinast, eru ymiskar broytingar gjørdar í verkætlanini á matr. nr. 410a, 413a, 413b og 411d, Tórshavn. Tað eydnaðist ikki at fáa avtalu í lag við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a, Tórshavn, so nýggja uppskotið er tillagað, soleiðis at parkeringshúsið rúmast á ognum umsøkjarans, sí skjal *Parkeringshús_Feb 2022_Umsókn um broyting av byggisamtykt*. Harumframt er lutfallið millum íbúðir og parkeringshús broytt, soleiðis at tað í núverandi uppskoti eru 21 íbúðir og 135 p-pláss. Innkoyringin verður frá Bøkjarabrekku og útkoyring á Kongagøtu.

Endaliga innrættingin av bygninginum er ikki greið, og eru avbjóðingar í núverandi uppskoti, ið skulu loyvast, áðrenn innrættingin prinsipielt kann góðkennast, men uttaru karmarnar eru nøktandi, við nøkrum fáum tillagingum. Smb. nýggja uppskotinum, sí skjal *Parkeringshús_Feb 2022,* er parkering í 3 hæddum (6 forskotnum hæddum), har 1,5 hædd av hesum eru undir jørð. Omaná eru tvær hæddir við íbúðum, og tilhoyrandi terassum.

Har eru fleiri viðurskifti, ið ikki eru í tráð við almennu byggisamtyktina, t.d. byggistig, nýtslustig og hæddin á bygninginum, umframt tað, at byggingin liggur út í mark á øllum síðum, men kunnu hesi viðurskifti regulerast í serstakari byggisamtykt.

Viðv. hæddini, so er hæddin frá vegnum á vestaru síðu (lægsta síðan) av ognini 13 m til hægsta punkt av bygninginum, har tvær tær ovastu hæddirnar eru trektar inn. Mett verður, at hetta er ráðiligt, og at byggingin fylgir einari natúrligari hæddarlinju í mun til vegin, lendið og bygningarnir vestanfyri og eystanfyri.

Viðv. byggistigi og nýtslustigi, so varð metingin í fyrru viðgerð tann, at man í parkeringshúsum kundi loyva einum hægri byggi- og nýtslustigi enn fyri t.d. bústaðabygging og vinnubygging. Hetta av tí at 1,5 hædd av byggingini, ið telur við í nýtslustignum, eru undir jørð, og tí tykist rúmdin á byggingini ikki eins stór, sum nýtslustigið annars kundi týtt uppá og av tí at talan er um bygging, ið ikki hevur eins stóran tørv á fríøki og ikki lastar økið á sama hátt.

Broytingarnar í lutfallinum millum parkering og íbúðir smb. nýggja uppskotinum gera tó, at krøvini til útiøkini gerast størri, soleiðis at trivnaðurin hjá íbúgvunum verður tryggjaður. Viðmerkjast kann, at tann parturin av byggingini, sum er íbúðir, svarar til 1,3 í nýtslustigi, sum er tað, ið verður loyvt smb. almennu byggisamtyktini. Afturat hesum koma so parkeringshæddirnar, ið svara til uml.  2,7 í nýtslustigi.

Tað verður mett at hava týdning, at tað í serstøku byggisamtyktini er ásett, at bygningurin skal hava í mesta lagi 21 íbúðir og í minsta lagi 135 p-pláss. Hetta soleiðis at tað verður tryggjað, at endamálið við serstøku byggisamtyktini verður rokkið. Síðani skal arbeiðast meira við innrættingini av bygninginum, soleiðis at innrættingin er nøktandi í mun til trivnað, trygd, galdandi reglur og normar. Um tað í smb. við hetta arbeiðið vísir seg, at tað ikki er rúm fyri øllum, so skal tað hóast hetta verða minst 135 p-pláss og í mesta lagi 21 íbúðir.

Viðv. byggingini út í mark, so er tað í tráð við almennu byggisamtyktina, at bygt verður við framsíðu í veglinjuna. Í mun til byggingina út í grannamark móti eystri, so verður tað eitt krav í mun til m.a. bruna, at byggingin út í grannamark verður uppført sum brunaveggur smb. galdandi reglum um bygging í mark. Íbúðarbyggingin skal verða trekt í minsta lagi 2,5 m frá grannamarki móti eystri. Á ognini 409e, ið er granni móti norðri, er bygt heilt út í mark. Verkætlanin hjá umsøkjara skal tillagast soleiðis, at byggingin verður trekt minst 5 metrar frá byggingini á matr. nr. 409e.

Parkeringshúsið er í tráð við ynskið um at tætta býin og fáa fleiri parkeringspláss og íbúðir í miðbýnum. Parkeringshús eru stór og fylla nógv í umhvørvinum, og fer hetta at ávirka sethúsadámin á økinum í mun til øktu ferðsluna og vavið av bygginigini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til, um serstøk byggisamtykt til 21 íbúðir og 135 p-pláss skal gerast, smb. innsenda uppskoti við teimum tillagingum, ið eru nevndar omanfyri, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

# 165/22 Framflytingar fyri roknskaparárið 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.05.2022 | 146/22 | 22/01979-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 130/22 | 22/01979-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 165/22 | 22/01979-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtast sum eykajáttan í býráðnum, tvs skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár.
Meirnýtslan skal vera burtur innan trý ár.

Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er um at flyta meiri enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

Ársroknskapurin fyri 2021 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2022.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er fyri rakstur 16,5 mió.kr netto og fyri íløgur 159,6 mió.kr og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | 5,8 mió. | 84,4 mió. |
| TH | 10,7 mió. | 75,2 mió. |
| **Íalt** | **16,5 mió.** | **159,6 mió.** |

Víst verður til uppskot til broytingar í framflytingum í skjali nr. 22/01979-4
Samlaða minninýtslan fyri Tórshavnar kommunu frárokna Tórshavnar Havn er 5,8 mió.kr. Á §§ 1, 2, 3 og 7 er talan um minninýtslur, ímeðan tað á §§ 4, 5 og 6 er talan um meirnýtslur.

Framflytingin á **§ 1 Kommunal fyrisiting** er ein minninýtsla á íalt kr 4,4 mió.kr. Stórur partur av hesi framflytingini, 1,7 mió.kr, er á 1313 Teknisk fyrisiting. Á 1317 Heilsu- og umsorganarfyrisitingini verða fluttar fram 845 tkr, á 1311 Miðfyrisiting 585 tkr og 490 tkr á 1110 Býráðið. Mælt verður ikki til nakrar innanhýsis flytingar ísv framflytingarnar.

Á **§ 2 Almanna- og heilsumál** er ein samlað framflyting av avlopi upp á 16,7 mió.kr. Tey størstu avlopini eru á 2721 Røktartænastur 6,6 mió.kr og á 2722 Tilboð 9,9 mió.kr. Størsti parturin av minninýtsluni á 2722 Tilboð kemst av, at Urd ikki kom í fullan rakstur fyrr enn eftir summarfrítíðina, og demensdepilin lat upp seinni enn ætlað. Á 2721 koma 4 mió.kr av minninýtsluni av, at meirjáttan til røktarøkið, sum býráðið hevði samtykt, ikki var møgulig at seta í verk vegna starvsfólkatrot. Størsta flytingin av einum stovnsnummari er 5,5 mió.kr av 2722 Tilboð, og størsta flytingin á eitt stovnsnummar er 4,7 mió.kr á 2720 Heilsuhúsið. Fyri aðrar framflytingar, sí skjal.

Samanlagda minninýtslan á **§ 3 Børn og ung** er netto 5,9 mió.kr. Skotið verður ísv framflytingina upp at gera flytingar inni á greinini fyri íalt 11,5 mió.kr. Minninýtslan á dagstovnum minkar ísv flytingina úr 11,5 niður í 4,6 mió.kr. Aðrar kontur, ið avlop verður flutt yvir á, er t.d tímar vegna serligan tørv við 1,3 mió.kr. Á kontuna fyri broytingar og minni umvælingar á stovnum verða fluttar 1,4 mió.kr, og 1,5 mió.kr verður

flutt til at dekka meirnýtslu, tí tað ikki var nóg nógv játta til serstovur í 2021. Umframt aðrar minni upphæddir til aðrar kontur.

**§ 4 Undirvísing** hevur eina meirnýtlsu á 3,6 mió.kr ella 8%. Ongar broytingar ella innanhýsis flytingar eru.

**Á § 5 Mentan og frítíð** er talan um eina meirnýtlsu á 5,2 mió.kr svarandi til 8%. Ongar broytingar ella innanhýsis flytingar eru.

Á **§ 6 Teknisk mál** er ein meirnýtsa á 14,5 mió.kr ella 10%. Í samband við framflytingina er uppskot um innanhýsis at flyta 2 mió.kr frá 7317 Talgilding til borgaran til kontu 20910 Aðrar inntøkur.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á 16,5 mió.kr netto til rakstur og 159,6 mió.kr til íløgur. Eisini verður mælt til at gera broytingar í framflytingini sambært hjálagda skjali 22/01979-4.

**Fíggjarnevndin 24. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð um málið sum samtykt við fyrstu viðgerð við einum broytingaruppskoti frá Bjørg Dam um at flytingin frá konto 6610 verður strikað.

Uppskotið einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 166/22 Broyting í reglugerð um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 08.06.2022 | 16/22 | 22/02186-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 167/22 | 22/02186-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 166/22 | 22/02186-1 |

**Upprunin til málið**
Tørvur er á at gera ávísar broytingar í reglugerðini um nýtslu av bátaplássum.

**Lýsing av málinum**
Galdandi reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum kom í gildi 1. mars 2014 og avloysti reglugerð frá 1. januar 2008.
Tørvur er á einstøkum dagføringum í reglugerðini. Hesar broytingar eru:

1. <u>Forboð móti at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu</u>

Tað eigur ikki at verða loyvt at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu, hvørki fast ella í sambandi við útleigan til ferðavinnuendamál.

Tískil verður skotið upp at innseta nýtt stk. 8 og nýtt stk. 9 í § 1 í reglugerðini:

> *Stk.8. Tað er ikki loyvt at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu.*
>
> *Stk. 9. Tað er ikki loyvt at nýta bátaplássið til ferðavinnuendamál, ið umfatar gisting umborð á bátinum í bátaplássi í Tórshavnar kommunu, herundir, men ikki avmarkað til, útleigan av báti gjøgnum Airbnb og líknandi skipanir.*

2. <u>At "medeigari" kann yvirtaka bátapláss, treytað av skjalprógvi.</u>

Sambært galdandi reglugerð kann bátaeigari einans lata hjúnarfelaga ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka bátapláss. Í ávísum førum kann hendan áseting verða óheppin, um fleiri eigarar hava verið felags um bátin, men bert tann eini stendur fyri bátaplássinum

Tískil verður skotið upp at broyta § 2 stk. 5, ið er soljóðandi:

> *"Stk.5 Bátaeigarin hevur á ongan hátt loyvi at lata onnur enn hjúnafelaga, ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka bátaplássið."*

Til soljóðandi:

> *"Stk. 5. Eftir umsókn kann medeigarin yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið, treytað av, at skjalprógv er latið Th minst 5 ár frammanundan, ið prógvar, at medeigarin eigur hálvpart (50%) í bátinum, sum brúkar plássið."*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Reglugerð um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu, dagfest 1. mars 2014.

**Upplýsingar frá umsitingini**

### Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

### Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

### Skjøl

- J.Nr. 22/02186-2 : Galdandi reglugerð fyri nýtslu av bátaplássi í Tórshavnar kommunu
- J.Nr. 22/02186-3 : Uppskot til broytta reglugerð um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | **Ja** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| **Umhvørvisavleiðingar** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |
| **Sosialar avleiðingar** | | | **Nei** | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **Nei** | **Nei** | **Nei** | **Nei** |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**

Havnarmeistarin mælir til, at reglugerðin um nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu verður broytt soleiðis sum greitt er frá í lýsingini av málinum, t.v.s. at í § 1 í reglugerðini verður innsett nýtt stk. 8 og nýtt stk. 9, ið eru soljóðandi:

> *Stk.8. Tað er ikki loyvt at búgva umborð á báti í bátaplássi í Tórshavnar kommunu.*
>
> *Stk. 9. Tað er ikki loyvt at nýta bátaplássið til ferðavinnuendamál, ið umfatar gisting umborð á bátinum í bátaplássi í Tórshavnar kommunu, herundir, men ikki avmarkað til, útleigan av báti gjøgnum Airbnb og líknandi skipanir.*

Harumframt at broyta § 2 stk. 5, ið er soljóðandi:

> *"Stk.5 Bátaeigarin hevur á ongan hátt loyvi at lata onnur enn hjúnafelaga, ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka bátaplássið."*

Til soljóðandi:

> *"Stk. 5. Eftir umsókn kann medeigarin yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið, treytað av, at skjalprógv er latið Th minst 5 ár frammanundan, ið prógvar, at medeigarin eigur hálvpart (50%) í bátinum, sum brúkar plássið."*

Og at enda, at § 13 verður broytt til:

> *Reglugerðin kemur í gildið tann 1. juni 2022*
>
> *Stk.2 Reglugerðin, fyri leigarar av bátaplássi í Tórshavnar kommunu, sum kom í gildið 1. mars 2014, fer samstundis úr gildi.*

**Havnanevndin 08. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting at medeigarin minimum eigur 25% í bátinum stk. 5 í kunngerðini. Reglugerðin kemur í gildið 1. juli 2022, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá Kára Johansen um at beina málið aftur í havnanevndina, ið varð einmælt samtykt.

# 167/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 87/22 | 22/00009-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 74/22 | 22/00009-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 116/22 | 22/00009-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 101/22 | 22/00009-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 138/22 | 22/00009-1 |
| 8 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 131/22 | 22/00009-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 176/22 | 22/00009-1 |
| 10 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 167/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**

Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| Býráðsfundur<br>22. juni 2022 | Blað nr.: 674 | |
| | Formansins merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Framlagt og góðkent.

| | Býráðsfundur<br>22. juni 2022 | Blað nr.: 676<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 168/22 LGBT-Føroyar : Umsókn um stuðul til Føroya Pride 27. juli 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 08.06.2022 | 146/22 | 22/02582-2 |
| 2 Trivnaðarnevndin | | | 22/02582-2 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 168/22 | 22/02582-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um stuðul.

**Lýsing av málinum**
Talan er um umsókn til árligu Faroe Pride-gonguna. Gongan var ikki í 2020 og 2021 vegna koronu. Sagt verður, at í mun til fólkatalið í Føroyum er hetta ein av heimsins størstu pridum og tað eiga vit øll at verða stolt av. Lagt verður nógv fyri at gera hana til eina góða uppliving fyri øll. Hóast stórar broytingar eru hendar seinastu árini til tað betra í mun LGBT+arar, so er framvegis nógv eftir at gera – bæði í mun til hugburð og rættindi, verður sagt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur um mentanarstuðul samtyktar av mentamálanevnd Tórshavnar Býráðs 3. september 2019.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mentamálanevndin hevur stuðlað Faroe Pride síðan 2012 soleiðis:
Kr. 50.000 í 2012, kr. 25.000 í 2013, 2014 og 2015, kr. 20.000 í 2016, kr. 25.000 í 2017, kr. 20.000 í 2018 og 2019.

Vísandi til, at talan er afturvendandi árligt tiltak, er spurningur, um ásetast skal fastur stuðul til endamálið framyvir.

Fíggjarstøðan á kontu 5366 Stuðul annars talar fyri, at stuðulin fyri í ár verður lægri enn undanfarin ár.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
LGBT hevur eisini søkt trivnaðarnevndina um stuðul til átak í sambandi við tiltakið her í 2022.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta kr. 12.500 í stuðli av kontu 5366 Stuðul annars.

**Mentamálanevndin 08. juni 2022:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Ruth Vang, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annika Olsen, mælir til at játta kr. 25.000.

**Ískoyti:**
Tjóðveldi í Tórshavnar Býráði biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.
Vit biðja somuleiðis um at fáa uppskotið sett fram til atkvøðugreiðslu.

**Lýsing av málinum - samandráttur**
Øll árini, sum Faroe Pride hevur verið fyriskipað í Føroyum, hevur týdningurin verið alstórur. Dagurin er sera jaligur, og tað hevur veruliga gjørt mun fyri LGBTarar og øll, sum standa nær, at túsundtals fólk í øllum aldri hava víst sín stuðul og ynski um einar rúmligar Føroyar.

Hóast fleiri sigrar síðstu árini, er framvegis nógv eftir at gera, tá tað snýr seg um rættindi og hugburð. Føroysk tøl frá 2016 hava víst, at 49% av LGBTarum hava kent seg tunglyntan í eitt longri tíðarskeið, og at heili 56% kenna angist. Arbeitt verður nú við eini nýggjari kanning, sum er gjørd síðstu vikurnar, og tølini síggja út til at vera verri enn tey vóru í 2016. Støðan er álvarsom. Ágangurin er ein vaksandi trupulleiki, og tí hava vit tørv á eini røð av átøkum at fremja sálarheilsuna hjá LGBTarum. Faroe Pride er ein týdningarmikil partur av hesum.

Okkara ungu siga frá haturstala, happing og harðskapi í almenna rúminum, sum fer langt útum tað, sum vit eiga at góðtaka. "Eg bleiv bukaður í búkin, tí eg dansaði við einum drongi", greiðir ein drongur m.a. frá. Pridin er eitt sjónligt og jaligt mótspæl móti hesum upplivingum og er hetta ein av fleiri orsøkum til, at pridin hevur ein so ómetaliga stóran týdning.

Pridin er ókeypis, og tí hevur stuðulin frá Tórshavnar Kommunu serliga stóran týdning. Tey síðstu árini hevur stuðulin ligið á 25.000 kr., sum hevur munað, men talan hevur kortini verið um eina ov lága játtan. Talan er tí um ein veruligan smeit, tá stuðulin nú bleiv skerdur við meira enn eini helvt niður á 12.500 kr. Eingin skrúðgonga var í 2020 og 2021, tískil var eingin stuðul latin tey árini, og talan er tí um eina ógvusliga sparing, tá stuðulin til Faroe Pride hóast hetta verður skerdur so nógv. Kostnaðurin av at halda Faroe Pride er umleið 100.000 kr.

Allir høvuðsstaðir kring okkum hava pride og gera nógv burturúr at stuðla. M.a. kann nevnast, at Oslo hevur ein politikk og mál um, at kommunan skal standa seg best, tá tað kemur til rúmligheit, og sum part av hesum politikki vera ein stoltur viðspælari í árligu pride skrúðgonguni í Oslo. Oslo-, Reykjavíkar- og Keypmannahavnar Kommuna stuðla við ávikavist 2.1, 0.5 og 1.3 DKK um árið.

Høvuðsstaðurin eigur at vera eitt stað, har vit øll kunnu trygt vera tey, vit eru, og tí er tað so týdningarmikið, at Tórshavnar kommuna er ein viðleikari og stuðlar pridini, sum øll árini hevur verið við til at flutt Føroyar rætta vegin bæði í mun til rættindi og hugburð.

Tjóðveldi skjýtur tí upp, at Faroe Pride fær fulla stuðulsupphædd á 75.000 kr. Stuðulin verður játtaður av konto 5366 Stuðul annars.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Atkvøtt varð um málið undir einum saman við máli 22/03205.

Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari atkvøðu og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

# 169/22 Avtala við LGBT um skrúðgongu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 191/22 | 22/03205-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 169/22 | 22/03205-1 |

**Upprunin til málið**
Skrúðgonga hjá LGBT 2022

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við árligu skrúðgonguna hjá LGBT verður biðið um at játta upp til kr. 50.000 um árið í 3 ár.

Peningurin skal brúkast til at fíggja pall, ljós, ljóð og trygdartiltøk herundir samarittar og ferðslutrygdartiltøk v.m. í sambandi við skrúðgonguna hjá LGBT uppundir ólavsøku.

Gjørd verður trý ára avtala millum Tórshavnar kommunu og LGBT um at Tórshavnar kommuna í 2022, 2023 og 2024 veitir LGBT ein árliga stuðul á í mesta lagi kr. 50.000 til omanfyri nevndu tiltøk í sambandi við árligu skrúðgonguna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum Tórshavnar kommunu og LGBT og at játta upp til 50.000 kr. um árið í 3 ár av konto 5310 Mentanartiltøk o.a.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Atkvøtt varð um málið undir einum saman við máli 22/02582.

Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari atkvøðu og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Elsa Berg | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| | Ruth Vang | |